

# Greinasavn

Tórshavn, apríl 2021

LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

*Løgtingsins umboðsmaður*
**Greinasavn 2021**
© 2021 Løgtingsins umboðsmaðurr
Umbróting, prent og innbinding: Sendistovan
Myndir: Faroephoto

ISBN 978-99918-891-0-8

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur

# Innihaldsyvirlit

**Partur 1. Eftirlit umboðsmansins**

Eftirlit ... 8
Grundgevingar fyri at avvísa klagur ... 11
Hvat ger Løgtingsins umboðsmaður ... 14
Løgtingsins umboðsmaður 10 ár ... 17
Val av umboðsmanni ... 19
Viðgerð av avvístum klagum ... 22
1-ára klagufreistin í umboðsmanslógini ... 24

**Partur 2. Fyrisitingarrættur**

At betra um lógir og fyriskipanir ... 28
At halda seg kenna (upplýsingarskyldan) ... 30
At skriva ella ikki ... 33
Fráfaringaravtalur innan tað almenna ... 35
Góður fyrisitingarsiður ... 38
Grundgeving ... 40
Innlit í fyrisitingina ... 43
Journalisering ... 47
Málsviðgerðartíð ... 50
Myndugleikahugtakið í fyrisitingarlógini ... 53
Notatskylda ... 56
Ógegni ... 59
Partshoyring ... 62
Samskifti á Facebook ... 65
Skjalainnlit í dátugrunnar ... 67
Talgild fyrisiting ... 70
Talufrælsi, tagnarskylda og loyalitetur ... 72
Valdsreingjan ... 75
Vegleiðing ... 78

**Partur 3. Barnarættindi**

Børn hava eisini rætt ... 84
Hoyring av børnum – grein 12 í Barnarættindasáttmálanum ... 86
Barnsins rættur til umsorgan í fosturheimi og á stovni - grein 20 í Barnarættindasáttmálanum ... 89
Rætturin hjá barninum til best møguliga heilsustøðu – grein 24 í Barnarættindasáttmálanum ... 92
Rætturin hjá barninum til útbúgving – grein 28 í Barnarættindasáttmálanum ... 95
Umboðsmaðurin fær fleiri heimildir á barnaøkinum ... 98
Virksemi hjá umboðsmanninum á barnaøkinum ... 100



# Fororð

Umboðsmaðurin ger árliga eina frágreiðing frá gongdini í árinum. Síðani 2011 hava starvsfólk hjá Umboðsmanninum skrivað greinar, sum viðgera ymisk evni innan fyri arbeiðsøkið hjá stovninum, sum kunnu verða ein vegleiðing hjá teimum, sum arbeiða í almennari fyrisiting.

Nú 20 ár eru liðin, síðan Løgtingsins umboðsmaður fór undir sítt virksemi, havi eg valt at nýta hetta høvið at savna tær greinar, sum hava staðið í ársfrágreiðingunum higartil, og geva tær út í hesum bóklingi.

Mars 2021

*Sólja í Ólavsstovu*
*Løgtingsins umboðmaður*



*Partur 1.*

# Eftirlit umboðsmansins

# Eftirlit

**Birta Biskopstø,** ráðgevi (2012)

*„Av tí at lógarverkið í Føroyum ikki er dagført, er rættarstøðan hjá dømdum menningartarnaðum í Føroyum sera vánalig. Eg fari staðiliga at heita á landsstýrismannin í innlendismálum, sum umsitur málsøkið revsi- og rættargangslóg, um at skipa so fyri, at lóggávan á hesum økinum verður dagførd, soleiðis at rættarstøðan hjá teimum dømdu á Bóndaheygi 14 verður tryggjað.“*
*(brot úr síðu 10 í frágreiðing umboðmansins frá 2007)*

## Arbeiðsøki umboðmannsins

Umboðsmaðurin hevur, sambært lógini um Løgtingsins umboðsmann, eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum, eins og umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikar ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi. Myndugleikar hava skyldu til at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt. Harumframt hevur umboðsmaðurin rætt til at vitja øll støð, ið verða kannað, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Nógv tey flestu málini, sum umboðsmaðurin hevur til viðgerðar, snúgva seg um klagur frá borgarum. Viðgerðin av innkomnum klagum kemur í fyrstu røð. At umboðsmaðurin raðfestir viðgerð av innkomnum klagum fremst, skal síggjast í samanhangi við, at teir borgarar, sum hava vent sær til umboðsmannin við eini ítøkiligari klagu, ofta hava ta fatan, at tey eru illa viðfarin av einum myndugleika í sambandi við, at myndugleikin hevur tikið eina avgerð, ella at avgerðin ikki er røtt, ella at myndugleikin als ikki tekur eina avgerð.

Sjúrður Rasmussen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, vísti í fyrilestri sínum á ráðstevnuni, ið varð hildin á 10 ára degnum hjá umboðmansstovninum, millum annað á, at: „Tað at klagað verður til løgtingsumboðsmannin er uppá ein ella annan hátt eitt útrykk fyri, at klagarin enn hevur eitt sindur av resursum. Tann púra hjálparleysi hevur ikki slíka orku og klagar tí ikki.“

## Mál av egnum ávum

Hóast meginparturin av arbeiðsorkuni hjá umboðsmanninum hevur verið nýttur at viðgera innkomnar klagur, hevur umboðsmaðurin tikið mál upp av egnum ávum og hevur eisini verið á eftirlitsvitjanum á stovnum. Hesi eftirlitsmál er ikki so nógv í tali, men hava fylt nakað meira í vavi og hava eisini verið rættiliga orkukrevjandi fyri stovnin.

Felags fyri tey flestu eftirlitsmálini, sum umboðsmaðurin hevur tikið upp av egnum ávum, er, at umboðsmaðurin hevur mett, at talan hevur verið um ein bólk av fólki í samfelagnum, sum hevur torført við at koma til orðanna. Í summum førum hevur eisini verið talan um, at ein klaga er komin til stovnin, sum á tann hátt hevur gjørt umboðsmaðurin varhugan við málini, og tá hevur umboðsmaðurin mett tað at vera neyðugt at seta ein størri kanning í verk.

## Kanningar av ymiskum málum

Í 2005 fór umboðsmaðurin undir at kanna 70 ymisk mál hjá Almannastovuni (j. nr. 200500059). Tey mál, sum umboðsmaðurin gjøgnumgekk frá Almannastovuni vóru 20 mál um fyritíðarpensjónir, 20 mál um sjúkradagpening, 10 mál viðvíkjandi koyristólum, 10 mál viðvíkjandi gongustativum, 5 mál viðvíkjandi avlamisbilum og 5 mál viðvíkjandi íbúðarbroytingum. Biðið varð um tey seinast avgreiddu málini í hvørjum bólki.

Í 2007 kannaði umboðsmaðurin 10 fyritíðarpensjónsmál og 15 endurbúgvingarmál (j. nr. 200700061).

Orsøkin til, at umboðsmaðurin kannaði hesi mál hjá Almannastovuni, var fyrst og fremst tann stóri viðskiftaskarin, sum Almannastovan hevði, og harvið eisini tann stóra týdningin, sum stovnurin hevur fyri samfelagið.

Ætlanin við kanningunum var ikki at leita eftir einstøkum smærri feilum, men afturímóti eftir „systemfeilum“ í málsviðgerðini og møguligum óhepnum mannagongdum.

Tilmælini frá umboðsmanninum førdi við sær, at eitt nú mannagongdir og oyðubløð hjá Almannastovuni vóru endurskoðað, eins og grundleggjandi fyrisitingarligar reglur, millum annað notatskyldu, hoyring og viðgerðartíðin av málum, vóru innskerpað yvir fyri starvsfólkum.

## Eftirlitsvitjanir

Umboðsmaðurin var í oktober 2002 á eftirlitsvitjan á psykiatriska deplinum (j. nr. 200200039). Á hesi eftirlitsvitjanini gjørdi umboðsmaðurin vart við, at hann ikki helt tað vera nøktandi, at upp til fýra sálarsjúklingar vóru stúvaðir saman á somu stovu, eins og tað var sera óheppið, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum vóru har meira ella minni ímóti sínum vilja, ikki høvdu umstøður at vera fyri seg sjálvan.

Støðan á psykiatriska deplinum var ikki ókend hjá heilsu- og almannamyndugleikunum, og tí var talan ikki um nakrar nýggjar upplýsingar, men tað er ikki óhugsandi, at júst tað, at umboðsmaðurin gjørdi vart við hesi viðurskifti, gjørdi, at myndugleikarnir skjótari fóru undir eina tilgongd at betra um umstøðurnar hjá teimum sálarsjúku. Longu árið eftir vórðu hús keypt við tí endamáli at hýsa fólki, ið eru sálarsjúk, og sum ikki høvdu tørv á at vera innløgd á psykiatriska depilin. Eisini førdi hetta við sær, at verulig gongd kom á ætlanirnar um at betra um støðuna hjá teimum 40-50 fólkunum, sum ikki høvdu tørv á at vera innløgd á psykiatriska deplin.

Umboðsmaðurin var í februar 2007 á eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi (j. nr. 200700007). Umboðsmaðurin viðgjørdi í frágreiðingini leiklutin hjá føroysku myndugleikum, sum varða av hesum øki. Umboðsmaðurin hevur ikki heimild at viðgera leiklutin hjá dómsvaldinum og Føroya landfúta, sum eru danskir myndugleikar í Føroyum. Serforsorgin varð 1. januar 1988 yvirtikin sum føroyskt málsøki.

Sambært frágreiðingini hjá umboðsmanninum var orsøkin til eftirlitsvitjanina á sambýlinum á Bóndaheygi í Havn, at hetta sambýlið, umframt at hýsa einum veikum bólki í samfelagnum, eisini hevði ein serligan áhuga, av tí at persónar, ið hava revsidóm, búgva í sambýlinum.

Í frágreiðingini hjá umboðsmanninum sæst, at undir eftirlitsvitjanini búðu tveir persónar á sambýlinum sum høvdu ávikavist dóm til uppihald á stovni, og dóm til umsjón Almannastovunnar. Tá umboðsmaðurin var á vitjan, vóru umleið 17 ár síðani, dómur varð feldur í tí eina málinum og bert einaferð í hesum tíðarskeiði, umleið 3 ár eftir, at dómur varð feldur, varð dómurin tikin uppaftur. Umboðsmaðurin fekk upplýst, at hin dómurin ongantíð varð tikin upp til endurskoðan, og tá ið umboðsmaðurin var á vitjan, vóru umleið 12 ár síðani, at dómur varð feldur. Av tí at umboðsmaðurin ikki hevði heimild til at viðgera leiklutin hjá dómsvaldinum og Føroya landfúta, sendi umboðmaðurin hesar upplýsingar til Folketingets Ombudsmand, sum tók sær víðari av málunum. Folketingets Ombudsmand tók málið upp til fyribils viðgerð. Hetta hevði við sær, at gongd kom á málini hjá teimum dømdu, eins og Føroya Rættur eftirfylgjandi hevur tikið dómarnar hjá teimum dømdu upp til endurskoðan.

Á eftirlitsvitjan á Bóndaheygi gjørdi umboðsmaðurin eisini vart við, at tað er óheppið, at búfólk við dómi og búfólk uttan dóm búgva á sama stovni. Hetta hevur t.d. við sær, at tey búfólk, ið ikki hava dóm, eru undir somu ávaringarskipan, sum tey búfólkini, ið hava dóm, og kunnu tí ikki ferðast frítt inn og út úr íbúð síni. Eisini hevur hetta við sær, at tey búfólk, ið ikki hava dóm, kenna seg settan í bás saman við teimum búfólkum, ið hava dóm. Av tí at tað sýntis sum, at búfólkini trívast saman, fór umboðsmaðurin ikki at gera meira við hetta, men umboðsmaðurin bað Nærverkið umhugsa samansetingina av búfólki hesum viðvíkjandi, tá ið tey taka nýggj búfólk inn á stovnin.

Eftirlitsvitjanin á Bóndaheygi hevði millum annað við sær, at landsstýrismaðurin í innlendismálum, sum umsitur málsøkið revsi- og rættargangslóg, skipaði so fyri, at lóggávan á hesum økinum varð dagførd, soleiðis at rættarstøðan hjá teimum dømdu á Bóndaheygi 14 varð betur tryggjað. Eisini var ein beinleiðis avleiðing av eftirlitsvitjanini hjá umboðsmanninum, at danskir myndugleikar í Føroyum fóru at viðgera mál, sum nærum vóru „gloymd“. Ein av orsøkunum til, at hesi mál vóru „gloymd“, er helst tann, at talan var um mál, sum bæði danskir myndugleikar og føroyskir myndugleikar varða av, og sum tað sæst í frágreiðingini, metti ongin av føroysku myndugleikunum seg hava ábyrgd av møguligum fráboðanum og uppfylging av málum hjá teimum dømdu.

Í 2012 var umboðsmaðurin á eftirlitsvitjan í sambýlunum á Traðarvegi og undir Fobbakletti í Sandavági og í sambýlunum á Mýrunum 4 og 6 í Hoyvík. Í frágreiðingunum hjá umboðsmanninum verður millum annað staðfest, at Nærverkið (nú Almannaverkið) og Almannamálaráðið ikki hava útint lógarásettu eftirlitsskyldur sínar.

Henda lógarásetta eftirlitsskylda fevnir millum annað um, at hoyringsreglur verða hildnar, tá búfólk søkja um at flyta inn á sambýli og eftirlit við sambýlunum sum heild, tað vil siga eftirlit við námsfrøðiliga støðinum í sambýlunum, eitt heilsufakligt eftirlit, eftirlit við fíggjarviðurskiftunum, eitt nú hvussu húsaleigan skal ásetast, eftirlit við fysisku umstøðunum í sambýlunum, við valdsnýtslu og umsitingini í sambýlunum annars.

## Samanumtikið

Tá umboðsmaðurin tekur mál upp av egnum ávum og ger kanningar av bústovnum, verða kanningarnar altíð

gjørdar í samráð við teir myndugleikar, sum varða av økinum. Umboðsmaðurin hevur enn ikki verið á ófráboðaðum eftirliti, tí mett verður, at tað er neyðugt við einum góðum samskifti við myndugleikarnar, sum varða av økinum. Tað er fatanin hjá umboðsmanninum, at myndugleikarnir hava tikið væl ímóti vitjanum hjá umboðsmanninum, eins og umboðsmaðurin altíð hevur fingið neyðug skjøl og upplýsingar frá myndugleikunum í sambandi við kanningararbeiðið.

Við eftirliti, sum er í samstarvi við myndugleikan, kann umboðsmaðurin royna at tryggja, at myndugleikar ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

# Grundgevingar fyri at avvísa klagur

**Jóhanna Arge,** ráðgevi (2013)

Av teimum 66 klagunum, sum umboðsmaðurin fekk í 2013, endaðu 44 við, at umboðsmaðurin ikki gjørdi meira við klaguna. Í hesi grein verður greitt frá orsøkunum til, at umboðsmaðurin, tá hann hevur kannað og umhugsað málið, ikki kann viðgera eina klagu ella ger av ikki at gera meira við klagur. Hetta verður fyrst og fremst gjørt við støði í teimum klagum, sum umboðsmaðurin hevur avvíst at viðgera í 2013.

## Uttan fyri heimildarøkið

Virksemi umboðsmansins fevnir um fyrisitingarnar hjá landinum og kommununum og feløg, stovnar og felagsskapir, ið verða roknað við til almennu fyrisitingina. Tað vil siga, at umboðsmaðurin kannar avgerðir og viðferðir, sum borgarar og mál fáa frá útinnandi valdinum.

Umboðsmaðurin kann ikki kanna privatar fyritøkur, privatar stovnar ella almenn partafeløg, og umboðsmaðurin ger tí einki við klagur um viðurskifti við t.d. peningastovnar, byggisjusk hjá byggifyritøkum ella atferðina hjá Atlantsflog ella Føroya Tele.

Danskir fyrisitingarmyndugleikar í Føroyum sum t.d. Føroya Landfúti verða ikki roknaðir við til føroysku fyrisitingina, og tískil kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesar myndugleikar.

Virksemið hjá umboðsmanninum umfatar heldur ikki dómstólarnar. Hetta kemst helst av, at tað er ikki sambæriligt við valdsbýtið, at umboðsmaðurin, sum løggevandi valdið hevur tilnevnt, kannar úrskurðir hjá dømandi valdinum. Í einstøkum førum hevur umboðsmaðurin avvíst at viðgera klagur um mál, sum eru løgd fyri rættin, ella sum lítil ivi er um, verða løgd fyri rættin.

Onki forðar umboðsmanninum í at kanna mál, har løgmaður og landsstýrisfólk hava verið við. Teirri embætisførsla sum ovastu fyrisitingarligu leiðarar verður tá kannað og ikki teirra virki sum politikarar. Umboðsmaðurin hevur ikki eftirlit við løgtinginum og kann ikki kanna mál, sum viðvíkja viðurskiftum millum løgmann/landsstýrisfólk og løgtingið. Við hesi grundgeving avvísti umboðsmaðurin undanfarna ár at kanna eina klagu um, at løgmaður skuldi havt sagt ósatt fyri løgtinginum, og at hann var vitandi um, at týðandi upplýsingar ikki vórðu latnar løgtinginum. Tílík mál má løgtingið ella landsstýrismálanevndin taka støðu til.

## Navnleysar klagur og viðgerð í trúnaði

Í umboðsmanslógini er ásett, at klagari skal navngeva seg. Seinastu árini hava tveir klagarar av ótta fyri starvssetanarligum avleiðingum heitt á umboðsmannin um at fjala samleika teirra fyri myndugleikanum, sum klagað varð um. Onnur klagan snúði seg um eina almenna starvssetan. Av tí, at tað ikki bar til at eyðmerkja klagaran, metti umboðsmaðurin klaguna sum ónavngivna, sum hann tískil ikki kundi viðgera. Í hinum førinum boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at kravið um, at klagarin skal navngeva seg, hevur við sær, at umboðsmaðurin kann ikki dylja navnið á klagarum fyri myndugleikunum. Haraftrat er ásett í lógini, at myndugleikin skal kunnast um klaguna, og áðrenn umboðsmaðurin ger sína niðurstøðu, skal myndugleikin hava høvi at greiða frá viðgerðini av málinum. Fyri at kunna gera hetta má myndugleikin vita, hvat mál klagan snýr seg um, tvs. eisini hvør klagarin er, og at hann hevur vent sær til umboðsmannin. Vanlig mannagongd er haraftrat at senda myndugleikanum møguligar viðmerkingar, sum klagarin hevur til frágreiðingina.

## Klagan komin ov seint

Freistin at klaga til umboðsmannin er eitt ár. Verður klagað um eina avgerð, skal avgerðin vera tikin seinasta árið. Flestu klagurnar til umboðsmannin eru rættstundis. Seinastu fimm árini hevur umboðsmaðurin í 11 førum avvíst at viðgera eina klagu grundað á, at hon er innkomin ov seint.

## Kærumøguleiki ikki troyttur

Klagur um avgerðir, ið ein møguligur hægri fyrisitingarmyndugleiki kann broyta, kunnu ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Ein avgerð hjá t.d. Almannaverkinum kann í flestu førum kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, og í tílíkum førum sendir umboðsmaðurin javnan kærumyndugleikanum klaguna við áheitan um at viðgera hana sum eina kæru. Eftir at kærumyndugleikin hevur tikið endaliga avgerð í málinum, kann málið klagast til umboðsmannin.

Fyri at umboðsmaðurin kann viðgera innihaldsligar spurningar í einum máli, skulu bæði viðgerandi myndugleikin og ein møguligur kærumyndugleiki hava tikið endaliga støðu til málið. Umboðsmaðurin kann ikki heita á myndugleikar um at steðga á við viðgerðini av einum máli. Umboðsmaðurin hevur tí avvíst at taka eina klagu til viðgerðar, sum snúði seg um, at klagarin óttaðist, at

ein kommuna fór at veita alment innlit í upplýsingar um klagaran, sum klagarin ikki metti vóru fevndar av rættinum til innlit.

Førir ein klagari fram nýggj sjónarmið, sum klagaði myndugleikin ikki hevur havt høvi at taka støðu til undir málsviðgerðini, sendir umboðsmaðurin vanliga í fyrsta umfari hendan partin av klaguni til myndugleikan at viðgera. Hetta verður gjørt, tí umboðsmaðurin kann ikki finnast at einum myndugleika fyri nakað, hann ikki hevur havt høvi at viðgera. Í øðrum førum er klagan send kommunala eftirlitsmyndugleikanum, tí umboðsmaðurin hevur mett, at myndugleikin í fyrstu atløgu eigur at taka støðu til málið.

Er klagarin ikki vegleiddur um, at ein avgerð kann kærast til hægri myndugleika, heitir umboðsmaðurin vanliga á myndugleikan um at vegleiða borgaran um, hvønn myndugleika avgerðin kann kærast til. Er eingin ivi um, hvør kærumyndugleikin er, sendir umboðsmaðurin týðum klaguna beinleiðis til kærumyndugleikan til viðgerðar. Viðmerkt verður samstundis, at ein møgulig lógarásett kærufreist eftir umboðsmansins fatan fer ikki at telja, fyrr enn borgarin er vegleiddur um kærumøguleikan.

Verður avgerðin hjá einum undirskipaðum myndugleika ikki kærd til yvirskipaða myndugleikan innan ásettu kærufreistina, er ongin møguleiki fyri eini umboðsmansviðgerð av málinum.

Reglan um, at kærumøguleikin skal vera troyttur, forðar tó ikki fyri, at spurningar um t.d. málsviðgerð verða lagdir fyri umboðsmannin, hóast hesir eisini kunnu viðgerast av viðkomandi hægri myndugleika. Hesa heimild nýtir umboðsmaðurin vanliga til at viðgera klagur um drúgva viðgerðartíð og vantandi svar frá myndugleikunum uppá t.d. innlitsáheitanir og umsóknir um sosialar veitingar.

## Ikki grundarlag fyri víðari kanningum

§ 6, stk. 4 ásetir, at umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í einum máli, sum klagað verður um. Umboðsmaðurin avvísir flest klagur við heimild í hesi áseting. At grundarlag ikki er fyri at kanna eitt mál nærri, merkir tó ikki, at klagurnar byggja á misskiljingar ella eru ógrundaðar. Grundgevingarnar eru nógvar og ymiskar.

Viðgerðin hjá umboðsmanninum fer fram á einum skrivligum grundarlag, og ein umboðsmansviðgerð er t.d. ikki egnað at greiða próvspurningar. Av tí, at umboðsmaðurin ikki avhoyrir vitni, kann umboðsmaðurin t.d. heldur ikki taka dagar ímillum tað, sum klagari og myndugleiki upplýsa, um hetta ikki samsvarar. Umboðsmaðurin hevur tí m.a. avvíst at viðgera eina klagu um, hvørt klagarin hevur móttikið eitt bræv frá myndugleikanum ella ikki. Myndugleikin hevði avrit av skrivinum í sínari varðveitslu, og brævið var ikki komið retur. Ein endalig staðfesting av spurninginum kundi ikki fremjast innan karmarnar av eini umboðsmansviðgerð, men mátti leggjast fyri dómsvaldið.

Umboðsmaðurin kann bert í avmarkaðan mun taka støðu til avgerðir, sum heilt ella partvíst byggja á serligan fakkunnleika. Ein kanning av metingum hjá t.d. læknum krevur ein fakkunnleika, sum umboðsmaðurin ikki hevur. Umboðsmaðurin metir seg tí t.d. ikki kunna seta spurnartekn við eina niðurstøðu um, at tað læknafakliga ikki var grundarlag fyri at ávísa ein borgara til eina ávísa viðgerð, ella taka støðu til, um sjúklingurin hevði fingið nøktandi viðgerð. Í tílíkum málum avmarkar umboðsmaðurin seg til at viðgera løgfrøðiligu spurningarnar, t.d. um málið er nóg væl upplýst.

Í einstøkum førum fær umboðsmaðurin klagur um málsviðgerðina í málum, sum eru avgreidd, og sum til fulnar ganga klagarunum á møti. Í slíkum førum fær umboðsmaðurin ikki hjálpt klagaranum við málinum. Hann hevur fingið fult viðhald, og í flestu førum metir umboðsmaðurin tað ikki tæna nøkrum endamáli at viðgera málið umaftur og finnast at einum myndugleika fyri mistøk og feilir, sum myndugleikin hevur ásannað og rættað. Í øðrum førum standa møgulig brot ikki mát við orkuna, sum skal nýtast til at kanna málið.

Tá klagað verður um drúgva viðgerðartíð av einum máli, kemur í fleiri førum beinanvegin gongd á málið, eftir at umboðsmaðurin hevur sent klaguna til ummælis. Er talan ikki um átaluvert drál, ella at málið er steðgað upp, verður klagan vanliga avvíst við teirri grundgeving, at gongd er komin á málið, og at umboðsmaðurin tískil ikki fær hjálpt klagaranum við málinum.

Drúgv viðgerðartíð av einum máli merkir ikki altíð, at gongd ikki er í málinum, ella at myndugleikin ikki arbeiðir við málinum. Hetta kann vera, tá søkt verður um eina almenna góðkenning av einum ella øðrum slag, og málsviðgerðartilgongdin í støðum er at meta sum ein samráðing um treytir heldur enn vanliga málsviðgerð.

Boðar ein myndugleiki frá, at hann tekur viðgerðina av málinum uppaftur, tá hann hevur fingið klaguna til ummælis, fær klagarin boð um, at hann kann venda sær aftur til umboðsmannin, tá myndugleikin hevur tikið eina nýggja avgerð, um klagarin til ta tíð er ónøgdur við avgerðina.

Í øðrum føri hevur umboðsmaðurin fyribils avvíst eina klagu um fyrisitingina hjá einum myndugleika í einum ávísum málslagi, sum var regulerað í kunngerð. Hetta komst ikki av, at umboðsmaðurin helt klaguna vera týdningarleysa, men at umboðsmaðurin metti, at aðalráðið, sum var yvirskipaður myndugleiki í mun til klagaða myndugleikan, átti at fáa høvi at kanna uppáhaldið og um neyðugt taka møgulig stig í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tók støðu til at viðgera klaguna.

Onnur dømi um avvístar klagur kunnu vera, at umboðsmaðurin metir málið at vera ein samráðingarspurning millum løntakara og arbeiðsgevara, at málið er meldað til løgregluna o.o.

Myndugleikin, sum klagað verður um, verður vanliga kunnaður um grundgevingarnar hjá umboðsmanninum fyri ikki at viðgera eina klagu um teirra fyrisiting.

# Hvat ger Løgtingsins umboðsmaður

**Gurið Joensen,** ráðgevi (2015)

*„Umboðsmaðurin skal vera ein trygd fyri vanliga borgaran móti avgerðum, hesin metir órættvísar, tilvildarligar, kanska beinleiðis skeivar, mistøk, vansketni ella vanrøkt av skyldum. “*
*(Brot úr viðmerkingunum til umboðsmanslógina)*

Tað verður mangan sagt, at okkara nútíðar samfelag er vorðið eitt formyndara- og eftirlitssamfelag. Samfelagið er vorðið meira lógarbundið, og eftirlit eru skipað til at hava eyga við umsitingini fyri at tryggja, at borgarin fær tann rætt, sum hann hevur sambært lóggávuni.

Hóast vit frammanundan hava onnur eftirlit og stovnar, so sum kærustovnar, eftirlitsstovnar, dómstólar, landsgrannskoðanin og landsstýrismálanevndin, sum meta um rættleikan í virkseminum hjá almennum myndugleikum, hevur Løgtingið mett tað vera neyðugt at seta á stovn Løgtingsins umboðsmann. Hesin skal vegna Løgtingið skal hava eftirlit við almennu umsitingini. Fyri at vísa á, hvør serstaka eftirlitsuppgávan hjá umboðsmanninum er, skal í stuttum vísast á eyðkennini fyri tað eftirlit, sum aðrar skipanir hava, og hvussu hetta er ymiskt frá tí eftirliti, ið umboðsmaðurin hevur.

## Kærumyndugleikar

Okkara fyrisitingarskipan byggir á meginregluna um, at ein fyrisitingarlig avgerð skal kunna roynast tvær ferðir, áðrenn sigast kann, at talan er um eina endaliga fyrisitingarliga avgerð. Alt eftir hvat øki, talan er um, verður slík viðgerð framd við at kærast kann til hægri fyrisitingarligan myndugleika, ella við at sett verður uttanhýsis kærunevnd, sum fær heimild at kanna og taka endaliga fyrisitingarliga avgerð í kærum um mál, har ein myndugleiki hevur tikið eina avgerð. Virksemið hjá kærumyndugleikanum er í slíkum førum treytað av eini ítøkiligari kæru frá borgara ella felag, og kæruviðgerðin snýr seg um rættleikan og viðgerðina í tí ítøkiliga málinum. Alt eftir hvussu mett verður um avgerðina ella viðgerðina í málinum, hevur kærumyndugleikin vanliga heimild at staðfesta, ógilda, broyta avgerðina ella at heimvísa málið til nýggja viðgerð hjá avvarðandi myndugleika. Virksemið hjá kærunevndunum liggur innan fyri tann almenna fyrisitingarliga bygnaðin.

## Dómstólar

Rættarviðgerð við dómstólarnar verður bert virkin eftir áheitan frá borgara, felag ella myndugleika, sum ynskir avgerð um sína tvístøðu við annan. Í rættarskipanini verða bæði tvístøður millum borgarar, feløg og myndugleikar royndar. Rættarskipanin liggur uttan fyri almenna fyrisitingarliga valdið og hevur ikki av egnum ávum eftirlit við umsitingini, men tekur, tá tað verður kravt, støðu til so gott sum allar rættarósemjur í einum samfelag so sum borgarlig mál, fútamál, revsimál og skiftimál.

## Landsgrannskoðanin

Landsgrannskoðanin er óheftur stovnur undir Løgtinginum. Landsgrannskoðanin ansar eftir, at landsroknskapurin er rættur, at roknskapar og eftirlitsskipanir eru tryggar, at peningurin er brúktur samsvarandi galdandi játtanum, lógum og fyriskipanum, og at umsitingin er sparin og virkin. Landsgrannskoðanin stuðlar løgtingsgrannskoðarunum í arbeiði teirra. Við atliti at spurningi um peningurin er brúktur samsvarandi galdandi lóg og játtan, viðger grannskoðanin eisini, hvussu tey einstøku fyrisitingarøkini verða umsitin, eins og grannskoðanin kannar, hvørjar tulkingar eru nýttar í arbeiðinum at umsita eitt fyrisitingarøki. Grannskoðanin hevur tó ikki heimild at krevja avgerð í einkultum málum broyttar, men nýtir sína niðurstøðu um ávísa økið sum grundarlag fyri síni støðutakan, um økið kann metast sum fíggjarliga skynsamt umsitið, og um landsroknskapurin er rættur.

## Landsstýrismálanevndin

Stýrisskipanarlógin og lóg um ábyrgd landsstýrisins áseta, at løgmaður og landsstýrismenn hava rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teimum málsøkjum, ið teir fyrisita. Samsvarandi § 38 í stýrisskipanarlógini hevur Løgtingið sett eina trímanna nevnd, landsstýrismálanevndin, at hava eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt. Tá nevndin hevur illgruna um óregluliga umsiting (embætisførslu), kann nevndin krevja, at løgtingsformaðurin setur kanningarstjóra at gera eina frágreiðing til Løgtingið, um fyrisiting av ávísum máli ella øki er útint á lógligan hátt. Ákæra um brot á lóg um ábyrgd landsstýrisins kann síðani verða reist av løgmanni eins væl og Løgtinginum, og Løgtingið ger av, hvør skal virka sum ákæri vegna hitt almenna í tílíkum málum. Málini verða løgd fyri nevningating at døma í slíkum málum.

## Løgtingsins umboðsmaður

Umboðsmaðurin virkar óheftur av øðrum myndugleikum og áhugamálum. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisiting heimastýrisins, t.v.s. bæði lands,- og kommunalu-

og interkommunalu myndugleikunum og ikki bert ávísum fyrisitingarøki, soleiðis sum ein vanligur kærumyndugleiki hevur. Umboðsmaðurin kann ikki viðgera klagur um dómstólar, Løgtingið, feløg og privatar persónar, tí hesi eru ikki almennir fyrisitingarligir myndugleikar, men eitt nú kemur virksemið hjá fyrisitingarligum kærumyndugleikunum eisini undir eftirlitið hjá umboðsmanninum, og ein av fyritreytunum fyri klaguviðgerðini hjá umboðsmanninum er, at kærumyndugleikin á økinum skal hava tikið støðu, áðrenn umboðsmaðurin viðger eina klagu. Umboðsmaðurin ger eisini, í mótsetning til ein vanligan kærumyndugleika og dómstólarnar, sjálvur av, hvørji mál hann tekur til viðgerðar.

Meðan kærumyndugleikar og dómstólar kunnu broyta avgerðir, so kann umboðsmaðurin ikki broyta eina avgerð, men hann kann siga sína hugsan um mál og koma við einum tilmæli til viðkomandi myndugleika.

Sambært viðmerkingunum til umboðsmanslógini skal umboðsmaðurin: „Vera ein trygd fyri vanliga borgaran móti avgerðum, hesin metir órættvísar, tilvildarligar, kanska beinleiðis skeivar, mistøk, vansketni ella vanrøkt av skyldum“. Í viðmerkingunum verður eisini sagt: „Vegurin til borð umboðsmansins skal vera stuttur og lættur hjá tí einstaka borgaranum, harumframt verður dentur lagdur á, at umboðsmaðurin av sínum eintingum hevur eftirlitsskyldu við lógum, reglugerðum v.m. Hann skal verða varur við, um hesi hava brek, ið kunna verða borgaranum til mismunar, og sjálvur kann hann taka mál til viðgerðar, metir hann tað vera neyðugt “

Eftirlitið hjá umboðsmanninum er sostatt at hava eitt virkið eftirlit við fyrisitingini, og hann kann leggja uppí og gera vart við gjørt mistak.

Heimildin hjá umboðsmanninum at taka mál upp av egnum ávum og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi verður brúkt, tá umboðsmaðurin metir, at eitt mál er prinsipielt, ella tí at grundleggjandi mistøk eru framd. Orsøkin til, at eitt mál verður tikið upp av egnum ávum, kann vera almenn umrøða, men kann eisini vera, at tað í samband við eitt nú ítøkilig klagumál eru komnar ábendingar fram um skipanarlig mistøk ella feilir í mannagongdum, sum hava ávirkan á umsitingina av einum øki.

Eftir at hava viðgjørt ítøkilig mál ella hava verið á eftirlitsvitjan ger umboðsmaðurin vart við síni sjónarmið umvegis niðurstøður og frágreiðingar. Umboðsmaðurin broytir ella staðfestir sostatt ikki avgerðir hjá myndugleikum, men ger sína meting av málinum sum heild ella partar av tí. Fyrisitingin hevur ikki skyldu til at fylgja tilmælum frá umboðsmanninum, men myndugleikarnir taka so gott sum altíð átalurnar til eftirtektar og fylgja hansara tilmæli.

Umboðsmansstovnurin er ein skipan, sum byggir á løgfrøðiliga grundgeving og álit. Umsitingin og avvarðandi landsstýrismaðurin gera sjálvi av, um tey vilja rætta seg eftir átalu ella tilmæli frá umboðsmanninum. Um støðan verður tann, at ein landsstýrismaður ikki tekur undir við tilmælinum frá umboðsmanninum, hevur Løgtingið møguleika til at leggja málið fyri landsstýrismálanevndina, sum kann kanna hetta. Um nevndin metir, at málið er soleiðis háttað, at talan kann vera um, at landsstýrismaðurin hevur fyrisitið sítt øki á ólógligan hátt, kann nevndin biðja um, at kanningarstjóri verður settur at gera frágreiðing, sum kann verða grundarlag fyri, hvørt møgulig ákæra skal reisast. Kanningarnar og tilmælini frá umboðsmanninum eru sostatt ein liður í eftirlitinum hjá Løgtinginum, sum kann vera viðvirkandi til, at annað eftirlit hjá Løgtinginum fær kunnleika um embætisførsluna á einum fyrisitingarøki og fær sett neyðug tiltøk í verk.

Umboðsmaðurin kann mæla til fría rættarførslu, um staðfest verður, at umsiting, hóast tilmæli frá umboðsmanninum, ikki vil taka mál til nýggja viðgerð, og mæla borgara til at fara í rættin við málinum. Her virka kanningarnar og tilmælini frá umboðsmanninum sum vegleiðing fyri borgara, sum metir seg vera skeivt viðfarnan av einum myndugleika.

## Samanumtikið

Fyrisitingarlógin og lógin um alment innlit hava slóðað fyri menning av fyrisitingarrættinum í Føroyum. Umboðsmansskipanin leggur upp til, at umboðsmaðurin við løgfrøðiligari grundgeving skal meta um og koma við tilmælum ella áheitanum til myndugleika at viðgera mál umaftur ella at umhugsa broyttar mannagongdir. Umboðsmaðurin verður tí ikki bara mettur at vera eitt eftirlit í mun til fyrisitingina, men eisini sum vegleiðari innan fyrisitingarrættin, har fyrisitingin, grundað á tilmæli frá umboðsmanninum, kann leggja fyrisitingina til rættis á skilagóðan og lógligan hátt.

Samanumtikið kann sigast, at umboðsmaðurin hevur trý týðandi virkisøki:

- at hjálpa borgarum, sum í ítøkiligum máli eru komnir illa fyri í almennu skipanini,
- at virka fyri at rætta upp á skeiva umsiting av einum lógarøki, og
- at virka fyri, at myndugleikar umframt tað løgfrøðiliga eisini fremja góðan fyrisitingarsið og viðgera borgarar virðiliga.

Umboðsmansskipanin í Føroyum varð sett í gildi 1. januar 2001. Mongu málini, sum umboðsmaðurin hevur viðgjørt hesi 15 árini, stovnurin hevur virkað, vísa, at tørvur hevur verið á umboðsmanninum. Tilmælini frá umboðsmanninum verða so gott sum altíð fylgd og hava verið við til at betra og víðka um kunnleikan til fyrisitingareglur, og hvønn atburð almennir myndugleikar eiga at hava mótvegis borgara, tá teir viðgera hansara viðurskifti.

Í stuttum kann tí sigast, at uppgávan hjá umboðsmanninum er áhaldandi at virka fyri at gera almennu umsitingina betri.

# Løgtingsins umboðsmaður 10 ár

**Sólja í Ólavsstovu,** umboðsmaður (2011)

Í flestu demokratiskum samfeløgum hevur løggávutingið valt ein ella fleiri persónar at hava eftirlit við almennu fyrisitingini. Ein umboðsmaður røkir hetta eftirlitið í flest øllum londum. Longu í 1809 varð í Svøríki sett á stovn eitt embæti, „justitieombudsmannen“, sum fyri Ríkisdagin skuldi hava eftirlit við embætismonnum kongsins. Finland fekk í 1919 ein umboðsmansstovn eftir svenskari fyrimynd, og síðani hava lond runt allan heimin sett á stovn líknandi stovnar, sum skulu hava eftirlit við almennu fyrisitingini. Í Føroyum fór fyrsti umboðsmaðurin til verka 1. mai 2001.

Tá 10 ár vóru liðin, síðani Løgtings umboðsmaður fór til verka, varð ein ráðstevna hildin í Norðurlandahúsinum. Á stevnuni helt Sjúrður Rasmussen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, ein fyrilestur við heitinum: „Løgtingsumboðsmaðurin – frustratión ella inspiratión“. Í fyrilestrinum nevndi Sjúrður, at hann í sínum gomlu skjølum sá, at hann var rættiliga ivingarsamur um ein løgtingsumboðsmannsstovn. Í einum notati, sum hann hevði skrivað til formansskap Løgtingsins í 1997, skrivaði hann, at „centrali spurningurin er at tryggja, at umboðsmaðurin hevur neyðuga yrkisliga førleikan og er nóg óheftur at gera av, hvat er lógligt ella ikki, og fær tær neyðugu ytru umstøðurnar til at gera neyðuga eftirkanningararbeiðið, og at landsfyrisitingin vil, kann og hevur umstøður til at rætta seg eftir avgerðum løgtingsumboðsmansins“. Sjúrður minnist, at hann nevndi, at tað var bara ein søguligur persónur, sum í roynd og veru leyk treytirnar at vera umboðsmaður – Guttormur í Múla. Lágvaksin, men sterkur, vitandi, ikki sørur í gandi, lógarkønur og hevði sera stóra virðing millum manna. Ongin setti spurnartekin við tað, Guttormur í Múla segði.

Sjúrður Rasmussen mælti formansskapi Løgtingsins til heldur at styrkja landsstýrismálanevndina við einum sterkum løgfrøðiligum sekretariati, og at geva borgarum betri møguleika at fáa fría rættargongd í rættarkervinum, enn at seta á stovn Løgtingsins umboðsmann.

Ikki bara Sjúrður Rasmussen var ivingarsamur, tá talan var um at seta á stovn ein umboðsmansstovn. Longu í 1978 varð uppskot lagt fyri tingið um ein umboðmansstovn. Løgtingsmaðurin, Jógvan Sundstein, legði fyri tingið uppskot til samtyktar at seta eina 5-mannanevnd at gera lógaruppskot um eina skipan við einum Løgtingsins umboðsmanni. Hóast nevndin, sum fekk uppskotið til viðgerðar, tók undir við tí, fall tað, tí bert 7 tingfólk vóru fyri. Í 1980 royndi Jógvan Sundstein aftur. Hesa ferð saman løgtingskvinnuni Karini Kjølbro, men aftur hesa ferð miseydnaðist royndin. Í 1982 royndu Jógvan Sundstein, løgtingsformaður, og Karin Kjølbro aftur at seta fram sama uppskotið. Løgtingið samtykti tá at seta eina 5-mannanevnd at gera lógaruppskot um eina skipan við einum Løgtingsins umboðsmanni. Nevndin varð vald, men verulig gongd kom ongantíð á nevndararbeiðið, og nevndin lat ongantíð nakað álit frá sær. Í mars 1992 legði Tjóðveldisflokkurin eitt uppskot fyri Løgtingið um at áleggja formansskapinum at seta eitt fólk at gera reglur fyri ein Løgtingsins umboðsmann, eins og at seta umboðsmannin innan ólavsøku sama árið. Í mai 1993 samtykti tingið hetta uppskotið, soleiðis at umboðsmaðurin skuldi setast innan árslok 1993. Heldur einki spurdist burtur úr hesi royndini.

Tað var ikki fyrr enn Jenis av Rana, løgtingslimur fyri miðflokkin, í 1999 setti fram uppskot til løgtingslóg um ein umboðsmann, at tað eyðnaðist at fáa samtykt lógina um Løgtingsins umboðsmann. Tann 1. mai 2001 tók Joen H. Andreassen, sorinskrivari, við embætinum sum Føroya fyrsti umboðsmaður. Hergeir Nielsen, sum tá var løgtingsformaður, segði í síni framløgu á 10 ára haldinum, at tá fyrsti umboðsmaðurin skuldi veljast, var fyrireikingin drúgv. Formansskapurin var sera tilvitaður um, at um stovninum skuldi verða lív lagað, galt tað um at finna tann rætta persónin. Ein persón, sum var virdur manna millum. Formansskapurin fekk umsiting tingsins at gera eitt yvirlit yvir allar royndar føroyskar løgfrøðingar, bæði innan- og uttanlands. Tosað varð síðan um, hvør hugsast kundi vera frægast skikkaður í hesum heilt serliga starvi. Formansskapurin kom til ta niðurstøðu, at Joen H. Andreassen var tann rætti maðurin. Eftir stutta umhugsanartíð tók hann av, og var hetta eitt gott val. Joen H. Andreassen boðaði beinanvegin frá, hvussu leingi hann fór at sita, og á heysti 2005 varð so aftur farið at leita eftir tí næsta umboðsmanninum og fall valið á meg. Eitt samt Løgting valdi meg tann 23. november 2005 og tann 8. oktober 2010 afturvaldi Løgtingið meg sum umboðsmann fyri tíðarskeiðið 1. januar 2011 til 31. desember 2016.

## Eyðkenni fyri ein umboðsmansstovn

Sum heitið bendir á, er umboðsmaðurin ein stovnur undir Føroya Løgtingi. Umboðsmaðurin verður valdur fyri eitt fimmára tíðarskeið at hava eftirlit við fyrisiting heimastýrisins. Umboðsmaðurin er í sínum virksemi óheftur av tinginum, og umboðsmaðurin ger sjálvur av, hvørji mál hann viðger. Løgtingið kann tí ikki áleggja umboðs-

manninum at taka ávís mál upp til viðgerðar. Um Løgtingið ikki longur hevur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av Løgtinginum tó loysa henda úr starvi.

Vanliga verða nøkur eyðkenni heft at hugtakinum „umboðsmaður“: Fyri tað fyrsta, at hann er avgjørt óheftur av myndugleikum og øðrum. Fyri tað næsta, at møguleikarnir hjá borgarunum at leggja mál fyri umboðsmannin skulu vera góðir. Fyri tað triða skal umboðsmaðurin mótvegis myndugleikunum kunna vísa á viðurskifti, sum ikki eru nøktandi. Og fyri tað fjórða skal tann, sum røkir embæti, vera ein persónur, sum fólk hava álit á og virðing fyri.

Tað, at umboðsmaðurin er óheftur av Løgtinginum, sæst m.a. í tí áseting, at umboðsmaðurin verður valdur fyri eitt fimmára tíðarskeið og kemur ikki í polistisk „spæl“, tá landsstýri og løgtingsnevndir skulu veljast. Harafturat skal ein stórur meiriluti, tveir triðingar av tinginum, atkvøða fyri uppskoti at koyra umboðsmannin frá. Umboðsmaðurin ger sjálvur av, hvørji mál umboðsmaðurin viðger, og Løgtingið kann ikki áleggja umboðsmanninum at kanna ávís mál neyvari.

Gáttin hjá vanligum borgarum at ráðføra seg við ella klaga til umboðsmannin er lág. Tað kostar onki at klaga til umboðsmannin, og eingi formlig krøv eru um, hvussu klagað verður. Ein og hvør, sum ikki heldur seg hava fingið rætta viðferð frá almennum myndugleikum, kann klaga til umboðsmannin. Hesin møguleikin er eisini ein liður í at tryggja rættartrygdina í samfelagnum.

Skipanin við umboðsmanninum leggur upp til, at umboðsmaðurin kann mæla til ella heita á myndugleikar um at viðgera mál umaftur ella broyta mannagongdir. Á hendan hátt er lagt upp til, at umboðsmaðurin verður vegleiðari hjá fyrisitingini, sum sjálv kann rætta síni møguligu mistøk. Men um henda skipanin skal virka eftir ætlan, so krevur tað, at fyrisitingin eisini er búgvin at viðurkenna møgulig brek og at rætta tey.

Skipanin krevur eisini, at politiska skipanin er búgvin. Tá umboðsmaðurin rakar við álvarsom lýti ella brek, skal hann eftir lógini boða formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og avvarðandi landsstýrismanni frá hesum. Harvið verða hesir partar óbeinleiðis drignir inn í málið. Taka myndugleikarnir ikki tilmælini frá umboðsmanninum í álvara, og verða ásjónligir feilir ikki rættaðir, ella ivasamar mannagongdir broyttar, kann henda støðan í seinasta enda fáa politiskar avleiðingar.

## Tørvurin á einum umboðsmanni

Tað er sett spurnartekin við, um vit í Føroyum hava brúk fyri einum umboðsmanni. Eitt sjónarmið er, at samfelagið er lítið, og at tað tí er lætt at hava gjøgnumskygni í fyrisitingini og hava eftirlit við, hvat myndugleikarnir gera. Eitt annað sjónarmið er afturímóti, at serliga í smáum samfeløgum er tørvurin størstur at hava ein óheftan eftirlitsstovn. Í smáum samfeløgum eru ikki sterkir áhugabólkar við professionellum starvsfólkum, sum hava eftirlit við, at myndugleikar ikki misbrúka sítt vald ella viðgera borgarar eins, og eftir galdandi lógum og reglum.

Í smáum samfeløgum kann tað tykjast trupult at taka tyngjandi avgerðir ella avgerðir, sum eru illa umtóktar. Av tí at tað er stutt ímillum borgarar, fyrisiting og politikkarar, er størri vandi fyri „persónligum sambondum“. Avleiðingin av hesum er, at avgerðir stundum verða tiknar, uttan at nøkur formlig málsviðgerð fer fram. Politikkur hevur ofta størri týdning fyri úrslitið í einum máli enn galdandi lógir og reglur, sum verða settar til viks. Í slíkum førum verður ofta roynt at lata vera við at hava viðurskiftini skrivlig og formlig, og ein serlig politisk og sosial mentan tekur seg upp. Dentur tykist verða lagdur á smidligar, effektivar og skjótar avgreiðslur.

Nevndu viðurskifti tala fyri, at tørvur er á einum sterkum og óheftum eftirlitsstovni sum umboðsmanninum ella dómstólinum fyri at halda útinnandi valdið á rættari leið og fyri støðugt at minna á meginregluna um virðing fyri rættarsamfelagnum og galdandi lógum og reglum. Tað hevur stóran týdning, at umboðsmaðurin ikki letur seg ávirka av dagsins trætum og ósemjum, ella letur seg stýra av kenslum í ítøkiligum málum og soleiðis fara av kós frá grundleggjandi samfelagsligu meginreglunum um demokrati, rættarsamfelag og rættvísa málsviðgerð.

Eg fari at enda hesa grein við nøkrum orðum hjá Johnhardi Klettheyggj, fyrrverandi ráðgeva hjá Løgtingsins umboðsmanni. Í sínum fyrilsetri á 10 ára haldinum viðgjørdi hann spurningin um, hvussu umboðsmansskipanin fer at gagna samfelagnum frameftir. Hann vísti á, at hesin spurningur liggur ikki bara í hondum umboðsmansins, men minst líka nógv í hondunum á samfelagnum, bæði tí útinnandi og tí lóggevandi valdinum. Tí, tað er upp til hesar myndugleikar at síggja til, hvussu umboðsmansskipanin verður vird og gagnnýtt til frama fyri rættarsamfelagið Føroyar.

# Val av umboðsmanni

**Sólja í Ólavsstovu,** umboðsmaður (2015)

*Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins. Um Løgtingið ikki longur hevur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum tó loysa hendan úr starvi.*

Nógv alment orðaskifti og umrøða var um málið, tá umboðsmaður skuldi veljast, tí starvstíð mín var úti við árslok 2015. Eg fari í hesi grein at greiða frá, hvussu mannagongdin er, tá umboðsmaður skal veljast, og hvussu henda samsvarar við mannagongdina í Danmark, Noregi, Íslandi og Grønlandi, sum hava líknandi lóggávu, sum vit hava í Føroyum.

Eftir løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann, broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 20 desember 2013, velur Løgtingið ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins og at hava eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum. Umboðsmaðurin er í sínum virksemi óheftur av tinginum og umboðsmaðurin ger sjálvur av, hvørji mál umboðsmaðurin viðger. Um Løgtingið ikki longur hevur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum tó loysa hendan úr starvi.

Fyrrverandi løgtingsformaður, Hergeir Nielsen, greiddi frá í sínari framløgu á 10-ára haldinum fyri stovnin, at tá fyrsti umboðsmaðurin skuldi veljast, var fyrireikingin drúgv. Formansskapurin var sera tilvitaður um, at skuldi stovninum verða lív lagað, so galt tað um at finna tann rætta persónin. Ein persónur sum var virdur manna millum. Formansskapurin fekk umsiting tingsins at gera eitt yvirlit yvir allar royndar føroyskar løgfrøðingar, bæði innan- og uttanlands. Tosað varð síðan um, hvør hugsast kundi vera frægast skikkaður í hesum heilt serliga starvi. Tann 2. november 2000 samtykti Løgtingið einmælt at velja Joen H. Andreassen, sorinskrivari, til embætið sum Føroya fyrsti umboðsmaður, og tók hann við starvinum 1. mai 2001.

Sum fyrrverandi løgtingsformaðurin soleiðis hevur greitt frá, er ikki talan um vanliga setanartilgongd, tá umboðsmaður skal veljast. Starvið verður ikki lýst leyst, og møguligir persónar til embætið verða valdir út við einari óformligari mannagongd, og tað er formansskapurin í Løgtinginum, sum stendur fyri arbeiðinum at velja ein umboðsmann.

Í lærubókini, Fyrisitingarlóg, eftir Kára á Rógvi og Bárð Larsen verður sagt á bl.s. 228, „formliga velur Løgtingið umboðsmannin. Í veruleikanum er tað tó løgtingsskrivstovan, ið velur umboðsmannin. Uppskot verður lagt fyri Tingið til atkvøðugreiðslu uttan kjak ella viðgerð. Soleiðis hevur tað verið í sambandi við fyrsta og annan umboðsmannin og eisini endurvalið av verandi umboðsmanni. Í Føroyum og Danmark hevur fatanin verið, at almenn viðgerð og kjak um uppskot til umboðsmann vil máa undan myndugleikan (autoritetinum) hjá embætinum heldur enn at styrkja hann."

## Mannagongdin

Sambært § 1 í umboðsmanslógini skal Løgtingið velja ein umboðsmann. Henda atkvøðugreiðsla fer fram sambært § 78, stk. 2, 2. pkt. og stk. 3 í tingskipanini. Hetta merkir, at tað krevst fleiri enn helmingurin av tingmanningini (17 atkvøður) fyri, um uppskotið skal verða samtykt.

Tá ið Løgtingið skal velja fólk, eitt ella fleiri, biður formaðurin munnliga um uppskot, og tá ið uppskot eru framkomin, verður eingin umrøða, men á sama fundi verður síðani farið til endaliga atkvøðugreiðslu í málinum.

Eftir løgtingslóg nr. 113 frá 20. november 2000 um samsýning og eftirløn til Løgtingsins umboðsmann § 6, hevur umboðsmaður, sum er í starvi hjá landinum, eini kommunu, kommunalum felagsskapi, landsfyritøku ella hjá einum konsessioneraðum felag, rætt til farloyvi úr starvi sínum.

Eitt samt Løgting valdi meg fyrstu ferð tann 23. november 2005. Av tí at eg kom úr einum starvi sum stjóri í almennu fyrisitingini, havi eg farloyvi frá mínum starvi sum stjóri í Fiskimálaráðnum. Tann 8. oktober 2010 var eg afturvald, somuleiðis av einum samdum Løgtingi fyri tíðarskeiðið 2011 til 2016.

Tann 2. desember 2015 legði løgtingsformaðurin uppskot fyri Løgtingið at velja meg aftur sum umboðsmann fyri eitt 5 ára skeið frá 2016 til 2021. Í hesum sambandi kom ein áheitan frá 6 tingmonnum um at bíða við atkvøðugreiðsluni í málinum um val av Løgtingsins umboðsmanni samsvarandi § 50, stk. 2 í tingskipanini.

Umsitingin hjá Løgtinginum gjørdi í einum uppriti greitt, hvussu mannagongdin er í tingskipanini, tá Løgtingið skal velja fólk. Víst varð á § 50 í Tingskipanini sum ásetur, at tá ið Løgtingið skal velja fólk, eitt ella fleiri, biður formaðurin munnliga um uppskot, og tá ið uppskot eru framkomin, verður eingin umrøða, men á sama fundi síðani farið til atkvøðugreiðslu í málinum. Um so er, at 6 tingmenn mæla til tess, verður ikki atkvøtt um evnini á sama fundi, sum tey eru skotin upp, men seinni á einum fundi, sum løgtingsformaðurin hevur ásett.

Sum umsitingin las ásetingina í § 50, so snýr henda seg fyrst og fremst um støðuna, tá tingið skal velja fólk, og biðið verður um uppskot úr tingsalinum. Tað kann í slíkum førum verða neyðugt at bíða við atkvøðugreiðsluni, soleiðis at tingmenn hava møguleika at hugsa seg um, áðrenn atkvøtt verður. Hendan støðan var ikki galdandi við vali av umboðsmanni, tí tað var øllum tingmonnum kunnugt, hvør stóð fyri vali sum Løgtingsins umboðsmaður. Umsitingin metti tí ikki, at § 50 kundi nýtast at útseta atkvøðugreiðsluna í hesum máli.

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni í desember 2015 gjørdist, at 22 atkvøddu fyri einum afturvali, 8 atkvøddu blankt og 3 atkvøddu ímóti. Av tí at ongin umrøða er av valinum í Løgtinginum er torført at staðfesta orsøkina fyri hesum úrsliti. Bæði undan og aftaná valinum, høvdu fjølmiðlarnir víst á eitt ítøkiligt mál, sum umboðsmaðurin hevði viðgjørt, tað sokallaða „Grannskoðaramálið", sum orsøk til, at valið av umboðsmanni dró út, og at semja ikki kundi fáast í Løgtinginum fyri einum afturvali av umboðsmanninum. Í útvarpssamrøðu beint aftan á valið, funnist formenninir í Fólkaflokkinum, Sambandsflokkinum og Miðflokkinum hvassliga at tilgongdini hjá samgonguni í sambandi við valið, og søgdu hetta vera orsøkina til teirra støðutakan til valið. Bæði Sambandsflokkurin og Miðflokkurin søgdu seg tó hava fult álit á stovninum og verandi umboðsmanni.

## Val av umboðsmanni í Norðurlondum

Longu í 1809 varð í Svøríki settur á stovn eitt embæti „justitieombudsmannen" sum vegna Ríkisdagin skuldi hava eftirlit við embætismonnum kongsins. Finnland fekk í 1919 ein umboðsmansstovn eftir svenskari fyrimynd, og síðani hava lond runt allan heimin sett á stovn líknandi stovnar, sum skulu hava eftirlit við almennu fyrisitingini. Eg havi ikki tikið valið av umboðsmanni í Svøríki og Finnland við í hesi grein, tí hesi hava eina øðrvísi skipan enn hini Norðurlondini.

### Danmark

Danski umboðsmaðurin fór til verka á fyrsta sinni í 1954. Umboðsmaðurin verður valdur eftir hvørt Fólkatingsval. Professarin, Stephan Hurwitz, dr.jur, var fyrstvaldi umboðsmaðurin, og síðani hava sitið fimm ymiskir umboðsmenn. Hans Gammeltoft Hansen, professari, hevur sitið longst sum umboðsmaður. Hann sat í hesum sessi í 25 ár. Hóast hann sat í 25 ár, atkvøddi Fremskridtpartiet hvørja ferð ímóti valinum. Eftir eini lógarbroyting, sum hendi í 2011, kann umboðsmaðurin bert sita 10 ár. Núverandi umboðsmaður varð fyrstu ferð valdur i desember 2011, og hann varð afturvaldur á heysti 2015. Valið var einmælt báðu ferðir. Bert eitt valevni verður skotið upp fyri Fólkatinginum, og starvið verður ikki lýst leyst. Rættarnevndin hjá Fólkatinginum fyrireikar málið um umboðsmannavalið, og mannagongdin er loynilig.

### Noregi

Noregi fekk sín fyrsta umboðsmann í 1962. Umboðsmaðurin verður valdur eftir hvørt stórtingsval, sum er fjórða hvørt ár. Valið fer fram í Stórtinginum eftir tilmæli frá formansskapinum í Stórtinginum. Núverandi umboðsmaður er Aage Thor Falkanger, hægstarættardómari. Hann varð einmælt valdur í 2014, eins og siðvenjan hevur verið fyri undangongumenn hansara. Aage Thor Falkanger er fimti sivilumboðsmaður, síðani hægstarættardómari Andreas Schei varð tilnevndur sum tann fyrsti umboðsmaðurin í desember 1962. Stórtingið hevur higartil tilnevnt umboðsmannin uttan at høvi hevur verið at søkja embætið. Tað hevur verið funnist at hesi skipan, tí onki gjøgnumskygni ella opinleiki hevur verið um valið. Í sambandi við seinasta val varð heitt á ávísar persónar um at søkja, samstundis sum Stórtingið tilskilaði sær rættin til at finna onnur valevni til embætið. Aage Thor Falkanger søkti ikki embætið, men formansskapurin í Stórtinginum heitti á hann um at átaka sær embætið. Alment hevur tað eisini verið funnist at hesi mannagongd.

### Ísland

Ísland fekk sín fyrsta umboðsmann í 1987. Ísland hevur bert havt tveir umboðsmenn. Formansskapurin í Altinginum ger uppskot til Altingið um val av umboðsmanni og kannar eftir, um valevnini eru valbær til embætið. Tað verður ikki lýst eftir umboðsmanni og tilmælið frá formansskapinum fer fram fyri afturlatnum hurðum. Umboðsmaðurin verður valdur fyri eitt fýra ára skeið. Umboðsmaðurin skal lúka somu treytir, sum krevjast fyri at kunna gerast dómari í Hægstarætti, og kann hann ikki vera limur í Altinginum. Inntil 2011 kundu allir tinglimir skjóta evni upp til valið sum umboðsmaður, uttan at tað frammanundan varð kannað, um hesi valevni vóru valbær til embætið. Núverandi umboðsmaðurin, Tryggvi Gunnarsson, hevur sitið í embætinum síðani 1. januar 2000, men frá 1. november 1998 og til 31. desember 1999 varð hann valdur fyribils fyri Gauk Jörundsson, sum varð

fyrst valdi umboðsmaður Íslands. Bæði tá Gaukur og Tryggvi Gunnarsson vórðu valdir, vóru onnur valevni í uppskoti, men hesi valevni fingu ikki nógvar atkvøður. Tá sitandi umboðsmaður varð afturvaldur í 2011, atkvøddu 41 fyri og 7 atkvøddu blankt. Tá hann varð afturvaldur í 2015 atkvøddu 43 fyri og 9 atkvøddu blankt.

## Grønland

Grønland fekk sín fyrsta umboðsmann í 1995. Umboðsmaðurin verður valdur eftir hvørt val til Inatsisartut. Núverandi umboðsmaðurin, Vera Leth, loysti í 1997 av fyrsta umboðsmannin Emil Abelsen. Hon varð seinast afturvald í desember 2015 og hevur nú sitið í 17 ár. Embætið sum umboðsmaður í Grønlandi verður ikki lýst alment. Rættarnevndin fyrireikar málið, og viðgerðin fer fram fyri afturlatnum hurðum. Tær seinastu ferðirnar er umboðsmaðurin spurdur, um hon tekur við afturvali, og hon er hvørja ferð einmælt vald. Tann grønlendska umboðsmannalógin hevur onga áseting um, hvussu nógv ár umboðsmaðurin kann sita, men ein meiriluti í Inatsisartut kann loysa hann úr embætinum, um Inatsisartut ikki longur hevur álit á umboðsmanninum.

# Viðgerð av avvístum klagum

**Jóhanna Arge,** ráðgevi (2016)

*„Myndin av hesum málum í hagtølunum kann tó vera heldur misvísandi, tí hóast umboðsmaðurin avvísir mál av formligum orsøkum ella ikki metir grundarlag vera fyri at gera meira við eina klagu, er hetta ikki altíð tað sama sum, at umboðsmaðurin ikki onkursvegna fær hjálpt klagaranum við málinum.“*

Umboðsmaðurin hevur, síðani hann byrjaði sítt virksemi, á hvørjum ári avvíst eini 75% av klagunum, og soleiðis var eisini í 2016.

Orsøkirnar til, at umboðsmaðurin ikki viðger eina klagu kunnu vera av formligum slag, so sum at klagan kemur ov seint, ella at ovasti myndugleiki á økinum ikki hevur tikið endaliga avgerð í málinum[1]. Flestu klagurnar eru tó avvístar ella ikki viðgjørdar, tí umboðsmaðurin ikki metir seg hava nakað grundarlag fyri at gera nakað við klaguna.

Myndin av hesum málum í hagtølunum kann tó vera heldur misvísandi, tí hóast umboðsmaðurin avvísir mál av formligum orsøkum ella ikki metir grundarlag vera fyri at gera meira við eina klagu, er hetta ikki altíð tað sama sum, at umboðsmaðurin ikki onkursvegna fær hjálpt klagaranum við málinum.

Handan grundgevingina um, at grundarlag ikki er fyri at gera meira við eina klagu, er nevniliga í fleiri førum talan um, at klagan í sjálvum sær er orsøk til, at málið verður loyst uttan eina umboðsmansviðgerð, ella at tað í minsta lagi kemur gongd á málið.

## Eingin viðgerð, men átti almannaveiting fyri fleiri mánaðir til góða

Eitt dømi um eina klagu, sum er skrásett sum avvíst, var frá eini kvinnu, sum greiddi frá, at hon fyri tveimum árum síðani, eftir at hava verið sjúkraskrivað við útgjaldi úr dagpeningaskipanini, hevði søkt Almannaverkið um fyritíðarpensjón, men at hon einki hevði frætt aftur. Kvinnan átti fleiri heimabúgvandi børn og hevði fleiri fastar útreiðslur, men hon hevði onga inntøku av nøkrum slag.

Umboðsmaðurin skrivaði til Almannaverkið og spurdi, hvussu leið við viðgerðini av umsóknini um fyritíðarpensjón. Tað vísti seg, at Almannaverkið meira enn eitt hálvt ár frammanundan hevði sýtt kvinnuni fyritíðarpensjón, tí arbeiðsførleikin var ikki varandi niðursettur við í minsta lagi eini helvt. Samstundis sum fyritíðarpensjónin varð sýtt, hevði Almannaverkið sett endurvenjing í verk við tí endamáli at finna út av, um kvinnan kundi fara í arbeiðsroynd.

Endurvenjing er ein fyriskipan eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, og kvinnan hevði tískil rætt til at fáa veiting eftir hesari lóg, meðan fyriskipanin stóð við og til endalig niðurstøða varð gjørd. Av einhvørjari orsøk hevði hon ikki móttikið hesa veiting. Hóast klagan vísti seg at vera grundarleys, tí Almannaverkið hevði tikið støðu til umsóknina um fyritíðarpensjón, vísti klagan, at kvinnan í fimm mánaðir av órøttum ikki hevði móttikið nakra veiting eftir lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Av tí, at Almannaverkið, tá endurbúgvingin endaði, fór at taka støðu til, um kvinnan kundi fara í arbeiðsroynd, ella um hon leyk treytirnar fyri fyritíðarpensjón, hevði umboðsmaðurin onga orsøk til at gera meira við klaguna.

## Fýra áminningar í fýra mánaðir

Eitt annað mál snúði seg um eina tannáringagentu, sum skrivaði til umboðsmannin um, at Barnaverndartænastan í kommununi ikki ønti henni aftur. Hon hevði spurt, um kommunan kundi gjalda fyri, at hon fór til sálarfrøðing. Tá gentan skrivaði til umboðsmannin, hevði hon sent kommununi 4 áminningar. Familjan hjá gentuni hevði undan hesum verið í støðugum sambandi við Barnaverndartænastuna.

Eftir at umboðsmaðurin vendi sær til kommununa við klaguni, játtaði Barnaverndartænastan beinanvegin sálarfrøðiliga hjálp til gentuna og beiggja hennara. Tá vóru fýra mánaðir gingnir, síðani gentan vendi sær til kommununa. Tað kom eisini í ljósmála, at tað um sama mundi hevði tikið kommununi 2 mánaðir at svara eini umsókn frá gentuni um at fáa matpakkar í skúlanum.

Umboðsmaðurin nýtti høvi at greiða Barnaverndartænastuni frá, at tað var sera umráðandi, at eitt barn, sum vendir sær til barnaverndartænastuna, tí tað tørvar hjálp, kann hava álit á, at barnaverndartænastan svarar skjótt og greitt. Umboðsmaðurin heitti eisini á Barnaverndartænastuna um at skipa eina nøktandi avloysaraskipan, soleiðis at mál ikki duttu niður ímillum, tá einstaki málsviðgerin var upptikin av øðrum átrokandi máli.

1 *Sí grein í ársfrágreiðingini 2013, bls. 41ff: „Grundgevingar fyri at avvísa klagur“.*

Tá gentan beinanvegin, eftir at umboðsmaðurin vendi sær til kommununa við klaguni, fekk svar uppá umbøn sína um hjálp, hevði umboðsmaðurin onga orsøk til at gera meira við málið.

## Hvør tekur sær av teimum yngru dementu

Systir eina heilaskadda kvinnu um fimmti ára aldur vendi sær til umboðsmannin, tí eingin myndugleiki tyktist hava ábyrgd av at veita óhjálpnu systrini hjálp. At byrja við hevði kvinnan onga ávísa diagnosu, men seinni varð staðfest, at hon hevði „frontal demens".

Kommunan metti í fyrsta umfari ikki, at kvinnuni tørvaði røkt, men stuðul, og at tað tí var ábyrgdin hjá Almannaverkinum at veita kvinnuni hjálp. Almannaverkið og kommunan vóru í støðugum samskifti um málið, og eftir at kvinnan hevði verið innløgd á Psykiatriska deplinum stóð greitt, at annaðhvørt Almannaverkið ella kommunan mátti veita kvinnuni eitt búpláss.

Almannaverkið ætlaði at sýta umsóknini hjá kvinnuni um búpláss, tí Almannaverkið metti kommununa hava rætta tilboðið til kvinnuna. Kommunan hinvegin metti seg ikki hava hesa ábyrgd og vísti til, at talan var um kvinnu undir 67 ár. Hóast hetta veitti kommunan kvinnuni eitt bráðfeingis pláss á einum heimi í kommununi. Seinni fekk kvinnan varandi pláss á einum øðrum heimi í kommununi.

Eftir at systurin hevði vent sær til umboðsmannin um málið, varð sokallaða Markamótsskjalið undirskrivað, og seinni varð Markamótsnevndin, sum tekur støðu til, hvørjar meginreglur eru galdandi í ábyrgdarbýtinum millum eldrarøkt og forsorg, sett. Hóast kommunan hevði veitt kvinnuni varandi búpláss, tók kommunan stig til at leggja umrødda málið fyri nevndina. Nevndin tók tíðliga í ár avgerð um, at kommunur eiga at veita tilboð um búpláss á røktarheimi ella eldrasambýli til borgarar undir 67 ár, ið eru raktir av Alzheimers demens.

Av tí, at gongd var í málinum alla tíðina, viðgjørdi umboðsmaðurin sum so ikki málið, men gjørdi av at fylgja við málinum og fekk regluliga kunning frá myndugleikunum um, hvønn veg málið bar. Um so var, at eingin loysn fekst á málinum hjá dementu kvinnuni, hevði umboðsmaðurin tikið málið upp til viðgerðar, men av tí, at ein loysn varð funnin, og kvinnan fekk eitt varandi búpláss, hevði umboðsmaðurin onga orsøk at gera meira við málið.

## Hagtøl

Í hagtølunum eru hesi trý umrøddu málini skrásett at vera avvíst av umboðsmanninum, tó at umboðsmaðurin onkursvegna hevur hjálpt klagarunum. Onnur dømi frá undanfarna ári eru, at umboðsmaðurin hevur sent rætta myndugleikanum málið at viðgera, at gongd er komin á viðgerðina av einum máli, tá umboðsmaðurin hevur sent eina klagu um drúgva viðgerðartíð til ummælis hjá myndugleikanum, og at ein myndugleiki, eftir at vera kunnaður um eina klagu, hevur boðað frá, at hann frameftir fer at broyta mannagongdir. Í øðrum førum hevur umboðsmaðurin vegleitt klagarum um aðrar møguleikar at loysa mál.

Fyri eisini í hagtølunum at geva eina rættari mynd av virkseminum hjá umboðsmanninum, fer umboðsmaðurin frameftir at broyta hagtalsskrásetingina, soleiðis at eisini viðgerðin í teimum málum, sum ikki fáa eina gjølliga umboðsmansviðgerð ella enda við einum áliti, sæst aftur.

# 1-ára klagufreistin í umboðsmanslógini

**Jóhanna Arge,** ráðgevi (2018)

*„Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi seinasta lagi eitt ár eftir,at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.“ (§ 6, stk. 2., 2. pkt. í umboðsmanslógini)*

4. februar 2019, kl. 17.10, móttók umboðsmaðurin eitt teldubræv við eini klagu um eina fyrisitingarliga avgerð, sum ein almennur myndugleiki hevði tikið. Avgerðin gekk ikki klagaranum á møti, og hann ynskti at fáa umboðsmansins meting av viðgerðini. Avgerðin var tikin eitt ár framman undan, tann 4. februar 2018, og klagarin hevði móttikið avgerðina við teldubrævi sama dag.

Í § 6, stk. 2, 2. pkt. í umboðsmanslógini stendur, at klagur skulu vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað. Viðkomandi spurningarnar at viðgera vóru tí, um klagan var komin til umboðsmannin innan fyri 1 ára freistina, og um nakað krav var um, at klagan skuldi vera móttikin í vanligari skrivstovutíð.

Eftir vanligum fyrisitingarligum meginreglum rennur kærufreistin frá tí, at viðkomandi móttekur eina avgerð í málinum. Sendir myndugleikin avgerðina við postinum, verður avgerðin í flestu førum móttikin nakrar dagar eftir, at avgerðin er dagfest og send. Er freistin t.d. 8 dagar, og avgerðin er móttikin ein týsdag, rennur freistin frá mikudegi, og freistin at kæra er mikudagin vikuna eftir. Er freistin at kæra ein leygardag ella halgidag, verður freistin vanliga longd til fyrsta arbeiðsdagin eftir hetta. Viðurkent er, at kærumyndugleiki í serligum førum kann víkja frá kærufreistini, um kærari kann vísa á umberandi umstøður fyri, at ein avgerð ikki er kærd innan freistina.

Í serligu viðmerkingunum til ásetingina í umboðsmanslógini um klagufreistina stendur, at klagufreistin er ófrávíkilig. Hetta merkir, at umboðsmaðurin kann ikki gera undantak frá freistini og viðgera eina klagu, um so er, at klagan kemur aftaná, at freistin er farin. Óansæð hvør orsøkin er til, at klagan kemur ov seint.

Tað er eisini útgreinað í viðmerkingunum, at freistin skal roknast frá tí degi, avgerðin er tikin. Hetta uttan mun til nær tann, ið klagar, fær fráboðan um ella gerst varug við avgerðina ella tey viðurskifti, sum klagað verður um. Hetta kemst av, at ein og hvør, og ikki bara parturin í einum máli, kann klaga til umboðsmannin. Tað kann vera tilvildarligt, nær klagarin, um hann t.d. ikki er partur í einum máli, fær kunnleika til tey viðurskifti, sum ætlanin er at klaga um, og tí er ásett, at freistin er í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

Í ítøkiliga málinum tók myndugleikin avgerðina 4. februar 2018 og fráboðaði klagaranum hana sama dag. Tí fór 1 ára freistin í umboðsmanslógini ársdagin fyri dagfestingina av avgerðini, tað vil siga 4. februar 2019. Klagan var sostatt umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at avgerðin var tikin.

Men klagan var móttikin hjá umboðsmanninum eftir vanliga arbeiðstíð, kl. 17.10, og spurningurin var tískil, um klagan skuldi vera móttikin innan ávísa tíð á degnum fyri at vera rættstundis. Í vegleiðing til fyrisitingarløggávu um, hvussu kærufreistir skulu roknast, stendur, at kærur skulu latast kærumyndugleikanum í seinasta lagi, áðrenn skrivstovan hjá kærumyndugleikanum letur aftur. Hetta er vanliga seinnapartar kl. 16.

Í tveimum dómum hava Vestari Landsrættur og Hægstirættur í ávikavist U1992.15V og U2000.2461H viðgjørt, hvussu ásetingar um kærufreistir í rættargangslógini skulu skiljast. Í báðum førum var niðurstøðan, at fyri at halda freistina at skjóta ein dóm inn fyri hægri rætt, skal kæran í fullum líki vera móttikin í seinasta lagi freistdagin kl. 16 seinnapartin.

Ítøkiliga klagan varð send umboðsmanninum kl. 17.10, og hetta var eftir vanliga skrivstovutíð hjá umboðsmanninum. Sambært omanfyri standandi var klagan sostatt ein góðan tíma frá at vera rættstundis. Nevnda vegleiðing og dómar taka støði í, at myndugleikar og borgarar samskifta við brævaskifti, sum verður sent við vanligum posti ella t.d. telefax, men tulkingargrundarlagið broytist við menningini av møguleikunum at samskifta talgilt.

Higartil hevur snúningspunktið í útrokning av kærufreistum verið, nær avgerðin kundi roknast at vera komin fram, og í framhaldi av hesum nær freistin rennur frá. Hesum slepst undan, tá avgerðir verða sendar við teldu-posti, tí tá kann staðfestast uppá minuttin, nær avgerðin er komin fram og er tøk hjá borgaranum.

Vestari Landsrættur hevur í U2016.382V tikið støðu til, um kært varð í rættari tíð, eftir at latið varð upp fyri at samskifta við rættin við m.ø. telduposti. Landsrætturin vísti á, at sambært rættargangslógini var ein teldupostur

mettur at vera komin fram, tá hann var tøkur hjá rættinum. Sambært serligu viðmerkingunum til viðkomandi ásetingina skuldi hetta skiljast sum, at rætturin var førur fyri at viðgera ella lesa teldupostin. Tað var hinvegin ikki ein treyt, at telduposturin var móttikin í arbeiðstíð. Um ein kæra var send rættinum við telduposti kl. 23.59 á seinasta freistdegi, var kæran komin fram til røttu tíð. Hetta galt eisini, um telduposturin varð sendur í vikuskiftinum ella halgidagar.

Á heimasíðuni hjá Løgtingsins umboðsmanni eru upplýsingar um teldupostbústaðin hjá stovninum, og einki er til hindurs fyri, at klagari vendir sær til umboðsmannin við telduposti. Eingi serlig formkrøv eru til klagur til umboðsmannin, annað enn at klagarin nevnir seg við navni, og umboðsmaðurin setir ikki krøv um serligar samskiftishættir. Vísandi til hetta varð klagan – hóast móttikin ársdagin eftir vanliga arbeiðstíð - mett at vera móttikin, áðrenn 1 ára freistin fór. Klagan varð síðani send klagaða myndugleikanum til ummælis.

Hóast 1 ára klagufreistin er farin, og umboðsmaðurin ikki kann víkja frá klagufreistini, kann umboðsmaðurin, um hann heldur málið vera av serligum týdningi at viðgera, gera av at taka eitt mál upp av egnum ávum. Hetta hevur umboðsmaðurin tó bert gjørt í einstøkum førum.



*Partur 2.*

# Fyrisitingarrættur

# At betra um lógir og fyriskipanir

**Gurið Joensen,** ráðgevi (2016)

> *„§ 12. Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.“*

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar í einum klagumáli, ger hann niðurstøðu og boðar klagara og viðkomandi myndugleika frá niðurstøðuni. Metir umboðsmaðurin, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av umsitingini, skal hann sambært § 10 í umboðsmanslógini boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum.

Um umboðsmaðurin í samband við klagumál, kanningar ella mál, sum eru tikin upp av egnum ávum, metir, at manglar ella ógreiðleikar eru í galdandi lógum ella fyriskipanum ella í umsitingini av hesum lógum, skal umboðsmaðurin sambært grein 12 í umboðsmanslógini boða viðkomandi landsstýrismanni og Løgtinginum frá hesum, og viðkomandi kommunustýri, um talan er um kommunal ella interkommunal viðurskifti.

Endamálið við hesi eftirlitsuppgávu hjá umboðsmanninum er, at umboðsmaðurin skal kunna vísa á viðurskifti í lógum ella fyriskipanum, sum út frá einum rættartrygdarsjónarmiði eru ivasom. Umboðsmaðurin kann vísa á lógartekniskar og umsitingarligar manglar so sum tekstur, sum er ógreiður, og ásetingar, sum eru í mótsøgn ella í ósamsvari við aðrar ásetingar. Umboðsmaðurin kann somuleiðis vísa á, at tørvur er á at betra um ella gera málsviðgerðina og mannagongdirnar einfaldari á einum lógarøki. Í hesi eftirlitsuppgávu liggur tó ikki, at umboðsmaðurin skal gera politiskt merktar metingar av viðtiknum lógum og fyriskipanum.

Niðanfyri eru nøkur dømi um, nær umboðsmaðurin hevur mett, at talan var um ógreiðu ella um lýti í eini lóg ella fyriskipan, og at avvarðandi landsstýrismaður hevur framt tær ábøtur, sum mælt varð til.

## Eftirlønarlógin og kunngerðin um undantak frá eftirlønarlógini (LUM 15/00119)

Klagan snúði seg um ein borgara, sum búði í Føroyum, men arbeiddi í Noregi fyri danskan arbeiðsgevara. Í samband við starvið hevði hann eftirlønaravtalu í PFA og rindaði eisini lógarásett gjald til Folketrygd í Noregi. Taks vildi ikki játta honum frítøku fyri at rinda eftirløn sambært Eftirlønarlógini, og Fíggjarmálaráðið staðfesti avgerðina hjá Taks. Í mun til PFA-eftirlønaravtaluna vísti umboðsmaðurin til avgerð frá Skatta- og avgjaldskærunevndini (16/00017), sum staðfesti, at kunngerðin, sum ásetir treytirnar um frítøku fyri løntakarar, sum arbeiða uttanlands hjá útlendskum arbeiðsgevara, fer út um sítt heimildarmark, tí hon setir strangari krøv enn Eftirlønarlógin heimilar. Fíggjarmálaráðið varð tí biðið um at endurskoða kunngerðina. Eisini heitti umboðsmaðurin á Taks um at taka málið hjá klagaranum til nýggja viðgerð.

Í februar 2017 kunnaði Fíggjarmálaráðið umboðsmannin um, at Ráðið hevði gjørt uppskot til broyting í omanfyri nevndu kunngerð, so átalaðu viðurskiftini verða broytt. Tann 28. mars 2017 vórðu broytingarnar í kunngerðini lýstar.

## Barnaverndarlógin (LUM 15/00067)

Málið snúði seg um viðgerðina hjá eini barnaverndartænastu av einum máli, har kvinna, sum var við barn, hevði gjørt avtalu við eini hjún, sum búðu uttanlands, um, at tey skuldu fáa barn hennara við føðing og seinni ættleiða barnið. Barnaverndartænastan metti, at talan var ikki um eitt barnaverndarmál og lokaði málið uttan at hava vissað sær, at barnið livdi undir góðum og skipaðum viðurskiftum á góðkendum staði, og at onkur var, sum lógliga kundi taka umsorganarligar avgerðir vegna barnið. Umboðsmaðurin metti, at tað var eitt lýti í Barnaverndarlógini, at ongar ásetingar vóru um privata døgnrøkt og kunnaði Løgtingið og heitti á landsstýriskvinnuna í almannamálum um at umhugsa broyting í lógini.

Landsstýriskvinnan tók tilmælið frá umboðsmanninum til sín og legði í mars 2017 fram lógaruppskot til at bøta um hesi viðurskifti.

## Musikkskúlalógin (LUM 15/00094)

Í samband við klagumál um starvssetanir í einum musikkskúla vísti umboðsmaðurin á, at Musikkskúlalógin ikki var dagførd samsvarandi teimum broytingunum, ið eru í mun til umsitingina av økinum, og at ásetingar, sum eftir

nútíðar lóggávumannagongdum høvdu verðið framdar við kunngerð, eru ásettar í rundskrivi. Umboðsmaðurin gjørdi eisini vart við, at Landsgrannskoðanin í fleiri ár hevði víst á, at tørvur var á at fáa lógarverkið um musikkskúlar dagført. Umboðsmaðurin mælti tí Mentamálaráðnum til at dagføra regluverkið fyri musikkskúlar.

Landsstýriskvinnan í mentamálum legði í mars 2017 fram uppskot til nýggja lóg um musikkskúlaskipan.

## ALS-lógin (LUM 15/00121)

Klagan snúði seg um eina avgerð frá Kærunevndini hjá ALS, har kærunevndin hevði staðfest, at hjúnafelagaeftirløn hjá klagaranum, skuldi dragast frá í arbeiðsloysisstuðlinum hjá klagaranum sbr. § 16 stk. 2 í ALS-lógini. Umboðsmaðurin vísti á, at slíkur frádráttur ikki var í samsvari við ásetingar í ALS-lógini og endamálið við eini hjúnafelagaeftirløn. Umboðsmaðurin mælti Kærunevndini til at taka málið uppaftur til viðgerðar og heitti á Samferðslumálaráðið um at nágreina § 16, stk. 2 í ALS-lógini.

Klagarin fekk eftir hetta nýggja avgerð frá ALS.

Við løgtingslóg nr. 129 frá 20. desember 2016 varð § 16 stk. 2 í ALS-lógini broytt, soleiðis at tað nú er gjørt greitt, at tað bert eru egnar tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, sum skulu dragast frá í arbeiðsloysistuðlinum, og ikki eftirløn frá hjúnafelaga.

## ALS-lógin (LUM 200600079)

Málið snúði seg um, at ALS hevði steðgað útgjald av arbeiðsloysistuðli hjá einum borgara, tí ALS metti, at borgarin ikki var tøkur á arbeiðsmarknaðinum. Kærunevndin hjá ALS hevði staðfest avgerðina. Umboðsmaðurin metti, at avgerðin var skeiv og mælti tí nevndini til at taka kæruna upp til nýggja viðgerð.

Kærunevndin metti, at tað var ikki grundarlag fyri at taka kærumálið upp til nýggja viðgerð. Eftir hetta viðmælti umboðsmaðurin klagaranum fría rættarførslu. Dómur varð sagdur 16. november 2006. Rætturin kom til, at avgerðin um, at borgarin ikki var tøkur á arbeiðsmarknaðin, varð ógildig vegna týðandi manglar, og at tað tí ikki var rætt at steðga útgjaldinum av arbeiðsloysistuðlinum.

Umboðsmaðurin metti eisini, at ALS-stýrið hevði ikki heimild til at áseta nærri reglur í kunngerð viðvíkjandi treytunum í § 14, stk. 1 í ALS-lógini, sum snýr seg um at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum. Harumframt metti hann tað vera ein álvarsligan vanda fyri rættartrygdina hjá borgarunum at áseta rættarreglur um kanska víðfevnd inntriv í støðuna hjá teimum, uttan at hesar reglur verða kunngjørdar í almenna kunngerðarblaðnum. Umboðsmaðurin sendi fráboðan til Vinnumálaráðið um málið og vísti til líknandi mál, har hann í februar 2006 kunnaði Løgtingið og mælti landsstýrismanninum til at umhugsa at broyta mannagongdina hjá ALS soleiðis, at í øllum førum kunngerðir av stórum týdningi fyri borgararnar, verða lýstar í kunngerðarblaðnum, og til at fáa samsvar ímillum kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli og ALS-lógina.

Eftir at Vinnumálaráðið, ALS og Stýrið fyri ALS høvdu samskift í drúgva tíð um hesi viðurskifti vóru broytingar gjørdar í ALS-lógini í mai 2009. Heimild varð sett í ALS-lógina til áseting av nærri reglum um, nær ein persónur er arbeiðsleysur, tøkur, arbeiðsførur o.l. Samstundis fekk landsstýrismaðurin kunngerðarheimildirnar, sum eru í ALS-lógini, men treytað av, at Stýrið fyri ALS tekur undir við ásetingunum. Hetta loysti eisini trupulleikan í mun til, hvussu kunngerðir frá ALS verða lýstar. Tá landsstýrismaðurin hevur heimildina, verða kunngerðirnar lýstar í Kunngerðarblaðnum.

## Kringvarpslógin (LUM 200100022 og 200200017)

Í tveimum málum, sum snúðu seg um klagu mótvegis Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya, vísti umboðsmaðurin á, at sambært § 6, stk. 2 og § 18, stk. 2, í kringvarpslógini kunnu avgerðir, sum ávikavist ÚF og SVF taka um góðan fjølmiðlasið, kærast til Fjølmiðlanevndina sambært fjølmiðlaábyrgdarlógini, men at enn var eingin fjølmiðlaábyrgdarlóg sett í gildi fyri Føroyar. Umboðsmaðurin metti tað vera sera óheppið, at tað ikki var nakar sakkønur kærustovnur, sum kundi viðgera kærur frá persónum, sum eru ónøgdir við t.d. tíðindaflutningin hjá almennu fjølmiðlunum. Umboðsmaðurin mælti Løgtinginum, løgmanni og avvarðandi landsstýrismanni til at fáa skil á hesum viðurskiftum, soleiðis at persónar, sum halda seg vera órættvíst viðfarnar í fjølmiðlunum, ella sum í aðrar mátar eru ónøgdir við ÚF og SVF, fáa møguleika fyri at fáa viðgjørt kærur á tryggan hátt, og soleiðis at samsvar verður millum lóggávuna og veruleikan.

Landsstýrismaðurin boðaði í august 2002 frá, at tað í langa tíð hevði verið arbeitt við lóggávu um fjølmiðlaábyrgd, og at væntandi fingust viðurskiftini í rættlag í samband við, at fjølmiðlaábyrgd varð yvirtikið sum føroyskt málsøki. Í samband við yvirtøkuna varð Fjølmiðlaábyrgdarlógin sett í gildi 1. juli 2006.

# At halda seg kenna (upplýsingarskyldan)

**Birta Biskopstø,** ráðgevi (2013)

*„Umboðsmaðurin helt tað vera ein álvarsaman feil í viðgerðini hjá setanarnevndini, at hon ikki útvegaði sær upplýsingar um starvið frá Løgmansskrivstovuni, sum hevði neyðuga kunnleikan og innliti í, hvørjar uppgávur liggja í starvinum, og hvørjar treytir tann, sum verður settur í starvið, skal lúka. ... Tað var somuleiðis ein álvarsamur feilur, at setanarnevndin ikki útvegaði sær eitt ummæli av klagaranum frá løgmansstjóranum, sum var tann einasti, sum hevði neyðugu vitanina um og kundi úttala seg um, hvussu klagarin hevði roynst í starvinum.“*
*(brot úr áliti frá umboðsmanninum j. nr.200900001)*

## Ábyrgdin liggur hjá myndugleikanum

Almennir myndugleikar taka dagliga nógvar avgerðir um viðurskifti, sum á ymiskan hátt ávirka borgaran. Sambært fyrisitingarrættinum hava myndugleikarnir skyldu at kanna og upplýsa eitt mál til fulnar, áðrenn ein fyrisitingarlig avgerð verður tikin. Upplýsingarskyldan er ein sokallað garantiregla, sum skal tryggja, at myndugleikin tekur avgerð á røttum og lógligum grundarlagi. Reglurnar um partshoyring í fyrisitingarlógini eru eins og upplýsingarskyldan ein sokallað garantiregla, ið skal tryggja, at avgerðir verða tiknar á einum nøktandi og fullgóðum grundarlagi.

## Innsavning av upplýsingum

Upplýsingarskyldan er áløgd myndugleikum, sum í sambandi við, at fyrisitingarligar avgerðir skulu takast, hava eina skyldu at tryggja, at eitt mál er upplýst til fulnar, bæði í mun til lóggávuna og tey faktisku viðurskiftini og umstøðurnar annars í málinum.

Summi mál byrja við, at myndugleikin tekur tey upp. Dømi um hetta kunnu vera starvsfólkamál, her undir starvssetan, viðgerð av málum viðvíkjandi starvsfólkum, meðan tey eru í starvi, og uppsagnarmál.

Onnur mál kunnu byrja við eini umsókn. Tá er tað í útgangsstøðinum umsøkjarin sjálvur, sum hevur skyldu til at upplýsa málið. Ivast myndugleikin um upplýsingarnar í málinum eru rættar, ella metir myndugleikin, at upplýsingar ikki eru fullfíggjaðir, skal myndugleikin eftirkanna hetta og sjálvur útvega sær neyðugar upplýsingar fyri at lýsa málið til fulnar.

Eitt grundleggjandi krav er, at tá talan er um innsavnan av upplýsingum, skal talan vera um neyðugar, viðkomandi ella týðandi upplýsingar fyri viðgerðina av málinum. Hetta ger seg serliga galdandi, tá talan er um at útvega sær trúnaðar- ella persónsupplýsingar.

Hættirnir at innsavna upplýsingar kunnu vera ymiskir, alt eftir hvat slag av upplýsingum talan er um og frá hvørjum, tað verið seg myndugleika, virkjum, borgarum og øðrum.

## Gjøgnum eygleiðing

Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 201100095 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um viðgerðina hjá TAKS av einari umsókn um rentustuðul. Sambært upplýsingunum, sum vóru í málinum, búði klagarin í einari aðrari kommunu, enn arbeiðsstaðið var. Av tí at klagarin búði í barndómsheiminum mitt í viku, metti TAKS, at bústaður hansara í tí kommunu, hann var skrásettur at búgva í, bert var ein frítíðarbústaður, sum ikki gav honum rætt til rentustuðul. Metingin hjá TAKS um veruliga bústaðin hjá klagaranum var grundað á upplýsingar, sum myndugleikin hevði fingið til vega gjøgnum millum annað eygleiðingar og frá nærumhvørvinum.

Millum annað setti TAKS seg í samband við borgarstjóran á tí staðnum, har barndómsheimið hjá klagaranum var, fyri at innheinta upplýsingar um bústaðarviðurskiftini. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja, at hetta skuldi verið neyðugt, tí TAKS hevur beinleiðis atgongd til fólkayvirlitsskránna hjá kommunum, eins og umboðsmaðurin metti, at ein tílík áheitan til borgarstjóran kundi geva ta fatan, at TAKS hevði biðið borgarstjóran sum privatpersón úttala seg um bústaðarviðurskiftini hjá klagaranum.

Umboðsmaðurin vísti í álitinum á, at tá ið ein myndugleiki hevur eina serliga vitan um ein borgara frá nærumhvørvinum, kann hetta vera eitt av fleiri atlitum, ið dentur kann verða lagdur á, tá mál skulu lýsast. Tað hevur tó avgerandi týdning, at myndugleikin virðir tær ásetingar, ið eru í fyrisitingarrættinum, tá slíkar upplýsingar skulu savnast og vektast. Umframt sakligheit, áliggur tað myndugleikanum ein serlig skylda at fara varisliga fram, tá talan er um at savna upplýsingar um borgarar gjøgnum eygleiðing, serliga tá ið talan er um smápláss, har øll - borgari og myndugleikar - „halda seg kenna“ faktiskar umstøður hjá hvørjum øðrum.

Hóast TAKS í hesum máli hevði upplýsingar, sum kunnu metast at hava stóran týdning fyri avgerðina, og sum ikki vóru til fyrimuns fyri klagaran, gav myndugleikin ikki klagaranum høvi til at koma við sínum viðmerkingum, áðrenn TAKS tók avgerð í málinum um rentustuðul.

## Munnlig innheintan av upplýsingum og notatskylda

Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200400069 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um setan av leiðara fyri Frítíðarskúlan á Tvøroyri. Tvinnar umsóknir vóru til avloysarastarvið í Frítíðarskúlanum á Tvøroyri. Annar umsøkjarin var útbúgvin lærari og hin umsøkjarin var útbúgvin námsfrøðingur. Hóast bert annar umsøkjarin kundi koma upp á tal til starvið, tí hon var útbúgvin námsfrøðingur við arbeiðsroyndum og hevði eitt gott viðmæli frá leiðaranum á stovninum, tók kommunan eftir tilmæli frá sosialu nevnd avgerð um at seta læraran í starvið. Einki er sagt um orsøkina til hetta, hvørki í tilmælinum frá sosialu nevnd ella í gerðabókini hjá kommununi fyri hendan fundin. Einki skjalatilfar var í málinum, sum lýsir, hvørja viðgerð umsóknirnar hava fingið.

Í einum notati frá formanninum og næstformanninum í sosialu nevnd, sum varð skrivað stívliga 5 vikur aftaná, at setanin varð framd, verður greitt frá, at avgerð teirra var grundað á, hvussu námsfrøðingurin skal hava uppført seg á einum fundi í barnagarðinum, har hon luttók sum foreldur. Umboðsmaðurin staðfesti í álitinum, at eingin dokumentatión var fyri hesum uppáhaldum, sum heldur ikki eru nærri útgreinað. Víðari verður sagt í hesum notati, at leiðarar á øðrum kommunalum stovnum eisini eru spurdir til ráðs, og at hesir í flestu førum ikki hava hildið pedagogin vera egnaðan til leiðarastarvið.

Umboðsmaðurin vísti í álitið fyri tað fyrsta á, at kommunan hevði skyldu til, tá møgulig ummæli vóru fingin til vega frá øðrum stovnsleiðarum, at gera notat frá hesum samrøðum. Eingi slík notat vóru í málinum, hvørki viðvíkjandi hvønn tosað hevði verið við, ella hvat hesi møguliga høvdu sagt.

Fyri tað næsta hevði kommunan skyldu til at kunna námsfrøðingin um møgulig ummæli, sum ikki vóru til fyrimuns fyri hana, og at geva henni høvi til at koma við einum ummæli av hesum, áðrenn avgerð varð tikin í málinum. Hetta var als ikki gjørt - hvørki viðvíkjandi teimum útsøgnum, sum teir báðir limirnir í sosialu nevnd søgdu seg hava fingið frá øðrum stovnsleiðarum ella tí, sum skal vera hent á umrødda fundinum í barnagarðinum.

## Ikki allar upplýsingar skulu noterast

Hóast tað er ein meginregla, at myndugleikin hevur skyldu til at notera allar upplýsingar, sum hesin munnliga ella á annan hátt tekur ímóti viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málum, eru tað tó ikki allar upplýsingar, ið skulu noterast í mál. Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200500069 varð niðurstøða gjørd viðvíkjandi klagu um viðgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini av setan av starvsfólki. Í einum telefonnotati hevði Arbeiðsloysisskipanin noterað, at klagarin sambært upplýsingunum frá Toll- og Skattstovu Føroya skal vera ein „Ebeneser-maður burturav". Umboðsmaðurin dugir ikki at síggja, at trúarviðurskifti skulu hava nakran týdning yvirhøvur fyri eitt starv sum málsviðgeri hjá Arbeiðsloysisskipanini. Hendan upplýsing kann tí einans vera við til at ávirka avgerðina á ósakligan hátt, og átti tí ikki at verið noterað. Av tí, at ongar ábendingar vóru um, at hetta hevði ávirkað avgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini, gjørdi umboðsmaðurin kortini ikki meira við hendan spurning.

## At síggja burtur frá upplýsingum

Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200900001 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um handfaringina av setanini av einum deildarstjórastarvi á Løgmansskrivstovuni. Undir viðgerðini av málinum valdi setanarnevndin at síggja burtur frá skjølunum í málinum hjá Løgmansskrivstovuni, og tá setanarprofilur skuldi gerast, vendi nevndin sær til ein fyrrverandi leiðara í lýsta starvinum. Uttanríkisráðið hevur greitt frá, at orsøkin til, at sæð varð burtur frá skjølunum hjá Løgmansskrivstovuni var, at starvsfólkini á Løgmansskrivstovuni vóru ógegnig at viðgera málið. Í starvslýsingini varð sagt, at tað var ein fyrimunur, at umsøkjari hevði arbeiðsroyndir innan tær uppgávur og øki, sum lógu í starvinum. Hóast hetta kannaði setanarnevndin ikki, hvørjar royndir Løgmansskrivstovan hevði av viðkomandi, sum tá hevði røkt starvið í stívliga eitt ár. Umboðsmaðurin metti, at eingin ivi kundi vera um, at luttøkan hjá løgmansstjóranum eisini í hesum føri er av stórum týdningi fyri at upplýsa málið. Løgmansstjórin var sum stjóri hjá viðkomandi tann einasta, sum hevði neyðugu vitanina um og kundi úttala seg um, hvussu hon hevði roynst í starvinum. Umboðsmaðurin metti tað vera ein álvarsaman feil, at eitt slíkt ummæli ikki var útvegað.

## Samanumtikið

Í einum lítlum samfelag sum okkara, har tey flestu halda seg kenna hvønn annan, skal upplýsingarskyldan hjá myndugleikum eins og partshoyringsreglurnar vera fremst í huganum hjá myndugleikapersónum, sum taka avgerðir. Týdningarmikið er, at upplýsingar verða innsavnaðar á lógligan hátt, eins og einans neyðugar, viðkomandi ella týðandi upplýsingar verða innsavnaðar.

Saman við upplýsingarskylduni er eisini skyldan hjá myndugleikanum at at kunna borgarin um møguligar upplýsingar, her undir eisini ummæli, sum ikki eru til fyrimuns fyri hann, og at geva honum høvi til at koma við einum ummæli til hesar upplýsingar, áðrenn avgerð varð tikin í málinum.

# At skriva ella ikki

**Jóhanna Arge,** ráðgevi (2015)

*„Eg meti [..], at sambært góðum fyrisitingarsiði átti Landssjúkrahúsið at givið umsøkjara skrivliga grundaða avgerð í teimum førum, har umsókn um fylgjara til sjúkraviðgerð ikki verður gingin á møti.“ LUM 14/00007*

Dagliga verða sjúklingar á teimum trimum sjúkrahúsunum sendir til kanningar og viðgerðar uttanlands. Á leið 1400 sjúklingar vórðu í 2013 kannaðir og viðgjørdir uttan fyri Føroyar. Fleiri enn helmingurin av hesum vórðu kannaðir ella viðgjørdir uttanlands meira enn bert ta einu ferðina.

Um ein sjúklingur vegna lívshóttandi sjúku ella vegna likamligt, sálarligt ella sosialt ófullføri ikki kann ferðast ella uppihalda sær uttanlands einsamallur, kann sjúkrahúsið rinda ferðina og ein part av útreiðslunum fyri uppihald hjá fylgjaranum. Ein meting hjá Heilsumálaráðnum er, at annarhvør sjúklingur fær játtað ein fylgjara á ferðini.

Fyrisitingarnar á sjúkrahúsunum gera í hvørjum einstøkum føri av, um sjúklingurin er førur fyri at ferðast ella uppihalda sær einsamallur uttanlands. Avgerðin verður fráboðað sjúklinginum munnliga. Um biðið verður um tað, hevur sjúklingurin rætt til at fáa eina skrivliga grundaða avgerð.

Fleiri lógarásett krøv eru til avgerðir, sum myndugleikar taka. Tað er tó ikki eitt lógarkrav, at ein avgerð skal vera skrivlig. Ein avgerð kann fráboðast munnliga, og hon er bindandi á sama hátt sum ein skrivlig. Tað er heldur ikki eitt krav, at grundgivið skal vera fyri eini munnligari avgerð.

Umboðsmaðurin hevur tó ta fatan, at ein sjúklingur, sum fær noktandi svar um at hava ein fylgjara við sær til viðgerð uttanlands, eigur at fáa avgerðina fráboðaða skrivliga saman við eini grundgeving, sí LUM 14/00007.

Umboðsmaðurin heldur, at avgerðin er ein byrða hjá móttakaranum, tí hesin er í einari viðkvæmari støðu vegna sjúku. Tí eiga sjúkrahúsini, sambært góðum fyrisitingarsiði, at geva sjúklingunum eina skrivliga grundaða avgerð, tá sjúkrahúsini sýta fyri at játta ein fylgjara.

Meginparturin av avgerðunum, sum almennir myndugleikar taka millum ár og dag, verða fráboðaðar skrivliga. Viðurkent er, at ein avgerð kann fráboðast munnliga, um tað ikki er ráðiligt at bíða við avgerðini, ella um tørvur er á, at skjótt verður borið at. Sambært góðum fyrisitingarsiði eiga munnligu avgerðirnar at verða fylgdar upp við eini skrivligari avgerð. Tyngjandi avgerðir eiga at vera skrivligar.

Landssjúkrahúsið heldur fast við at boða sjúklingum frá avgerðum munnliga. Heilsumálaráðið heldur, at hetta er í lagi. Tað heldur Heilsumálaráðið, tí tað er ov orkukrevjandi hjá teimum trimum sjúkrahúsunum at skula skriva noktandi avgerðirnar, sum í 2013 vórðu mettar at vera omanfyri eitt túsund í tali.

## Notatskyldan

Hóast ein avgerð verður fráboðað munnliga, hevur myndugleikin skyldu til, sambært innlitslógini, at skriva upp allar tær upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðina í einum máli. Umboðsmaðurin vísti í fyrrnevnda máli á, at tað er ikki bert góður fyrisitingarsiður, men eisini ein sjálvfylgja, at eitt notat verður gjørt um ein so avgerandi spurning sum tað, at ein avgerð er tikin í einum máli.

Hetta, at sjúkrahúsini í hvørjum einstøkum máli hava skyldu til at skriva upp orsøkina til, at tey sýta eini umbøn um fylgjara, máar undan grundgevingini um, at fyrisitingarnar ikki orka at fráboða avgerðirnar skrivliga. Aftrat hesum er tað í dag fyri flestu fyrisitingar lætt at geva skrivlig boð.

## Skrivlig kæra av munnligari avgerð

Lógin krevur sum nevnt ikki, at myndugleikin skal fráboða eina avgerð skrivliga. Lógin krevur harafturímóti, at sjúklingurin skrivliga setir orð á sína kæru, tí sum meginregla kann ikki kærast munnliga. Sjúklingurin skal eisini grundgeva fyri, hví hann heldur avgerðina hjá sjúkrahúsinum vera skeiva. Tað er neyvan tilvitað, at krøvini til ávikavist myndugleika og sjúkling ikki samsvara. Heldur man talan vera um, at fortreytin fyri kravinum um skrivliga kæru er, at sjúklingurin hevur fingið avgerðina skrivliga.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevur ongantíð fingið avrit av eini avgerð hjá sjúkrahúsunum í málum sum hesum. Kærunevndin hevur gjørt vart við, at tað er óheppið, at avgerðirnar einans eru munnligar, tí grundarlagið undir kæruviðgerðini verður ein frágreiðing um ta munnligu avgerðina. Ein frágreiðing, sum í onkrum føri verður skrivað upp til fleiri vikur eftir, at avgerðin er tikin. Tað óhepna í hesum man vera sjálvsagt. Tað kann tí henda,

at ein sjúklingur, sum av eini ella aðrari orsøk ikki hevur biðið sjúkrahúsið um eina skrivliga grundgeving, ikki fær hesa, fyrr enn kæruviðgerðin er farin í gongd.
Ein annar týdningarmikil liður at geva gætur í hesum sambandi er, at sjúklingurin hevur eitt skotbrá upp á 4 vikur at senda kærunevndini avgerðina. Frávik frá kærufreist verða vanliga bert givin vegna serligar umstøður, og ivi eigur tí ikki at vera um, nær avgerðin er tikin. Ein ivi, sum lættliga kann vera til staðar, um avgerðin ikki er skjalfest við dagfesting.

## Einsháttað siðvenja

Sjúklingurin, sum klagaði til umboðsmannin, vísti á, at hann, ta einu ferðina hann varð lagdur undir skurð uttanlands, fekk noktandi svar um fylgjara, meðan ein annar sjúklingur, sum fekk somu skurðviðgerð, hevði fingið í boði frá øðrum sjúkrahúsi at hava ein fylgjara við sær. Hetta hevði klagarin ilt við at skilja. Eina aðra ferð var hann til eina viðgerð, sum eftir leiðreglunum í útgangsstøðinum ikki lýkur treytirnar fyri at fáa fylgjara, og eisini tá høvdu aðrir sjúklingar í somu viðgerð fylgjara við á ferðini.

Tað er ikki vist, at umstøðurnar hjá klagaranum og hinum sjúklingunum vóru tær somu, ella um munur varð gjørdur á teimum. Tað er tó ikki eins lætt at kanna, um siðvenjan á økinum er einsháttað, sum tað hevði verið, um avgerðirnar vóru skrivligar.

Bæði kærunevnd og eftirlitsmyndugleikar hava eina torføra uppgávu, um teir skulu kanna siðvenjuna á økinum. Hóast bert nøkur fá starvsfólk taka allar avgerðirnar, koma onnur fyrr ella seinni í teirra stað. Hesi mugu hava møguleika at kunna seg við áður tiknar avgerðir og siðvenjuna á økinum. Í hesum sambandi hava sjúkrahúsini eins og allir aðrir almennir myndugleikar sambært góðum fyrisitingarsiði skyldu at tryggja eina einsháttaða siðvenju.

## Endi

Landssjúkrahúsið gjørdi undir viðgerðini umboðsmannin varugan við, at talið av kærum á økinum er lækkað seinastu árini. Hetta kann vera eitt tekin um, at sjúkrahúsini duga væl at taka avgerðir í samsvari við reglurnar. Hinvegin kann hetta eisini vera eitt tekin um, at sjúklingurin ikki er nóg væl upplýstur um kærumøguleikan, og at tað er tvørligt hjá sjúkum at gera vart við seg og taka stig til at royna eina munnliga avgerð við ein hægri myndugleika.

Spurnartekin kann tí setast við, um orkusparingin í fyrisitingunum á sjúkrahúsunum stendur mát við, hvussu orkukrevjandi tað kann vera fyri sjúkling, kærunevnd og at enda eisini sjúkrahúsini, at avgerðirnar einans verða fráboðaðar munnliga.

# Fráfaringaravtalur innan tað almenna

**Majbritt Lamhauge,** fulltrúi (2011)

Sonevndar fráfaringaravtalur, har arbeiðsgevari og arbeiðstakari av ymiskum orsøkum semjast um, at samstarvið partanna millum skal halda uppat, eru arbeiðsrættarliga ein natúrligur, lógligur og alment góðkendur liður, á einum vælvirkandi og dynamiskum arbeiðsmarknaði og kann í nógvum førum verða við til at tryggja áhugamálini hjá bæði arbeiðsgevara eins væl og arbeiðstakara.

Spurningurin um rættarligu støðuna, ið fráfaringaravtalur hava innan almenna arbeiðsmarknaðin, er ikki nógv viðgjørdur, men við tveimum úrskurðum, báðir dagfestir 16. november 2004, staðfesti Hægstirættur, at ein starvssetan á almenna arbeiðsmarknaðinum, á sama hátt sum á privata arbeiðsmarknaðinum, kann halda uppat við avtalu millum partarnar. Nevndu dómar eru endurgivnir í danska lógartíðarritinum „Ugeskrift for Retsvæsen" fyri árið 2005, ávikavist á bls. 616 og 622 (U2005.616H og U2005.622H).

Í eini frágreiðing, dagfest 21. desember 2004, umbiðin av rættarnevndini hjá Fólkatinginum í kjalarvørrinum á úrskurðunum hjá Hægstarætti, vísti danski umboðsmaðurin á, at tágaldandi rættarpraksis, viðvíkjandi sonevndum fráfaringaravtalum innan almenna arbeiðsmarknaðin, hevði verið fyri eini kollveltandi broyting, og at Hægstirættur grundleggjandi hevði broytt kós hesum viðvíkjandi.

Frágreiðingin letur ongan iva verða um, at umboðsmaðurin metir, at rættartrygdin hjá alment settum starvsfólkum, sum avleiðing av úrskurðunum hjá Hægstarætti, er ivasom, og at rættarstøðan viðvíkjandi fráfaringaravtalum innan tað almenna av somu orsøk er ógreið.

## Praksis fyri 16. november 2004

Reglur um hvussu ávikavist ein arbeiðsgevari og ein arbeiðstakari kann verða loystur frá eini starvssetan, eru at finna í lógum, herundir t.d. Tænastumannalógini (Løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 28 frá 19. mai 2008) og Starvsmannalógini (Løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um starvsmenn/funktionærer, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 2. juni 1970), og harumframt í sáttmálum.

Hesar lógar- og sáttmálaásetingar eru í stóran mun av prosessuellum slag og viðvíkja uppsøgn annaðhvørt við umsókn, har arbeiðstakarin tekur stig til at verða loystur úr starvi, ella uttan umsókn, har arbeiðsgevarin tekur stig til at enda starvssetanina. Reglurnar siga sostatt einki um uppsøgn eftir avtalu, vanliga nevnt fráfaringaravtalur.

Umframt omanfyri nevndu lógar- og sáttmálaásetingar hevur eisini Fyrisitingarlógin (Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg/om forvaltning) umframt óskrivaðu fyrisitingarligu meginreglurnar, herundir markreglan, líkareglan, officialprinsippið og meginreglan um góðan fyrisitingarligan sið, beinleiðis ávirkan á mál viðvíkjandi uppsøgn á almenna arbeiðsmarknaðinum og eru tað serliga reglurnar um partshoyring, lógarinnar kap. 5, og grundgeving, kap. 6, sum eru av týdningi í hesum sambandi, eins og kap. 3 um vegleiðing og umboðan, og kap. 4 um skjalainnlit partanna hava ein ávísan týdning.

Týdningurin av prosessuellu reglunum í sambandi við uppsøgn sæst týðuliga í tí praksis, sum ávikavist dómstólarnir og umboðsmaðurin hava havt gjøgnum tíðirnar. Við úrskurði sagdur í Hægstarætti (U2003.1660H) fekk arbeiðstakarin endurgjald fyri ósakliga uppsøgn vegna brot á markregluna, eins og brot á reglurnar um partshoyring, skjalainnlit og grundgeving í U1999.1337H viðførdi, at arbeiðstakaranum varð veitt endurgjald fyri ósakliga uppsøgn.

Spurningin um fráfaringaravtalur – avtalaða uppsøgn – hava dómstólarnir ikki áðrenn Hægstarættarúrskurðarnar frá 16. november 2004 havt høvi til at taka støðu til í serliga nógvum førum, og er rættarpraksis hesum viðvíkjandi tí sera avmarkað. Tó er spurningurin í ein ávísan mun viðgjørdur av Hægstarætti í úrskurði U1974/3H, har rætturin staðfesti, at ein arbeiðstakari við avtalu kann frásiga sær rættindi sum viðkomandi annars vildi havt við uppsøgn uttan umsókn. Tann 19. desember 2002 hevur Eystari Landsrættur gjørt úrskurð, har staðfest verður, at ein tænastumaður við avtalu hevur frásagt sær rættartrygdina, ið reglurnar í Fyrisitingarlógini eru til fyri at tryggja.

Fólkatingsins Umboðsmaður hevur í síni praksis viðvíkjandi uppsøgn við avtalu, sum heild ikki viðurkent fráfaringaravtalur sum eitt nýtiligt amboð í starvsfólkarættarligum høpi á almenna arbeiðsmarknaðinum. Soleiðis hevur umboðsmaðurin í FOB (Folketingets Ombudsmands Beretning) fyri árið 1998 á bls. 491 staðfest, at ein avtala um treytirnar í sambandi við eina uppsøgn

ikki er ein avtaluspurningur og tí ikki er fevnd av avtalurættinum, men er fevnd av „avgerðar-hugtakinum“ í fyrisitingarrættinum.

## Rættarstøðan eftir 16. november 2004

Sum nevnt innleiðandi, metti umboðsmaðurin, at Hægstirættur við sínum úrskurðum tann 16. november 2004 grundleggjandi hevði broytt kós, hvørjum uppsøgn við avtalu viðvíkur, og at rættarstøðan sum ein avleiðing av hesum var ógreið.

Sum víst á omanfyri, hevur rættarskipanin bert í fáum førum havt høvi til at viðgera spurningin um fráfaringar-avtalur, áðrenn umrøddu dómar frá 2004, men greitt er, av tí praksis, sum tó finst frammanundan, at dómstólarnir sum heild viðurkenna, at arbeiðstakari við avtalu kann frásiga sær rættindi, sum viðkomandi annars hevur sambært lóg og/ella sáttmála.

Tað, sum kann sigast at verða tann kollveltandi broytingin í dómunum frá 2004, er, at Hægstirættur staðfestir, at sambært bæði orðaljóðinum og viðmerkingunum til Fyrisitingarlógina fella avtalur millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara sum heild uttanfyri „avgerðarhugtakið“, sum er grundarlagið undir øllum fyrisitingarrættinum, og tí kann ein avtala sum útgangsstøði ikki viðgerast í fyrisitingarligum høpi.

Og júst henda staðfesting fekk beinleiðis avleiðing fyri umboðsmansstovnin, tí við hesum var øll tann praksis, sum umboðsmaðurin hevði havt fram til 16. november 2004, sett úr gildi. Avleiðingin sæst aftur í, at umboðsmansstovnurin eftirfylgjandi sum heild hevur avvíst øll mál viðvíkjandi fráfaringaravtalum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Vert er at viðmerkja, at Hægstirættur í grundgevingum sínum fyri áðurnevndu úrskurðum leggur stóran dent á heilt konkret viðurskifti, ið vóru viðvirkandi til, at rætturin metti, at avtalan hevði bindandi virknað, herundir at partarnir vóru at meta sum javnbjóðis partar, og at avtalan í sínum orðaljóði, gjørdi fult og heilt upp við øll viðurskifti partanna millum.

Sostatt kann staðfestast, at tá ein fráfaringaravtala er fevnd av avtalurættinum, skulu avtalurættarligu reglurnar verða uppfyltar, fyri at ein tílík avtala kann fáa løgfrøðisligt gildi, og kann grundarlagið undir eini fráfaringaravtalu til eina og hvørja tíð roynast í rættarskipanini. Í úrskurði U2009.1961V tók Vestari Landsrættur støðu til bæði fyrisitingarliga- og avtalurættarliga spurningin viðvíkjandi eini fráfaringaravtala og kom til ta niðurstøðu, at málið skuldi viðgerast eftir avtalurættarligum reglum, og at grundarlag var ikki fyri at tilsíðisseta avtaluna.

Sum ein natúrlig avleiðing av úrskurðunum í Hægstarætti hevur eisini Løgtingsins umboðsmaður fylgt sama leisti sum Fólkatingsins umboðsmaður og avvíst at viðgera mál um uppsøgn við avtalu.

Føroyski umboðsmansstovnurin hevur tó einans í tveimum førum tikið støðu til mál viðvíkjandi fráfaringaravtalum innan almenna arbeiðsmarknaðin.

Fyrra málið, sum er endurgivið í áliti, dagfest 27. februar 2004, jnr. 200300031, er viðgjørt áðrenn Hægstirættur gjørdi úrskurð, og har staðfesti umboðsmaðurin m.a., at Mentamáláráðið ikki hevði yvirhildið fyrisitingarligu ásetingarnar um partshoyring, og at tað sum heild framgekk av málinum, at ein avtala millum aðalráðið og klagaran ikki kundi metast at verða inngingin á nøktandi grundarlagi.

Í seinna málinum, sum er frá 2006, jnr. 200600030, avvísti umboðsmaðurin at fara inn í málið, og lagdir vórðu til grund omanfyri nevndu Hægstarættarúrskurðir vísandi til, at ein avtala varð gjørd millum partarnar.

## Samanumtikið

Við at velja at gera eina avtalu um fráfaring skal ein arbeiðstakari gera sær greitt, at avleiðingin er, at tann rættartrygd, ið finst innan karmarnar í fyrisitingarrættinum, ikki er galdandi, tá ein avtala verður tikin fram-um eina fyrisitingarliga prosess, og málið kann í síni heild ikki viðgerast eftir hetta í fyrisitingarligum høpi, men kann tó roynast sum eitt avtalurættarligt mál í rættarskipanini.

Í hvønn mun avtalur av hesum slag verða gjørdar á almenna arbeiðsmarknaðinum í Føroyum í dag, er torført at meta um, tí flestu av hesum málum verða væntandi ongantíð roynd innan fyrisitingarligu kærumyndugleikarnar og verða í besta føri tikin víðari til rættarskipanina.

Tað er tó nakað, ið bendir á, at hóast fráfaringaravtalur javnan verða gjørdar, eisini millum almennan arbeiðsgevara og arbeiðstakara, verða flestu „fráfaringarmál“ handfarin sum starvsfólkamál eftir traditionellum starvsfólka- og fyrisitingarligum reglum og mannagongdum.

Sambært hagtølunum hjá Løgtingsins umboðsmanni fyri árini 2009 – 2011 hevur talið av klagum um starvsfólkamál verið ávikavist 14 klagur í 2009, 4 klagur í 2010 og 8 klagur í 2011.

Hóast hesi tøl eru ov smá til at kunna nýtast sum grundarlag undir eini berandi niðurstøðu, er tað nærliggjandi at umhugsa, hvørjar orsøkirnar kunnu vera til, at tað samanumtikið eru so fáar klagur um starvsfólkaviðurskifti, tá havt verður í huga, hvussu nógv starvsfólkamál av ymiskum slag, sum dagliga verða handfarin innan almenna arbeiðsmarknaðin.

Ongin ivi er um, at nógv tey flestu starvsfólkamálini verða viðgjørd og handfarin sambært galdandi reglum og greiðum mannagongdum, og er hetta eisini galdandi fyri uppsagnarmál. Tó er vert at umhugsa, hvørt klagurnar til Løgtingsins umboðsmann um starvsfólkaviðurskifti, herundir serliga um uppsagnir, høvdu verið fleiri í tali, um ikki ein ávísur partur av hesum málum endaðu við eini fráfaringaravtalu.

# Góður fyrisitingarsiður

**Sólja í Ólavsstovu,** umboðsmaður (2016)

*Hóast tað ikki eru ásettar almennar reglur í fyrisitingarrættinum um t.d. málsviðgerðartíð hjá myndugleikum, verður mett, at tað er góður fyrisitingarsiður, at almennir myndugleikar hava skipað arbeiðsgongdirnar soleiðis, at málsviðgerðartíðin kann styttast og ikki verður óneyðuga drúgv.*

Arbeiðið hjá umboðsmanninum byggir sum útgangsstøði á lógir og reglur. Áðrenn fyrisitingarlógin og lógin um alment innlit vórðu settar í gildi í 1993 bygdi virksemið hjá almennu fyrisitingini í Føroyum á góðan fyrisitingarsið. Ongar skrivaðar reglur vóru fyri, hvussu samskiftið millum ein borgara og tað almenna skuldi fara fram, og ongar ásetingar vóru fyri, hvussu ein myndugleiki skuldi partshoyra ein umsøkjara ella grundgeva, áðrenn avgerð varð tikin í einum máli.

Góður fyrisitingarsiður er ikki ásettur í nakrari lóg, og er tí ikki bindandi fyri ein myndugleika á sama hátt sum ein lógaráseting, men er ein leiðregla fyri, hvørji virðir ein myndugleiki eigur at leggja dent á í sínum samskifti við ein borgara.

Góður fyrisitingarsiður økir um álitið á tann almenna myndugleikan. Tað er sjálvsagt, at álitið á ein myndugleika minkar, um ein málsviðgeri tekur ímóti gávum frá einum parti í einum máli. At taka ímóti gávum kann sostatt ikki sigast at vera góður fyrisitingarsiður, men tað kann í aðrar mátar verða torført eintýðugt at siga, hvat góður fyrisitingarsiður er.

Umboðsmaðurin hevur í fleiri málum víst á viðurskifti, har hann metir, at ein myndugleiki hevur sett til viks góðan fyrisitingarsið.

Hvat eyðkennir góðan fyrisitingarsið kann best lýsast í ítøkiligum málum. Sum dømi um góðan fyrisitingarsið kann nevnast, at ein myndugleiki eigur at:

- svara einum borgara innan fyri rímiliga tíð,
- svara einum borgara á slíkan hátt, at viðkomandi skilir avgerðina
- handfara borgarar á ein sømiligan og virðiligan hátt

## Málsviðgerðartíð

Hóast tað ikki eru ásettar almennar reglur í fyrisitingarrættinum um málsviðgerðartíð hjá myndugleikum, verður mett, er tað er góður fyrisitingarsiður, at almennir myndugleikar hava skipað arbeiðsgongdirnar soleiðis, at málsviðgerðartíðin kann styttast og ikki verður óneyðuga drúgv.

Spurningurin, nær málsviðgerðartíðin fer út um mark, kann tí ikki svarast alment. Tá ein meting skal gerast um málsviðgerðartíðina hjá einum myndugleika, eru fleiri atlit at taka. Hesi atlit kunnu eitt nú vera, hvussu fjøltáttað málið er, vavið á kanningum, sum myndugleikin skal gera, herundir um talan er um drúgva málslýsing hjá ymiskum pørtum ella myndugleikum, rúgvismikið skjalatilfar, tann vanliga nýtta viðgerðartíðin og onnur viðurskifti, sum kunnu gera seg galdandi.

Um viðgerðartíðin dregur út, eigur myndugleikin, sambært góðum fyrisitingarsiði, av sínum eintingum, og hóast partarnir ikki hava vent sær til myndugleikan, at kunna partarnar í málinum um, at málsviðgerðin fer at taka longri tíð enn vanligt, og hvør orsøkin er til hetta. Tað er somuleiðis brot á góðan fyrisitingarsið, um myndugleikin ikki svarar eini áminning frá einum borgara.

Umboðsmaðurin hevur í fleiri førum átalað drúgva viðgerðartíð hjá einum myndugleika. Umboðsmaðurin hevur serliga gjørt vart við hetta á tí sosiala økinum, har ein drúgv málsviðgerð kann vera sera tyngjandi fyri ein borgara. Umboðsmaðurin hevur í hesum sambandi víst á, at serliga tá talan er um børn og ung, hevur tað stóran týdning, at viðgerðartíðin verður so stutt sum gjørligt. Vísast kann í hesum sambandi til LUM 201000025.

## Munnligar avgerðir

Tað er ikki eitt alment fyrisitingarrættarligt krav, at myndugleikar skulu fráboða avgerðir skrivliga. Tað er heldur onki lógarkrav um, at ein avgerð, sum til fulnar gongur einum parti á møti, skal vera skrivlig ella grundgevast. Hóast hetta verða flestu fyrisitingarligu avgerðirnar fráboðaðar skrivliga. Sambært góðum fyrisitingarsiði kann borgari, sum skrivliga vendir sær til fyrisitingina, krevja at fáa eitt skrivligt svar frá myndugleikanum. Tað er eisini góður fyrisitingarsiður, at ein borgari, hóast ein avgerð til fulnar gongur honum á møti, fær eina skrivliga váttan um eina munnliga fráboðaða avgerð. Biður ein borgari um skrivliga váttan fyri eini avgerð, sum munnliga er fráboðað,

hevur myndugleikin sambært góðum fyrisitingarsiði skyldu at gera hetta.

Í máli um inntøkumiss kom umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at Almannaverkið eftir áheitan frá borgaranum hevði skyldu at útgreina avgerðirnar fyri klagaranum, hóast hann hevði fingið tað, sum hann hevði søkt um. Umsøkjarin kundi ikki beinleiðis í útgoldnu upphæddini síggja, um tað, hann hevði fingið, eisini var tað, sum hann hevði rætt til. (LUM 201300092)

Í einum øðrum máli metti umboðsmaðurin, at ein munnlig avgerð hjá Landssjúkrahúsinum um at nokta umsókn um fylgjara í sambandi við sjúkraviðgerð uttanlands átti at verið givin skrivliga. Hóast klagarin hevði biðið um hetta, hevði hann onga grundgeving fingið fyri avgerðini. Umboðsmaðurin helt, at Landssjúkrahúsið, sambært góðum fyrisitingarsiði, átti at havt givið umsøkjara skrivliga grundaða avgerð, tá umsóknin ikki varð gingin á møti. Umboðsmaðurin heitti á Landssjúkrahúsið um at broyta siðvenju og geva sjúklingum, sum fáa noktað umsókn um fylgjara, skrivliga grundgeving fyri avgerðini. Harumframt helt Umboðsmaðurin tað vera sera átaluvert, at Landssjúkrahúsið, hóast fleiri áheitanir frá Føroya Kærustovni um at grundgeva avgerðirnar, onki hevði gjørt fyri at bøta um hetta. (LUM 14/00007)

## Innihald í skrivi

Hóast ongi formlig krøv eru til skriv, sum ein myndugleiki sendir til ein borgara, so eru tó nakrar grundleggjandi upplýsingar, sum av eyðsýndum orsøkum skulu vera í einum skrivi. Tær eru m.a., at móttakarin skal kunna síggja, hvørjum myndugleika brævið er frá, og hvør hevur skrivað brævið, at málburðurin skal vera greiður, og móttakarin lættliga skal kunna lesa, hvat málið snýr seg um.

Tað er ikki í samljóð við góðan fyrisitingarsið, at tað ikki sæst, hvør hevur undirskrivað eina avgerð. Í einum máli um barnapening helt umboðsmaðurin ikki, at tað sambært góðum fyrisitingarsiði var nøktandi at senda eitt uppkrav til ein borgara uttan at nevna, hvat barn, peningurin var fyri, og hvat kravið snúði seg um, t.v.s um talan var um eina eftirstøðu, ella hvat tíðarskeið eftirstøðan var fyri. Brævið var ikki undirskrivað, og hvørki adressa ella telefonnummar hjá stovninum vóru tilskilað - hetta hóast móttakarin skuldi undirskriva skrivið, sum í veruleikanum mátti metast at vera ein gjaldsavtala. Umboðsmaðurin mælti myndugleikanum til, at brøv frá stovninum verða undirskrivað, so móttakarin sær, hvør hevur skrivað brævið, og at upplýsa, hvussu borgarin kann seta seg í samband við myndugleikan. (LUM 200600001)

Í einum øðrum máli metti umboðsmaðurin tað ikki vera nøktandi at skriva til ein borgara á slíkan hátt, at tað ikki týðiligt sást á brævinum, hvat kravið snúði seg um. (LUM 200900065)

## Hugburður

Um ein borgari skal hava álit á einum myndugleika, er tað neyðugt, at myndugleikin samskiftir og handfer borgaran á ein sømiligan og virðiligan hátt. Sum dømi um hetta skal vísast til eftirlitskanning av endurbúgvingarmálum hjá Almannastovuni. Umboðsmaðurin vísti til nøkur mál, har hann helt, at hugburðurin í avgerðarskrivinum var óhøviskur og ómotiverandi. Umboðsmaðurin bað Almannastovuna umhugsa slíkar útsagnir í avgerðarskrivum til viðskiftafólk síni, tí slíkar útsagnir kunnu fáa viðskiftafólk, sum eru í einari veikari støðu, at missa mótið. Slíkur hugburður er ikki sambæriligur við góðan fyrisitingarsið. Í hoyringarskrivi sínum harmaðist Almannastovan um málburðin og var samd við viðmerkingunum hjá umboðsmanninum um, at játtanarskrivini áttu at verið meira jalig og motiverandi. Í sama viðfangi heitti Almannastovan á starvsfólki um at nýta høviskan málburð í samskifti við viðskiftafólkini. (LUM 200700061)

# Grundgeving

**Sólja í Ólavsstovu,** umboðsmaður (2017)

*„Eg søkti leysa starvið og fekk noktandi svar. Svarið, sum eg fekk, innihelt onga grundgeving, og heldur ikki var sagt nakað um, hvør ið settur var. Eg ringdi sama dag til borgarstjóran og bað um eina grundgeving“*

*Umsøkjarin hevði onga skrivliga grundgeving fingið fyri, hví hon ikki fekk starvið, hon hevði søkt. Borgarstjórin umbar seg við, at hann ikki var greiður yvir, at tað var eitt krav at geva eina skrivliga grundgeving, men at hann hevði grundgivið munnliga fyri avgerðini. Kommunan grundgav avgerðina við, at kommunustýrið metti, at tann, sum var sett í starvið, var tann rætta, og at hon hevði kvalifiseraðar førleikar. Hesa grundgeving metti umboðsmaðurin ikki lúka treytirnar í § 23 í fyrisitingarlógini. Sambært hesari áseting skal grundgevingin geva eina frágreiðing um, hví avgerðin fekk ta innihald, hon fekk, og hví mett var, at førleikin hjá tí, ið sett var í starvið, svaraði betur til settu krøvini, enn førleikin hjá tí, ið ikki var sett – eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum o.s.fr. (LUM 14/00038)“*

## Endamál

Ein avgerð skal, tá hon verður fráboðað skrivliga, hava eina grundgeving, uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti. Hetta framgongur av § 21 í fyrisitingarlógini. Grundgevingin skal verða givin partinum samstundis, sum avgerðin verður fráboðað honum.

Grundgeving fyri eini avgerð skal hjálpa einum borgara betur at skilja eina avgerð og góðtaka hana. Henda skal tryggja, at móttakarin hevur møguleika fyri at kanna, um avgerðin er røtt, at grundarlagið fyri avgerðini er sakligt, og at málið er nøktandi upplýst, áðrenn avgerð verður tikin.

Ein grundgeving gevur harumframt móttakaranum eitt grundarlag fyri at taka støðu til, um avgerðin skal kærast til eina kærunevnd ella skal klagast til umboðsmannin.

## Innihald

Grundgevingin skal hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Avgerðin skal í tann mun, tað er neyðugt, hava eina stutta frágreiðing um tær veruligu umstøður, sum avgerðin byggir á. Í teimum førum avgerðin byggir á eina fyrisitingarliga meting, skulu tey atlit, sum avgerðin byggir á, síggjast aftur í grundgevingini.

## Skrivligar og munnligar avgerðir

Tað er onki krav í fyrisitingarlógini um, at ein avgerð skal fráboðast skrivliga, men sambært § 22, stk. 1, kann hann, sum munnliga hevur fingið boð um eina avgerð, krevja at fáa skrivliga grundgeving fyri avgerðina.

Avgerðir, sum mugu metast at vera tyngjandi fyri móttakaran, eiga eftir góðum fyrisitingarsiði at verða fráboðaðar skrivliga, soleiðis at móttakarin fær betri grundarlag fyri at taka støðu til, um hann skal góðtaka avgerðina ella kæra hana til ein kærumyndugleika.

*Í klagu um eina munnliga avgerð hevði klagarin, hóast hann hevur biðið um hetta, onga grundgeving fingið fyri avgerðini um at nokta honum fylgjara til sjúkraviðgerð uttanlands. Umboðsmaðurin metti, at avgerð, um at nokta umsókn um fylgjara, er ein byrða hjá móttakaranum, tí hesin er í einari viðkvæmari støðu vegna sjúku. Umboðsmaðurin metti tí, at sambært góðum fyrisitingarsiði átti myndugleikin at givið umsøkjara skrivliga grundaða avgerð í teimum førum, har umsókn um fylgjara til sjúkraviðgerð ikki verður gingin á møti. (LUM 14/0007)*

## Partvíst noktað avgerð

Kravið um grundgeving, er bert galdandi, um ein avgerð ikki gevur einum parti fult viðhald. Um ein partur bert partvíst fær viðhald skal myndugleikin grundgeva fyri hesum partinum av avgerðini.

*Eftir umbøn fekk ein journalistur innlit í skjøl og skjalayvirlit í einum máli hjá Mentamálaráðnum. Í svarinum frá Mentamálaráðnum kundi ein fáa ta fatan, at Mentamálaráðið hevði sent journalistinum øll skjølini í málinum. Í málinum lá tó eisini eitt skjalayvirlit, har tað út fyri nøkur av skjølunum var sett eitt minustekn, og hetta kundi bent á, at journalisturin ikki hevði fingið innlit í øll skjølini í málinum. Umboðsmaðurin gjørdi vart við, at eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál, og at Mentamálaráðið hevði tískil skyldu til at greiða journalistinum frá, um hann fekk innlit í øll skjølini ella ikki. Fekk journalisturin ikki innlit í øll skjølini, var talan um, at Mentamálaráðið partvís sýtti umbønini, og í einum slíkum føri hevði Mentamálaráðið sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl, innlit ikki varð givið í, og hvør grundgevingin var fyri hesum. (LUM 15/00060)*

## Neyvari grundgeving

Tað kann serliga í setanarmálum vera trupult at grundgeva fyri, hví ein ávísur umsøkjari ikki hevur fingið starv. Í slíkum førum eigur at verða víst serligt fyrilit, tí ein óheppin orðað grundgeving kann gerast steinur oman á byrðu hjá tí umsøkjara, sum ikki fært starvið. Hinvegin krevur lógin, at ein grundgeving verður givin teimum umsøkjarum, sum fáa skrivliga fráboðan um, at teir ikki hava fingið starvið. Hevur umsøkjari verið til samrøðu, eigur hesin, um hann ynskir hetta, at fáa eina neyvari frágreiðing um, hví hann ikki fekk starvið.

*Í klagu um vantandi starvssetan av landsverkfrøðingi segði umboðsmaðurin, at klagarin, sum hevði virkað á stovninum í 23 ár, harav 10 ár sum leiðari, átti at fingið eina sera gjølliga frágreiðing, og eina neyva grundgeving fyri, at hann ikki skuldi setast í tað starv, sum hann var sagdur úr við teirri grundgeving, at starvið skuldi leggjast niður. (LUM 200200005)*

## Kann ikki víkja frá lógarásetta kravinum

Ein myndugleiki ikki kann víkja frá lógarásetta kravinum um grundgeving, uttan at heimild er fyri hesum.

*Í klagu um stuðul til mvg, hevði klagarin onga fráboðan fingið um avgerðina. Hann fekk sostatt heldur ikki grundgeving og kæruvegleiðing viðvíkjandi avgerðini. Í svarskrivi greiddi TAKS frá, at um munurin var undir kr. 300,00, var ikki skrivað út til umsøkjararnar. Hetta varð gjørt fyri at TAKS ikki skal drukna í umsiting, tí tað ógvuliga oftani var munur á tí, ið søkt varð um og tað, sum varð útgoldið. Til hetta segði umboðsmaðurin, at ein myndugleiki ikki kann víkja frá lógarásettum krøvum, uttan at heimild var fyri hesum. Sambært fyrisitingarlógini skal ein avgerð, ið ikki til fulnar gongur partinum á møti, hava grundgeving. Siðvenjan hjá TAKS við bert at senda avgerðarskriv, tá ið munurin er yvir 300,- kr., var tí ikki í tráð við fyrisitingarlógina § 21. (LUM 200900065)*

## Grundgevingin skal vera nøktandi

Grundgevingin skal vera nøktandi og rættvísandi og skrivað á slíkan hátt, at hon ikki kann misskiljast.

*Í einari klagu um ikki at seta nakran í eitt lýst starv, var grundgevingin, „at førleikarnir, sambært fyriliggjandi upplýsingum, ikki vóru hóskandi til krøvini/ynskini, ið sett vóru til starvið". Tá umboðsmaðurin kannaði málið, vísti tað seg, at avgerðin í ítøkiliga málinum var grundað á upplýsingarnar frá øðrum arbeiðsgevara um, at klagarin skuldi „arbeiða seint". Umboðsmaðurin helt, at hetta átti at framgingið beinleiðis av skrivinum til umsøkjaran, og ikki at verið krógvað í almennum vendingum. (LUM 200500069)*

## Grundgevingin skal vera røtt

Ein grundgeving skal vera røtt á tann hátt, at hon sakliga skal viðgera tey viðurskifti og metingar, sum veruliga hava verið grundarlag undir avgerðini. Um myndugleikin hevur tikið avgerð grundað á skeiva fatan av teimum veruligu umstøðunum, skal hetta síggjast aftur í avgerðini. Grundgevingin skal tí vísa tey atlit, sum myndugleikin veruliga hevur lagt dent á, og myndugleikin eigur ikki í grundgevingini at vísa til atlit, sum ongan týdning hava havt fyri avgerðina.

*Í klagu um starvssetan gav umboðsmaðurin eini kommunu eina álvarliga átalu fyri grundgevingina fyri ikki at bjóða klagaranum til setanarsamrøðu. Umboðsmaðurin metti, at klagarin var einasti av umsøkjarunum sum leyk útbúgvingarkrøvini í starvslýsingin. Í skrivinum til klagaran um, hví hann ikki hevði fingið starvið varð sagt, at tann setti hevði nøktandi fakligar førleikar og serliga viðkomandi starvsroyndir. Einki var sagt um, hvørjar ítøkiligar førleikar talan var um, og á hvønn hátt førleikarnir og starvsroyndir hjá tí setta vóru betri egnaðar til starvið enn tær hjá klagaranum. Í einari eftirfylgjandi frágreiðing førdi kommunan m.a. fram, at orsøkin til, at klagarin ikki var boðin til samrøðu var, at setanarbólkurin hevði fatanina av, at klagarin ikki dugdi føroyskt. Av tí at setanarbólkurin ikki hevði havt setanarsamrøðu við klagaran, hevði setanarbólkurin einki prógv fyri, at klagarin ikki dugdi nóg væl føroyskt. Tað var tí ikki sakligt, eftirfylgjandi og uttan prógv, at vísa til, at setanarbólkurin hevði fatanina av, at klagarin ikki dugdi nóg væl føroyskt. (LUM 200700016)*

## Bert partar í málinum

Tað eru bert partar í einum máli, sum kunnu krevja at fáa eina grundgeving. Í einari klagu frá Maskinmeistarafelagnum staðfesti umboðsmaðurin, at felagið ikki hevði krav um grundgeving fyri avgerðini, tí hetta bert er galdandi mótvegis pørtunum í einum máli. Við tað at Maskinmeistarafelagið ikki er at meta sum partur í málunum, hevði tað ikki nakað krav uppá grundgeving. (LUM 200400077)

## Avleiðing

Kravið um grundgeving tvingar myndugleikan at vera neyvur við sínum kanningum og metingum, áðrenn avgerð verður tikin.

Vantandi grundgeving fyri ein fyrisitingarlig avgerð kann í ávísum førum hava við sær, at avgerðin er ógildig.

Í áðurnevnda máli um setan av landsverkfrøðingi var niðurstøðan hjá umboðsmanninum, at hóast vantandi grundgevingin var eitt so álvarsligt brek, sum í ávísum førum kann føra við sær, at avgerðin er ógildig, so helt umboðsmaðurin ikki, at hetta gjørdi seg galdandi í hesum málinum, tí onki grundarlag var fyri at halda, at tann setti ikki var tann besti maðurin til starvið. Avgerðin um at seta hann í starvið kundi tí ikki metast at hava verið ógildig.

Umboðsmaðurin hevur higartil ongantíð víst á, at vantandi grundgeving hevur verið eitt so álvarsligt brek, at avgerðin átti at verðið ógildað.

Ásetingarnar um grundgeving eru at finna í kapitli 6 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg/om forvaltning og eru soljóðandi:

„§ 21. Tá ein avgerð verður fráboðað skrivliga, skal hon hava grundgeving uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti.

§ 22. Hann, sum munnliga hevur fingið boð um eina avgerð, kann krevja at fáa eina skrivliga grundgeving fyri avgerðini, uttan so, at avgerðin til fulnar gongur viðkomandi parti á møti. Áheitan um hetta skal verða latin myndugleikanum innan 14 dagar eftir, at parturin hevur fingið boð um avgerðina.

Stk. 2. Ein áheitan um skrivliga grundgeving sambært stk. 1, skal verða svarað skjótast gjørligt. Um áheitanin ikki er svarað innan 14 dagar eftir, at myndugleikin hevur fingið áheitanina, skal hesin geva partinum boð um orsøkina til hetta og nær áheitanin væntandi fer at verða svarað.

§ 23. Ein grundgeving fyri eini avgerð, skal hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun, avgerðin eftir hesum reglum hvílir á eini fyrisitingarligari meting, skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini.

Stk. 2. Grundgevingin skal eisini um neyðugt hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.

Stk. 3. Grundgevingin kann verða avmarkað í tann mun áhugi partanna í at kunna nýta kunnleika til hesa til røkjan av sínum tørvi má metast at eiga at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri honum sjálvum ella øðrum privatum ella almennum áhugamálum, jbr § 15.“

# Innlit í fyrisitingina

**Birta Biskopstø,** ráðgevi (2011)

Tann 1. januar 1994 kom innlitslógin í gildi (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001). Endamálið við lógini var at styrkja um gjøgnumskygni og opinleika hjá myndugleikum, sum viðgera og taka avgerðir, sum ávirka fólk, feløg og samfelagið sum heild.

Innlitslógin skal tryggja borgarum og fjølmiðlum møguleika at fylgja við í, hvat hendir í almennu umsitingini, viðvirka til at skapa áhuga fyri almennum viðurskiftum, og opinleikin skal vera við til at økja álitið á almennu umsitingina.

Lógin hevur serligan týdning fyri fjølmiðlarnar, tí hon gevur teimum møguleika at fylgja við í og halda eyga við, at alt fer rætt fram. Harumframt gevur hon fjølmiðlunum møguleika at viðgera og kunna fólk á røttum faktiskum grundarlagi.

Lógin er ein minimumslóg og viðger bert, nær ein myndugleiki hevur skyldu til at geva innlit. Lógin forðar ikki myndugleikunum í at geva ein borgara ella fjølmiðli meirinnlit.

Innlitslógin er eitt ískoyti til reglurnar um partsinnlit, sum eru ásettar í fyrisitingarlógini. Reglurnar um partsinnlit geva tí einstaka rætt til meira innlit enn innlitslógin, men innlitslógin gevur samstundis einum parti í einum máli møguleika at biðja um innlit í onnur mál, sum líkjast eins egna og harvið møguleika fyri at kanna siðvenjuna hjá einum myndugleika í ávísum málum.

## Hvørjir myndugleikar eru fevndir av innlitslógini

Innlitslógin fevnir einans um stovnar undir heimastýrinum.

Sambært § 1, stk. 1 er innlitslógin galdandi fyri alt virksemi hjá almennu fyrisitingini. Innlitslógin fevnir um allar myndugleikar, bæði kommunalar, interkommunalar og landsmyndugleikar. Eisini eru nevndir og arbeiðsbólkar, hvørs virksemi einans er ráðgevandi ella fyribils, eisini fevnir av innlitslógini.

Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 15. november 2001 (j. nr. 200100022), í niðurstøðu sínari staðfest, at Kringvarp Føroya (tá SVF og ÚF), tó ikki programvirksemi og handilsligu viðurskiftini, skulu roknast við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini og innlitslógini.

Innlitslógin er ikki galdandi fyri Løgtingið og stovnar við tilknýti til Løgtingið. Eitt nú er virksemið hjá løgtingsskrivstovuni, umboðsmanninum og landsgrannskoðanini ikki fevnt av innlitslógini.

Stovnar, feløg, grunnar og líknandi, ið eru skipað á privatrættligum grundarlagi, eru sum høvuðsregla ikki fevnd av innlitslógini. Hetta er galdandi, hóast virksemið hjá teimum kann síðustillast við tað virksemi, sum fyrisitingarmyndugleikar vanliga hava. Tó kunnu hesir stovnar v.m. eftir eini ítøkiligari metan koma undir innlitslógina, um teir eru undirlagdir gjøllari almennari skipan, umsjón ella eftiransan. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 29. juni 2004 (j. nr. 200400023), í niðurstøðu sínari staðfest, at hóast Føroya Barnaheim var ein sjálvsognarstovnur, var stovnurin eftir eini ítøkiligari metan at meta sum ein fyrisitingarmyndugleiki, ið er fevndur av fyrisitingarlógini og innlitslógini.

Partafeløg og íognarfeløg, sum tað almenna er partaeigari ella íognari í, koma ikki undir innlitslógina.

## Viðgerð av innlitsáheitanum

Tey tíggju árini, sum umboðsmannsstovnurin hevur virkað, hava borgarar og fjølmiðlar klagað til umboðsmannin, tá ið tey hava mett, at tey ikki hava fingið nøktandi viðgerð av innlitsáheitanum. Umboðsmaðurin hevur í hesum tíðarskeiði skrivað 30 álit um millum annað handfaringina, herundir viðgerðartíðina hjá myndugleikum av innlitsumbønum, grundarlagi hjá myndugleikum fyri at nokta innlit, herundir meirinnlit í innanhýsis skjøl og ymisk onnur viðuskifti í sambandi við innlit í fyrisitingina.

Við heimild í innlitslógini kann ein og hvør, eisini í førum har tey ikki eru partur av einum máli, krevja at fáa høvi at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð í sambandi við virksemi hjá myndugleikanum.

Lógin um innlit viðger spurningin um, í hvønn mun myndugleikar hava skyldu til at lata almenningin fáa skjalainnlit. Lógin forðar ikki fyri, at myndugleikin, eftir egnari meting, loyvir meirinnliti, tað vil siga gevur meira innlit, enn lógin setir sum krav, um so er, at annað ikki fylgir av reglunum um tagnarskyldu.

Ásetingarnar í §§ 4 og 5 í innlitslógini skila til høvuðsregluna um víddina á skjalainnlitinum. Møguleikarnir fyri skjalainnliti eru tó avmarkaðir við ásetingunum í §§ 7 til 14. Ásetingarnar í §§ 7 til 11 lýsa, í hvørjum førum eitt skjal kann verða undantikið frá skjalainnliti, meðan ásetingin í § 12 vísir, nær ávísar upplýsingar kunnu verða undantiknar. Ásetingin í § 13 fevnur um bæði skjøl og upplýsingar.

Áheitan um innlit í fyrisitingina skal sambært § 4, stk. 3 í innlitslógini skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við. Tað, sum liggur í hesum kravi er, at viðkomandi skal vísa til skjølini/málið á ein slíkan hátt, at tað út frá hesum gerst møguligt hjá myndugleikanum at finna fram til skjølini/málið.

Til tíðir hava myndugleikar víst á, at innlitsáheitanir hava verið ov ógreitt orðaðar, og við tí grundgeving hevur myndugleikin noktað innlit. Umboðsmaðurin hevur havt mál til viðgerðar, sum hava verið um henda spurning. Í áliti, dagfest 7. juni 2010 (j. nr. 201000006), hevur umboðsmaðurin í niðurstøðu sínari víst á, at áheitanin um innlit var orðað á ein slíkan hátt, at eingin ivi var um, hvat innlitsumbønin fevndi um.

Umboðsmaðurin vísir eisini á, at um so var, at myndugleikin ivaðist í, hvat tað var, sum innlit ynsktist í, hevði myndugleikin sambært vegleiðingarskylduni í § 7 í fyrisitingarlógini skyldu til at venda sær til umsøkjaran fyri at biðja hann útgreina innlitsumbønina. Í áliti, dagfest 3. november 2006 (j. nr. 200600063), viðgjørdi umboðsmaðurin í niðurstøðu sínari spurningin um ein innlitsáheitan í síni heild var nóg neyvt orðað. Hóast innlitsumbønin í síni heild ikki var nóg neyvt orðað, metti umboðsmaðurin, at eingin ivi kundi vera um, at partar av innlitsumbønini vóru nóg greitt lýstir til at viðgera áheitanina um innlit.

## Skjøl, sum eru fevnd av innlitslógini

Útgangsstøðið sambært innlitslógini er, at rætturin til innlit fevnir um øll skjøl, og at tað krevst ein lógarheimild fyri at nokta innlit.

Skjalahugtakið í innlitslógini fevnir umframt um skrivligt tilfar eisini um tekningar, kort, myndir og líknandi. Eisini fevnir hugtakið um annað tilfar, ið kemur í staðin fyri skrivligt tilfar, so sum, ljóðfílar, filmar, sjónbandaupptøkur og líknandi.

Ikki alt tilfar av omanfyrinevnda slagi, sum verður gjørt av ella kemur til ein myndugleika, kemur undir innlitslógina. Avgerandi treytin fyri at siga, at tilfarið verður fevnt av hugtakinum, er um tilfarið verður fingið til vega og goymt hjá myndugleikanum sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 2. juni 2010 (j.nr. 201000003), í niðurstøðu sínari viðgjørt spurningin um skjalahugtakið og vísti á, at skjalahugtakið skal tulkast vítt. Spurningurin í tí málinum var, um fráboðaninar, sum MRCC móttók frá Atlantic Airways og noteraðu í teldutøku dagbók stovnsins, vóru at meta sum partur av einari elektroniskari skrá/skráseting sambært § 5, stk. 2 í innlitslógini, ella um fráboðanirnar vóru elektronisk skjøl, ið vóru fevnd av rættinum til innlit.

Tað eru ikki einans skjøl í einum máli, har myndugleikarnir skulu taka ítøkiligar avgerðir, sum eru fevnd av innlitslógini. Rætturin til skjalainnlit fevnir um skjøl, sum eru til viðgerðar ella hava fingið eina fyrisitingarliga málsviðgerð, herundir eisini skjøl, sum eru í gerð av myndugleikum og í málum um annað alment virksemi, sum til dømis ferðsla, undirvísing, røkt, heilsuverk og bygging.

Lógin er galdandi fyri mál um starvsfólk hjá tí almenna, og sum dømi kunnu nevnast uppsagarmál. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 18. februar 2009 (j. nr. 200800100), í niðurstøðu sínari viðgjørt spurningin um innlit í einum starvsfólkamáli. Myndugleikin sýtti innlitsumbønini í hesum máli og vísti til, at rætturin til alment innlit fevnir ikki um starvssetanarmál og mál um flytan í hægri starv, jbr. § 2, stk. 1 í innlitslógini.

Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at talan hvørki var um starvssetan ella um flytan í hægri starv. Talan var tí um skeiva grundgeving frá myndugleikanum um at sýta innlit. Umboðsmaðurin vísti á, at innlitsáheitanin skulu viðgerast eftir vanligu reglunum í innlitslógini og, at myndugleikin í einum tílíkum máli hevði skyldu til at meta um, hvørt upplýsingar ella skjøl í starvsfólkamálum kundu undantakast almennum innliti.

Umboðsmaðurin hevur í einum øðrum innlitsmáli, í áliti, dagfest 22. juni 2007 (j. nr. 200700024), um uppsøgn av einum starvsfólki, í niðurstøðu sínari víst á, at umboðsmaðurin ikki dugdi at síggja, at innihaldið í uppsagnarskrivinum kundi grundgeva fyri at undantaka skjalið við heimild í § 12, stk. 1. Hinvegin kunnu grundgevingarnar fyri einari uppsøgn vera undantiknar innliti, í tann mun tær avdúka nakað, sum hoyrir privatlívinum til.

Mál um lóggávu, herundir eisini játtanarlógir, eru bert fevnd av innlitslógini, tá ið tey eru framløgd í Løgtinginum. Sama er galdandi fyri tey skjøl, sum eru partur av lóggávuarbeiðinum hjá myndugleikum. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 4. februar 2009 (j.

nr. 200800057), í niðurstøðu sínari viðgjørt spurningin um innlit í lóggávumál, har lógaruppskotið varð sent Løgtinginum, men varð ikki framlagt. Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at tá ið talan var um eitt lógarmál, sum ikki var framlagt í Løgtinginum, var málið ikki fevnt av innlitslógini.

## Undantøk frá rættinum til skjalainnlit og ekstraheringsskyldan

Sambært § 7 í innlitslógini, fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu, brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika og brævaskifti millum eitt bý- ella bygdaráð og tess nevndir, deildir og aðrar stovnar ella millum hesar stovnar sínámillum.

Tá ið skjøl eru fevd av undantakinum til skjalainnlit sambært § 7, skal myndugleikin meta um, hvørt ávís av hesum skjølum kortini eru fevnd av rættinum til innlit sambært § 8, ella um tey innihalda upplýsingar, ið innlit eigur at verða givið í sambært § 11 í innlitslógini. Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 17. desember 2008 (j. nr. 200800064), og í áliti, dagfest 21. desember 2011 (201000094), í niðurstøðum sínum viðgjørt spurningin um innanhýsis arbeiðsskjøl.

Sambært § 12 í innlitslógini, fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um upplýsingar um privat, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum, tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti. Tó soleiðis, at um bert ein partur av skjalinum kemur undir undantøkini, skal myndugleikin kunna um tann partin av innihaldinum í skjalinum, sum fellur uttanfyri undantøkini.

Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 24. oktober 2007 (j. nr. 200700050), í niðurstøðu sínari viðgjørt eina klagu um, at myndugleikin hóast mótmæli frá klagaranum, hevði givið innlit í eitt mál.

Umboðsmaðurin vísti í niðurstøðu sínari á, at ein treyt fyri at afturhalda upplýsingar sambært § 12, stk. 1, nr. 2 er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri virkið, sum upplýsingin viðvíkur, at innlit ikki verður givið. Undantaksreglan kann bert nýtast, um tað sambært einari ítøkiligari meting má haldast at vera ein nærliggjandi vandi fyri einum munandi fíggjarligum tapi hjá umrødda virki, um innlit verður givið.

Reglan er serliga ætlað at verja vinnuloynidómar, har innlit vil kunna skaða kappingarførið hjá viðkomandi. Um myndugleikin, sum hevur fingið eina innlitsumbøn, er í iva um, hvørt innlit eigur at verða givið ella noktað sambært hesari reglu, kann myndugleikin leggja spurningin fyri tann, sum upplýsingarnar viðvíkja, til ummælis. Myndugleikin hevur skyldu til at gera ein ítøkiliga meting av upplýsingunum og taka hædd fyri viðmerkingunum. Tað er tó altíð myndugleikin, sum ger metingina og tekur avgerð um innlitsspurningin.

Sambært § 13 kann rætturin til skjalainnlit verða avmarkað í tann mun, tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi nøkrum ávísum almennum ella privatum áhugamálum. Talan kann til dømis vera um fyrilit fyri trygd ella vernd ríkisins, uttanríkispolitisk ella uttanríkisfíggjarlig áhugamál, fyribyrging, avdúkan og søkjan at lógarbrotum, revsingarfulgerð og líknandi, fremjing av almennum eftirliti og ráðleggingarvirksemi, herundir eisini fíggjarlig áhugamál hjá tí almenna.

Eisini onnur privat og almenn áhugamál enn tey, sum eru nevnd í ásetingini, kunnu, eftir eini ítøkiligari metan, grunda undantøku frá vanligu høvuðsregluni um innlit. Kemur bert ein partur av einum skjali undir undantaksreglurnar, skal tann, sum hevur biðið um innlit, verða kunnaður við restina av skjalinum.

Umboðsmaðurin hevur í áliti, dagfest 22. juni 2006 (j. nr. 200600017), viðgjørt spurningin um, hvørt ein myndugleiki, sum málið var upplýst, kundi nokta innlit við heimild í § 13, stk. 1, nr. 3. Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at myndugleikin ikki við heimild í § 13 kundi sýta innlitsumbønini.

Um so er, at myndugleikin hevur grundaðan iva, um ein áheitan um innlit eigur at verða noktað vísandi til undantøkini, kann mynduleikin biðja um ummæli frá teimum, hvørs áhugamál kunnu vera til hindurs fyri, at áheitanin um innlit verður gingin á møti.

## Samanumtikið

Í tíðarskeiðinum 2001 til 2011 eru 129 klagur um innlit komnar til umboðsmannin. Av hesum hava 80 klagur snúð seg um avgerðir hjá myndugleikum og 49 um málsviðgerð hjá myndugleikum. Í hesum tíðarskeiði hevur umboðsmaðurin skrivað 30 álit, sum eru um innlitslógina.

Av innkomnum klagum sæst, at tað í stóran mun eru fjølmiðlanir, sum klaga. Tað, sum fjølmiðlanir klaga um, eru sum oftast innlitsáheitanir í mál hjá fyrisitingini, sum eru tíðaraktuel, og sum hava ein almennan áhuga.

Sum nevnt í innganginum, er innlitslógin eitt ískoyti til reglurnar um partsinnlit, sum eru ásettar í fyrisitingarlógini. Klagur frá borgarum hava tí í mestan mun snúð seg innlit í mál, sum borgarin hevur ein persónligan áhuga í, herundir mál, sum líkjast eins egna, soleiðis at borgarin fær møguleika fyri at kanna siðvenjuna hjá einum myndugleika í ávísum málum.

Av hagtølum, sum framganga av ársfrágreiðingum hjá umboðsmanninum, hevur tendensurin av innkomnum klagum um innlit verið vaksandi, tó at talan er um smá tøl. Tað er tí ringt at meta um gongdina, herundir um myndugleikarnir eru vorðnir meira kringir í at nýta lógina og veita innlit.

# Journalisering

**Gurið Joensen,** ráðgevi (2018)

*Skyldan at journalisera er staðfest í góðum fyrisitingarsiði og fylgir óbeinleiðis av reglunum um innlit og reglunum um almenn savnindi.*

Ein journalskipan er ætlað sum amboð til at skráseta, skjalprógva og stýra fyrisitingarligu uppgávuloysnunum hjá almennum stovnum. Avgerandi fyri, um ein almennur stovnur hevur gott skil á sínum virksemi, er, at stovnurin hevur eina journalskipan, sum er greitt uppbygd og vælrøkt. Er journaliseringin ikki nøktandi, er vandi fyri, at myndugleikin skal nýta eyka orku til eitt nú at at leita eftir málum og skjølum, og kanska endurskapa burturkomin (mist og strikað) skjøl. Samstundis gerst málsviðgerðin bæði truplari og ótryggari av hesum, og kann hetta ganga út yvir rættartrygdina hjá borgarunum.

## Almennur myndugleiki hevur skyldu at journalisera

Hóast tað ikki er nøkur beinleiðis lógaráseting, ið áleggur almennum myndugleikum at journalisera sínar upplýsingar og skjøl, so hava almennir myndugleikar skyldu at journalisera. Skyldan at journalisera er staðfest í góðum fyrisitingarsiði og fylgir óbeinleiðis av reglunum um innlit og reglunum um almenn savnindi. Notatskyldan í innlitslógini, sum áleggur almennum myndugleikum at skjalfesta munnligar upplýsingar av týdningi fyri eitt avgerðarmál, vísir eisini óbeinleiðis á týdningin av, at ein myndugleiki á skrivligum grundarlagi kann skjalfesta allar týðandi upplýsingar í einum máli.

Í Danmark varð journaliseringsskyldan ásett við lóg tann 1. januar 2014. Hetta varð gjørt við eini broyting í donsku lógini um innlit, og endamálið var fyrst og fremst at styðja uppundir almennisgrundregluna (offentlighedsprincipet)

## Endamál

Endamálið við journalisering kann í høvuðsheitum sigast at vera:

- At eyðmerkja skjøl hjá myndugleikum,
- At lætta um málsviðgerðina hjá myndugleikanum, so tað verður skjótt og lætt at finna skjøl og mál og fáa yvirlit yvir egna siðvenju,
- At handfara innlitsumbønir,
- At skjalfesta og skjalprógva nær inn- og útgangandi postur er sendur ella móttikin, fyri at prógva avgerðir hjá myndugleikanum, og fyri at myndugleikin óheftur av minninum hjá ítøkiligum málsviðgera hevur yvirlit í einum máli,
- At hava eftirlit, so tað er skjótt og lætt hjá eftirlitsmyndugleikum, kærumyndugleikum, grannskoðan v.m. at fremja eftirlit og gjøgnumgongd av málsviðgerðini, og
- At savna upplýsingarnar, so skjøl ikki fara fyri skeytið og tí ikki kunnu latast savnsmyndugleikum.

Í stuttum kann endamálið við journalisering sigast at vera ein hjálp og amboð hjá stovninum sjálvum, borgaranum og komandi ættarliðum.

Í máli LUM 17/00081 viðvíkjandi klagu um drúgva málsviðgerðartíð hjá Umhvørvisstovuni viðmerkti umboðsmaðurin m.a. at av tí, at gongdin í málinum ikki var nøktandi skjalfest, kundi umboðsmaðurin ikki meta um, í hvønn mun tað vóru umberandi orsøkir til drúgvu málsviðgerðartíðina.

Í máli LUM 15/00146 sum snúði seg um viðgerðina av eini innlitsumbøn í eitt byggimál hjá Tórshavnar kommunu, varð journaliseringin og handfaringin av innlitsumbønini grundin til, at umboðsmaðurin viðmerkti, at viðgerðin hjá kommununi varð framd á slíkan hátt, at tað var ógjørligt hjá umsøkjaranum at síggja, at hann ikki hevði fingið innlit í øll skjøl í málinum.

## Mannagongdir

Almennir myndugleikar eiga at gera greiðar mannagongdir fyri journaliseringina á stovninum. Journaliseringin skal tryggja skráseting av málum og skjølum, so til ber at eyðmerkja eitt mál og skjølini í málinum. Mannagongdirnar eiga tí á nóg góðan hátt at tryggja, at framferðarhátturin í sambandi við journalisering er skipaður soleiðis, at tað til eina og hvørja tíð er lætt at finna fram til ítøkilig mál og skjøl herundir eisini í sambandi við skjalasavnindi.

Í mannagongdini fyri journaliseringina eigur m.a. at vera tikin støða til, hvussu einstøku málini verða skrásett sambært innihaldi, hvørji skjalasløg (t.e. brøv, teldupostar, notatir, fundarfrágreiðingar v.m.) skulu journaliserast, hvussu tey skulu eyðmerkjast, og nær tey skulu journaliserast.

Sambært lógini um skjalasøvn (Løgtingslóg nr. 49 frá

28. apríl 1992 um skjalasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 30. apríl 2018) hevur almennur stovnur undir eftirliti av Tjóðskjalasavninum ábyrgd fyri, at skjalasavnið verður nøktandi bygt upp og varðveitt. Nýggjar journal- og skjalasavnsskipanir, og broytingar í hesum, við vegleiðing og reglum um mannagongdir, skulu sendast Tjóðskjalasavninum til góðkenningar, áðrenn tær verða tiknar í nýtslu.

## Hvat skal journaliserast?

Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur ein myndugleiki at journalisera inn– og útgangandi post, tá skjalið hevur týdning fyri eitt mál ella málsviðgerðina sum heild. Tað eru bæði skriv í pappírsformi og teldubrøv v.m. sum í hesum sambandi er at meta sum inn – og útgangandi postur. At skjalið skal hava týdning fyri málið og málsviðgerðina merkir, at skjalið skal hava týdning fyri innihaldsliga partin av einum máli ella hava týdning sum skjalprógv.

Innanhýsis skjalatilfar í endaligum líki, sum er gjørt í samband við málsviðgerðina í einum mál, og sum hevur týdning fyri málið ella málsviðgerðina, skal eisini journaliserast. Hetta er eisini galdandi fyri skjøl, sum eru skrivað fyri at yvirhalda notatskylduna, sum til dømis telefonnotat, fundarnotat og notat um metingar í einum máli. Dømi um skjøl og teldupostar, sum skulu journaliserast eru: umsóknir, ískoytisskjøl til nýtslu fyri metingina hjá myndugleikanum, kvittanarskriv, svar uppá áheitanir og avgerðir v.m. Dømi uppá skriv ella teldupostar, sum ikki koma undir journaliseringsskylduna eru: tíðindabløð, lýsingartilfar, váttan um, hvar fundur skal vera v.m., ella annað tilfar, sum ikki er partur av málsviðgerð hjá stovninum.

Í avgerðarmálum, har myndugleikin fær munnligar upplýsingar, sum eru við til at lýsa próvgrundaralagið í málinum ella sum er við til at greiða fatanina av faktisku umstøðunum í málinum, skal myndugleikin sambært § 6 í lógini um alment innlit skriva upp hesar upplýsingar. Notatskyldan fevnir bert um upplýsingar, sum ikki longu framganga av skjølunum í málinum. Slík notat skulu journaliserast.

Sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur ein myndugleiki eisini at gera notat um avgreiðslu, sum er av munandi týdningi fyri viðgerðina av einum avgerðarmáli, um hendan upplýsing annars ikki framgongur av skjølunum. Hesi notat skulu eisini journaliserast. Endamálið við hesum er, at onnur enn málsviðgerðin skal kunna skapa sær yvirlit yvir málsgongdina og samanhangin í málinum og fylgja avgerðartilgongdini og hendingunum í málsgongdini.

Í grein í ársfrágreiðingini hjá LUM frá 2015 er undir heitinum „at skriva ella ikki“ og við tilvísing til mál LUM 14/00007 víst á týdningin av at skjalfesta grundarlagið fyri eini avgerð t.d. við einum notati, eisini um avgerðin er fráboðað munnliga.

## Nær skulu skjøl journaliserast?

Sambært góðum fyrisitingarsiði skulu myndugleikar gera eina skipaða og leypandi journalisering av inn– og útgangandi posti.

Inngangandi skjøl eiga sum meginregla at verða journaliserað beinanvegin við móttøku t.e. sama dag ella 1. arbeiðsdag eftir, og áðrenn skjølini vera latin víðari til málsavgreiðslu.

Útgangandi skjøl eiga sum meginregla at vera journaliserað beinanvegin, eftir at tey eru send t.e. sama dag ella 1. arbeiðsdag eftir. Í málinum LUM 18/00070, viðmerkti umboðsmaðurin m.a., at tað varð ikki nøktandi, at Klaksvíkar kommuna ikki sendi eitt skriv, sum var dagfest 17. sept. 2018, fyrr enn 28. sept. 2018, tí dagfesting og avgreiðsla av einum skrivi eiga sum útgangsstøði at verða sama dag, og tá tað ikki ber til so dag um dag. Í hesum føri, har tað gingu 11 dagar frá dagfestingini til avgreiðslu, átti kommunan at broytt dagfestingina á skrivinum, áðrenn tað varð sent.

Tað er tó góðtikið, at í ávísum førum kann journaliseringini verða seinni. Hetta er tá treytað av, at talan er um eitt mál, sum ikki beinleiðis fevnir um nakran borgara, og at hetta ikki setur til viks galdandi reglur, herundir reglunar um innlit, og at tað annars verður tryggjað, at myndugleikin í tíðarskeiðinum eftir at hava móttikið skjalið og inntil journalseringina, hevur yvirlit yvir skjølini í málinum, hvar tey eru og hevur óavmarkað rætt til at ráða yvir skjalið.

Tá tað kemur til innanhýsis skjalatilfar sum notatir og upprit v.m., so eigur tað at vera journaliserað, tá tað er endaligt. Notat gjørd fyri at lúka notatskylduna eiga at verða skrivað og journaliserað sum skjótast, tá myndugleikin hevur móttikið tær viðkomandi upplýsingar, sum viðførdu notatið. Í undantaksføri kunnu uppskot til notat ella fundarfrágreiðing hava týdning fyri eitt mál, hóast notatið ella frágreiðingin ikki er endalig. Í slíkum føri skal uppskotið eisini journaliserast.

## Rættingar, strikingar og burturbeining

Lógin um skjalasøvn og tilhoyrandi kunngerð áseta, at allar tær upplýsingar, sum ein almennur myndugleiki savnar í sambandi við virksemi sítt, bæði í pappírsformi og elektroniskum líki skulu goymast og varðveitast við

tí endamáli at verja rættin hjá komandi ættarliðum til upplýsingar og gransking. Men myndugleikin skal eisini gera tiltøk soleiðis, at tað ber til at vraka savnindi, ið ikki eiga av verða varðveitt fyri eftirtíðina.

Journal – og skjalasavnsskipanir hjá stovnunum eiga at vera skipaðar soleiðis, at til ber at tryggja skjøl, sum skulu varðveitast, men samstundis vraka savnindi v.m., ið ikki skulu varðveitast sambært skjalasavnslógini. Ikki er loyvt at beina burtur savnindi hjá almennum stovnum uttan loyvi frá Tjóðskjalasavninum.

Eitt mál ella eitt skjal, sum er skrásett í eini í journalskipan, eigur ikki at verða strikað ella burturbeint, uttan at talan er um beinleiðis feilskráseting, t.d. at skjalið er skrásett í skeivum máli, ella at talan er um heimilaða vraking, til dømis burturbeining í samband við fyrning av málum, ella tá skølini ikki hava ein rættarligan ella fyrisitingarligan týdning longur.

Hevur ein almennur myndugleiki skrásett persónsupplýsingar, skal myndugleikin hava fyrilit fyri, at persónsupplýsingarnar verða varðveittar soleiðis, at ikki er gjørligt at eyðmerkja borgaran longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.

Inniheldur eitt skrásett skjal upplýsingar, sum ein borgari krevur strikaðar, tí tær eru skeivar, ella tí viðkomandi ikki ynskir, at hetta er skrásett í málinum, kunnu hesar sum útgangsstøði ikki vera strikaðar, men eiga at verða rættaðar á slíkan hátt, at tað í málinum greitt sæst, at upplýsingin er afturvíst, so hesi viðurskifti ikki kunnu føra til feiltulking ella feilviðgerð seinni.

Er talan um persónsupplýsingar er í lógini um persónsupplýsingar ásett, at myndugleikin sum viðger persónsupplýsingar skal tryggja, at hesar eru beinar og verða nøktandi dagførdar. Er talan um persónsupplýsingar, sum eru rangar ella villleiðandi, skulu hesar sum skjótast verða rættaðar ella strikaðar.

# Málsviðgerðartíð

**Gurið Joensen,** ráðgevi (2017)

*Málsviðgerðartíðin hjá almennum myndugleikum er ofta avgerandi fyri, um borgarar eru nøgdir við myndugleikan.*

Long málsviðgerðartíð kann hava bæði fíggjarligar og persónligar avleiðingar fyri viðkomandi borgara.

Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur almennu myndugleiki at hava skipað arbeiðsgongdirnar soleiðis, at málsviðgerðin ikki gerst óneyðuga drúgv.

## Lógarásetingar og mál fyri málsviðgerðartíðina

Tað er av stórum týdningi, at almennir myndugleikar leggja dent á sína viðgerðartíð og javnan meta um, hvørt hon er nøktandi ella kann styttast.

Í fyrisitingarlógini eru ongar almennar reglur um málsviðgerðartíðina hjá myndugleikunum. Men sambært góðum fyrisitingarsiði skulu mál altíð viðgerast innan rímiliga tíð, og viðgerðin má ikki gerast ov langdrigin. Á ymiskum lógarøkjum eru ásettar serligar freistir fyri málsviðgerðini. Hetta er eitt nú galdandi fyri mál um innlit. Almenna umsitingin eigur at halda slíkar lógarásettar freistir.

Um eitt mál ikki kann avgreiðast innan hóskandi tíð, ella málsviðgerðartíðin gerst drúgvari, enn vanligt er, eigur myndugleikin at kunna borgaran um orsøkina til seinkanina, og nær tað kann væntast, at málið verður avgreitt.

Ein væl skipað arbeiðsgongd og raðfestingar, eitt nú eftir málslagi ella hvussu fjøltáttað málið er, eru oftast fortreytin fyri, at almennir myndugleikar kunnu viðgera og avgera flestu av sínum málum við neyðugum skjótleika.

## Rímilig málsviðgerðartíð

Har tað ikki eru lógarásettar freistir fyri málsviðgerðini, ber ikki til alment at siga, nær ein máls-viðgerðartíð er hóskandi ella ov drúgv, tí metingin av um málsviðgerðartíðin er ov drúgv, má gerast út frá umstøðunum í tí ítøkiliga málinum. Hóast hetta, so eiga almennir myndugleikar at seta sær mál fyri, hvussu skjót málsviðgerðartíðin á teirra øki skal vera í mun til tey sløg av málum, ið myndugleikin umsitur. Almenna umsitingin má í hesum sambandi taka atlit til, at tað fyri borgarar kann hava týdning, at ávís sløg av málum fáa skjótari viðgerð enn onnur sløg av málum, og at tað eisini er ymiskt, hvussu tíðarkrevjandi málsviðgerð myndugleikin kann seta í verk upp á ymisku sløgini av málum.

At ein almennur myndugleiki ikki hevur arbeiðsorku til at halda eina rímiliga viðgerðartíð, ella at viðgerðartíðin er drúgv, tí umsitingin hevur móttikið fleiri mál enn væntað, eru viðurskifti, sum subjektivt kunnu verða umberandi orsøk fyri langa viðgerðartíð. Men hetta broytir ikki upp á almennu fatanina av, hvat er rímilig og nøktandi viðgerðartíð fyri økið.

Um umsitingin má seta viðgerðina í einum máli í bíðistøðu eina tíð, eitt nú tí neyðugt er at fáa upplýsingar til vega, sum lýsa málið nøktandi, ella tí umsitingin má bíða eftir einum hoyringarsvari, kann hetta gera, at málsviðgerðartíðin gerst longri enn upprunaliga ætlað. At viðgerðartíðin undir slíkum umstøðum gerst drúgv, mugu borgarar sum høvuðsregla góðtaka. Í slíkum førum eigur myndugleikin at kunna borgaran um bíðistøðuna og grundina fyri henni.

## Kunning til partarnar í málinum

Best er at almennur myndugleiki kunnar alment um væntaðu viðgerðartíðina á sínum øki. Hetta kann eitt nú gerast á heimasíðu stovnsins og við at myndugleikin í síni móttøkuváttan kunnar um, hvussu long vanliga málsviðgerðartíðin er á viðkomandi øki.

Kann myndugleikin ikki halda væntaðu viðgerðartíðina, eigur hann at kunna borgaran um støðuna, hvør grundin er til seinkanina og nær væntast kann, at málið verður avgreitt.

Um borgari rykkir eftir svari upp á sítt mál, tí viðgerðin dregur út, eigur myndugleikin at svara rykkjaranum beinanvegin.

## Aðrar góðar viðgerðarmannagongdir

Góðar mannagongdir fyri málsviðgerðini eru ofta fortreytin fyri at kunna viðgera og avgera mál við hóskandi skjótleika.

Almennur myndugleiki hevur skyldu til at skipa eina arbeiðsgongd, sum tekur atlit til góðan fyrisitingarsið, herundir at almenn málsviðgerð skal vera so einføld, skjót og fíggjarliga tilsíggin sum gjørligt, og at viðgerðin ikki verður seinkað av óneyðugari formalismu, eitt nú við at fremja óneyðugar hoyringar ella útvega óneyðugar upplýsingar.

Í kravinum um, at ein almennur myndugleiki skal taka fíggjarligt atlit í síni málsviðgerð, liggur ikki bert eitt krav um at vera fíggjarliga tilsíggin, men eisini, at myndugleikin skal taka atlit til, hvønn fíggjarligan týdning tað hevur fyri borgaran, at málið verður avgreitt beinanvegin ella innan ávísa freist.

Myndugleikin kann, tá málið byrjar, gera eina skjóta gjøgnumgongd av málinum fyri at staðfesta, um myndugleikin er rætti myndugleiki at viðgera málið, um málið hastar ella ikki, og um málið er torgreitt ella einkult at avgreiða. Um myndugleikin leggur málsviðgerðina til rættis eftir hesi kanning av málum, skuldi myndugleikin havt møguleika fyri at skapa eina góða og skjóta viðgerðarmannagongd.

## Avleiðingar av langari málsviðgerðartíð

Ov drúgv málsviðgerðartíð gongur fyrst og fremst út yvir viðkomandi borgara. Harnæst skalar ov drúgv málsviðgerðartíð álitið á almennu umsitingina og kann føra til negativu umtalu av myndugleikanum.

Almennur myndugleiki kann eisini fáa átalu frá Løgtingsins umboðsmanni fyri ov langa viðgerðartíð.

Í ringasta føri kann ov drúgv málsviðgerð føra til, at almenni myndugleikin kann ábyrgdast eftir vanligum endurgjaldsreglum. Ein ítøkilig meting av, um treytirnar fyri ábyrgd og endurgjaldi eru loknar, eru avgerandi fyri, um almenni myndugleikin skal rinda endurgjald sum fylgja av ov drúgvari málsviðgerð.

## Løgtingsins umboðsmaður

Løgtingsins umboðsmaður hevur í fleiri málum viðgjørt spurningin um málsviðgerðartíð. Vísast kann eitt nú á hesi mál :

### LUM 16/00123 : Drúgv málsviðgerðartíð av áheitan um innlit

Í hesum klagumáli hevði Hvalbiar kommuna beinanvegin boðað klagaranum frá, at innlitsáheitanin frá honum fór at verða avgreidd tvær vikur seinni, men hóast hetta og fleiri áminningar frá klagaranum, tók tað kommununi meginpartin av einum ári at avgreiða innlitsáheitanina. Umboðsmaðurin metti, at hvørki vavið á skjølunum ella umstøðurnar í málinum kundu umbera, at tað tók kommununi so drúgva tíð at avgreiða innlitsáheitanina.

Umboðsmaðurin gav kommununi eina álvarsliga átalu fyri at lata innlitsáheitanina liggja óavgreidda meginpartin av einum ári.

### LUM 201400040) Drál við at ummæla eina kæru

Klagan snúði seg um, um at Heilsutrygd drálaði við at ummæla eina kæru, sum var send Kæru-nevndini í almanna- og heilsumálum.

Hóast fleiri áminningar lá áheitanin frá Føroya Kærustovni um eitt kærumál óviðgjørt hjá Heilsutrygd í 5 mánaðir. Hetta helt umboðsmaðurin vera átaluvert. Av tí at Heilsutrygd hevði svarað Kærustovninum, eftir at umboðsmaðurin hevði kunnað Heilsutrygd um klaguna, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

### LUM 201100058 Drúgv málsviðgerðartíð av einum heimvístum kærumáli

Klagumálið snúði seg um málsviðgerðartíðina hjá Umhvørvisstovuni av einum máli, sum Kærunevndin í lendismálum hevði heimvíst til nýggja viðgerð. Umboðsmaðurin hevði ongar viðmerkingar til málsviðgerðartíðini, tí sambært frágreiðingini frá Umhvørvisstovuni varð langa málsviðgerðartíðin grundað á, at talan var um mál, sum var fordømisskapandi, og at málsviðgerin varð neyðug, fyri at málið kundi verða upplýst til fulnar. Hinvegin helt umboðsmaðurin, at tað var brot á góðan fyrisitingarsið, at Umhvørvisstovan ikki svaraði áminninginum frá klagaranum. Umboðsmaðurin gav tí Umhvørvisstovuni eina átalu fyri ikki at hava hildið góðan fyrisitingarsið hesum viðvíkjandi. Harumframt viðmerkti umboðsmaðurin, at sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur Umhvørvisstovan, tá ið málsviðgerðin í einum ítøkiligum máli dregur út, av sínum eintingum, og hóast partarnir ikki hava vent sær til hana, at kunna partarnir í málinum um, at málsviðgerðin vil taka longri tíð enn vanligt, og hvør orsøkin til hetta er.

### LUM 201000025 Drúgv viðgerðartíð í sambandi við útvegan av stovnsplássi

Klagumálið snúði seg um Almannastovuna og manglandi stovnstilboð til eina unga gentu. Um-boðsmaðurin metti, at tann samlaða viðgerðartíðin á Almannastovuni hevði verið alt ov drúgv. Umboðsmaðurin helt tað als ikki vera ein nøktandi arbeiðsgongd innanhýsis á Almannastovuni, at tað gekk so long tíð, áðrenn frágreiðingar og skriv, sum høvdu stóran týdning fyri málið, komu fram til rætta málsviðgera. Umboðsmaðurin viðmerkti, at serliga tá talan var um børn og ung, var tað av stórum týdningi, at viðgerðartíðin varð so stutt sum gjørligt.

Umboðsmaðurin heitti tí á Almannastovuna um skjótast møguligt at gera nakrar greiðar mannagongdir fyri handfaring av slíkum málum, og at lata seg frætta, hvørji stig Almannastovan ætlaði at taka fyri at stytta um málsviðgerðartíðina í slíkum málum.

## LUM 200800078 Klaga um málsviðgerðartíð í kærumáli um uppsøgn

Klagumálið snúði seg um málsviðgerðartíð hjá Innlendismálaráðnum í einum kærumáli um uppsøgn av havnameistara.

Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at Innlendismálaráðið hevði latið kæruna liggja í nærum eitt ár, áðrenn nakað hendi. Hetta hóast advokaturin hjá klagaranum hevði sent fleiri áminningarskriv til ráðið. Fyri umboðsmanninum at síggja, var tað ein avgreiðsluspurningur hjá Innlendismálaráðnum at senda málið til hoyringar hjá kommununi.

Eftir at advokaturin hjá kommununi hevði sent hoyringarskriv og skjøl til Innlendismálaráðið, gingu aftur 10 mánaðar til avgerð varð tikin.

Umboðsmaðurin helt hesa viðgerðartíð vera alt ov langa. Harumframt átalaði umboðsmaðurin, at Innlendismálaráðið ikki hevði svarað advokatinum hjá klagaranum upp á áminningarskriv hansara.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Innlendismálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri óneyðuga longu málsviðgerðartíðina.

## LUM 200800051 Viðvíkjandi drúgvari málsviðgerðartíð av umsókn um skeinkiloyvi:

Klagan snúði seg um drúgva málsviðgerðartíð av umsókn um skeinkiloyvi og vantandi grundgeving fyri, hví umsóknin ikki varð viðgjørd. Tá klagað varð til umboðsmannin, vóru gingnir knappar 9 mánaðir, síðan nevndin byrjaði at viðgera umsóknina. Nevndin vísti á, at viðgerðin av umsóknum um skeinkiloyvi kann taka longri tíð enn gott er, tí tað í høvuðsheitum er upp til umsøkjaran av útvega neyðugu upplýsingarnar. Sambært nevndini komst hetta av, at nevndin hevur avmarkaða orku til hetta.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at tað er greitt, at viðgerðin av eini umsókn kann valdast, um umsøkjarin letur myndugleikanum neyðugar upplýsingar, og vanliga má ein umsøkjari eisini metast at hava ein serligan áhuga í at útvega hesar. Vantar myndugleikanum hinvegin upplýsingar frá umsøkjaranum, er tað skylda myndugleikans at vegleiða um, hvørjar vanta, og hvussu tær kunnu útvegast.

Sambært nevndarfrágreiðing frá fundi 4. okt. 2007 tørvaði nevndini nærri upplýsingar um møgulig revsiverd viðurskifti hjá umsøkjaranum fyri at kunna halda áfram við viðgerðini. Tað framgekk tó hvørki av skjølunum í málinum ella av frágreiðingini frá nevndini, at nevndin hevur biðið umsøkjaran útvegað nevndini upplýsingar um hesi viðurskifti. Umboðsmaðurin helt tí, at viðgerðin dró út, tí nevndin ikki bað um tær upplýsingar, henni tørvaði. Sambært skjølunum sæst einki at henda í málinum, fyrr enn eitt hálvt ár eftir nevndarfundin, tá advokatur umsøkjarans spurdi eftir málinum. Aftaná hetta gingu her umframt knappar tríggir mánaðir aftrat, áðrenn Loyvisnevndin í juni 2008 vendi sær til Føroya Landfúta við fyrispurningi um møgulig revsiverd viðurskifti hjá umsøkjaranum.

Umboðsmaðurin gav Loyvisnevndini eina átalu fyri at lata 9 mánaðir ganga, áðrenn stig vóru tikin til at útvega nevndini vantandi upplýsingarnar.

# Myndugleikahugtakið í fyrisitingarlógini

**Heini Petersen,** , ráðgevi (2020)

*„Innihaldi og vavi av hugtakinum „almenn fyrisiting" í § 1, stk. 1 er avgerandi fyri hvussu vítt nýtsluøkið hjá fyrisitingarrættinum fevnir. Tað vil siga, at áðrenn t.d. hugt verður eftir málsviðgerðarreglum, spurninginum um málsræði, partshugtakinum og avgerðini hjá myndugleikanum, er neyðugt fyrst av øllum at finna útav, um viðkomandi myndugleiki er fevndur av hugtakinum „almenn fyrisiting" og harvið partur av fyrisitingarrættinum."*

Sambært § 1, stk. 1 í fyrisitingarlógini, løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg, er lógin galdandi fyri allar partar av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum.

§ 1 er soljóðandi:

„§ 1. Lógin er galdandi fyri allar partar av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum.

Stk. 2. Lógin er eisini galdandi fyri interkommunalar felagsskapir.

Stk. 3. Landsstýrið kann áseta, at lógin heilt ella fyri ein part skal verða galdandi fyri nærri ásett feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið ikki kunnu roknast við til almennu fyrisitingina. Hetta er tó bert galdandi um so er, at útreiðslurnar av teirra virksemi í høvuðsheitunum verða rindaðar av landi ella kommunu, ella í tann mun tey við ella við heimild í lóg hava fingið heimild til at taka avgerð vegna land ella kommunu. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um varðveitslu av skjølum v.m. og um tagnarskyldu."

Fyrisitingarlógin er í høvuðsheitum ein føroysk útgáva av donsku fyrisitingarlógini frá 1985, LOV nr 571 af 19/12/1985, ið tá var galdandi. Ongar viðmerkingar eru til føroysku lógina, og tí eru donsku viðmerkingarnar somuleiðis galdandi fyri ta føroysku lógina.

Innihaldið og vavið av hugtakinum „almenn fyrisiting" í § 1, stk. 1 er avgerandi fyri, hvussu vítt nýtsluøkið hjá fyrisitingarrættinum fevnir. Tað vil siga, at áðrenn t.d. hugt verður eftir málsviðgerðarreglum, spurninginum um málsræði, partshugtakinum og avgerðini hjá myndugleikanum, er neyðugt fyrst av øllum at finna útav, um viðkomandi myndugleiki er fevndur av hugtakinum „almenn fyrisiting" og harvið partur av fyrisitingarrættinum.

Fyrisitingarrætturin eru tær rættarreglur, ið eitt nú eru skipaðar í fyrisitingarlógini og innlitslógini, løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, og teimum óskrivaðu rættarmeginreglunum, ið eru galdandi fyri almennu fyrisitingina, so sum lutfalsmeginreglan (da. proportionalitetsprincippet), líkareglan (da. lighedsprincippet) og skyldan at lýsa eitt mál (da. officialprincippet).

Sambært viðmerkingunum til § 1, stk. 1 og 2 í fyrisitingarlógini fevnir hugtakið „almenn fyrisiting" um landsfyrisitingina, kommunalu fyrisitingina og eisini um fyrisitingarmyndugleikar, ið ikki kunnu sigast at hoyra til teir vanligu fyrisitingarmyndugleikarnar, serstakliga nevndir og ráð. Harafturat er lógin galdandi fyri interkommunalar stovnar so sum SEV og IRF.

Hugtakið „almenn fyrisiting" verður fatað á sama hátt í innlitslógini, løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, og í umboðsmanslógini, løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann.

Til tess at gera av um ein stovnur kann rúmast innanfyri karmin av § 1, stk. 1 og 2, verður hugtakið „almenn fyrisiting" sum meginregla greina innihaldsliga á tann hátt, at dentur verður lagdur á eitt sokallað formligt eyðkenni (da. formelt kriterium). Formligt eyðkenni merkir, at hugt verður eftir um stovnurin antin er skipaður við lóg ella privatum fyritakssemi, um stovnurin fyriskipanarliga er staðsettur yvir ella undir einum øðrum fyrisitingarligum myndugleika, um rakstur stovnsins antin er fíggjaður við almennari játtan ella privatum peningi, og um tað við lóg eru ásettar reglur um nýtsluna av játtaðum peningi.

Sum viðmerkingarnar til § 1, stk. 1 og 2 í fyrisitingarlógini vísa, so verður hugtakið „almenn fyrisiting" greinað sum teir stovnar, ið hava útinnandi vald. Hugtakið „almenn fyrisiting" hongur tí neyvt saman við § 1 í stýrisskipanarlógini, løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya:

„§ 1. Í yvirtiknum málum er lóggávuvaldið hjá løgtinginum og løgmanni í felag. Útinnandi valdið er hjá landsstýrinum. Dómsvaldið er hjá dómsstólunum."

§ 1 í stýriskipanarlógini er ein inngangur (da. præambel) til lógina og samsvarar við § 3 í Grundlógini, lov nr. 169 af 5. juni 1953 om Danmarks Riges Grundlov:

„§ 3. Den lovgivende magt er hos kongen og folketinget i forening. Den udøvende magt er hos kongen. Den dømmende magt er hos domstolene.“

Eins og § 3 í Grundlógini, er § 1 í stýriskipanarlógini grundað á sonevndu valdsbýtislæruna, ið er hugsanin um, at valdið hjá stjórnarvaldinum kann býtast sundir í tríggjar partar: lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið.

Sambært valdsbýtislæruni fevnir hugtakið „almenn fyrsiting“ sostatt ikki um lóggávuvaldið og dómsvaldið. Lóggávuvaldið er Løgtingið og teir stovnar, ið knýttir eru at Løgtinginum, ið er Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður. Dómsvaldið eru dómstólarnir, m.a. Føroya Rættur.

Kommunusamstørv sambært § 51 í Kommunustýrislógini, løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, ið landsstýrismaðurin skal góðkenna, eru fevnd av hugtakinum „almenn fyrisiting“, uttan mun til hvussu samstarvi annars er skipað. Dømi um slík samstørv eru kommunalu samstørvini um tilbúgving, ið skipað eru í Tilbúgvingarlógini, løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving.

Sum meginregla eru stovnar, felagskapir v.m., ið eru stovnaðir á privatrættarligum grundarlagi ikki fevndir av hugtakinum „almenn fyrisiting“. Hetta er uttan mun til um virksemi, ið verður útint, í roynd og veru svarar til virksemi, ið vanliga verður útint av almennu fyrisitingini. Orsøkin er nevniliga omanfyrinevnda formliga eyðkenni, sum í høvuðsheitum er avgerandi fyri, um ein stovnur, felagsskapur v.m. kann metast sum partur av almennu fyrisitingini.
Almenn partafeløg eru í hesum høpi sum meginregla ikki fevnd av hugtakinum, hetta er uttan mun til um almenni ognarrætturin í partafelagnum er heilur ella lutvísur. Almenn partafeløg eru eyðkend við einum sokallaðum armslongdarmeginreglu, har tað almenna ikki førir eitt skipað og neyvt alment eftirlit við virkseminum hjá partafelagnum. Dømi um slík partafeløg eru P/F Postverk Føroya og P/F Atlantic Airways.

Sum undantak til meginregluna um, at stovnar, felagskapir v.m., ið eru stovnaðir á privatrættarligum grundarlagi, ikki eru partur av hugtakinum „almenn fyrisiting“, eru stovnar, felagskapir v.m., ið útinna umfatandi alment virksemi, og ið samstundis eru undir einum skipaðum og neyvum almennum eftirliti.

Í Danmark er nú beinleiðis ásett í § 1, stk. 2 í fyristingarlógini, LBK nr 433 af 22/04/2014, at stovnar, felagskapir v.m. eru fevndir av hugtakinum „almenn fyrisiting“, um stovnurin, felagsskapurin v.m. er skipaður við lóg ella er undir neyvum almennum eftirliti og fyriskipan. Talan er um lógfesting av galdandi rætti, tí sum nevnt omanfyri, so eru hesir longu frammanundan fevndir av hugtakinum „almenn fyrisiting“. Løgfestingin hevur tó týdning, tí hon varpar ljós á markasetingina og sambandið millum almannarættin og privatrættin við atliti at hugtakinum „almenn fyrisiting“.

Eitt øki, ið hevur stovnar, ið virka á privatrættarligum grundarlagi, er almannaøkið. Hesir stovnar, ið eru sjálvsognarstovnar, fremja sosialfakligt virksemi, ið er meinlíkt tí virksemi, ið Almannaverki fremur. Sjálvsognarstovnarnir hava í ávísan mun síni viðurskifti skipaði í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, men ásett er ikki formliga, at hesir eru fevndir av fyrisitingarrættinum í sjálvum sær.

Sambært § 1, stk. 3 í fyrisitingarlógini kann landsstýrið, t.v.s. viðkomandi landsstýrismaður, áseta reglur um, at fyrisitingarlógin heilt ella lutvíst skal verða galdandi fyri stovnar, felagsskapir v.m., ið ikki kunnu roknast við til almennu fyrisitingina. Treytin fyri hesum er, at útreiðslurnar av virkseminum hjá einum stovni, felagsskapi v.m. í høvuðsheitunum verður rindað av landi ella kommunu ella um ásett er við lóg, at stovnurin, felagsskapurin v.m. við heimild í lóg kann taka bindandi avgerðir, ið eru galdandi fyri einstaklingar. Heimildin í § 1, stk. 3 er tó ongantíð nýtt enn.

Í máli *LUM 200400023* viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um noktan av innliti í innanhýsis arbeiðsskjal hjá Føroya Barnaheimi. Í sambandi við klaguna viðgjørdi umboðsmaðurin, um stovnurin kundi metast sum partur av almennu fyrisitingini og virkisøkinum hjá umboðsmanninum. Umboðsmaðurin vísti á, at Føroya Barnaheim, sum sjálvsognarstovnur, var góðkendur sambært § 32, stk. 1 í tágaldandi Barnaforsorgarlógini, lovbekendtgørelse nr. 104 af 2. marts 1988 om børneforsorg. Umboðsmaðurin metti, at virksemið hjá stovninum skuldi metast sum ein almenn uppgáva, ið var undir neyvum almennum eftirliti. Føroya Barnaheim var tískil mett at vera fevnt av almennu fyrisitingini og fyrisitingarlógini.
Málið vísti, at hóast talan var um ein privatrættarligan sjálvsognarstovn, so var stovnurin fevndur av hugtakinum „almenn fyrisiting“ sambært § 1, stk. 1 í fyrisitingarlógini, tí stovnurin útinti umfatandi alment virksemi og harafturat var undir neyvum almennum eftirliti.

Í máli *LUM 200500008* viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um setan av leiðara fyri Listasavn Føroya. Áðrenn

umboðsmaðurin tók støðu til innihaldið í klaguni, kannaði umboðsmaðurin um virksemi hjá Listasavni Føroya var soleiðis háttað, at stovnurin kundi metast sum partur av almennu fyrisitingini, og partur av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

Umboðsmaðurin metti ikki, at Listasavn Føroya var fevnt av almennu fyrisitingini. Hesa fatan grundaði hann á, at Listasavn Føroya er ein sjálvsognarstovnur, og at í viðtøkunum fyri stovnin sást, at ávirkanin hjá landsstýrismanninum, umframt at velja formannin í stýrinum, var avmarkað til, hvat skuldi henda í sambandi við eina møguliga avtøku av stovninum. Umboðsmaðurin viðgjørdi av hesum ávum ikki klaguna innihaldsliga.

Málið vísti, at Listasavn Føroya útinti umfatandi alment virksemi, men var sambært umboðsmanninum ikki undir einum skipaðum og neyvum almennum eftirliti. Tískil var Listasavn Føroya ikki partur av hugtakinum „almenn fyrisiting" sambært § 1, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Viðgerðin av málinum varð grundað á viðtøkurnar fyri Listasavn Føroya, ið vóru samtyktar í 2002. Viðtøkurnar, sum í dag eru galdandi, eru tær, ið vóru samtyktar í 2016. Tó at viðtøkurnar eru broyttar, er tað ikki greitt, um broytingarnar ítøkiliga hava ávirkan á metingina av sjálvsognarstovninum sum part av hugtakinum „almenn fyrisiting". Tó er greitt, at í mun til hvussu raksturin av Listasavni Føroya er skipaður, er heimild í § 1, stk. 3 í fyrisitingarlógini fyri, at ásett verður, at Listasavn Føroya er fevnt av fyrisitingarlógini.

Í máli *LUM 20/00056* viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um, hvørjar heimildir Økisnavn.fo hevur at krevja inn gjald fyri tær tænastur, ið stovnurin veitir. Áðrenn umboðsmaðurin kundi taka støðu til avgerðina, ið Økisnavn.fo hevði tikið, og ið klagan snúði seg um, var neyðugt hjá umboðsmanninum at finna útav, um Økisnavn.fo kundi metast sum partur av almennu fyrisitingini.

Í hesum sambandi gav Umhvørvis- og vinnumálaráðið umboðsmanninum eina frágreiðing um málið, har niðurstøðan hjá ráðnum var, at Økisnavn.fo ikki kundi metast sum partur av almennu fyrisitingini. Ráðið legði dent á, at landsstýrismaðurin ikki hevði eitt skipað og neyvt alment eftirlit við stovninum, og at stovnurin, ið er stovnaður sum ein sjálvsognarstovnur, ikki er stovnaður við lóg, ikki er fíggjaður av almennari játtan, og at tað ikki við lóg eru ásettar reglur um nýtsluna av játtaðum peningi.

Umboðsmaðurin tók undir við frágreiðingini hjá ráðnum og viðgjørdi tískil ikki klaguna innihaldsliga.

Umboðsmaðurin mælti tó til, at ráðið fór undir at kanna nærri, um Økisnavn.fo eigur at verða skipað í lóggávu.

Umboðsmaðurin grundaði sítt tilmæli á, at alsamt fleiri týðandi tættir í samfelagnum nú verða viðgjørdir umvegis internetið og internet-økisnøvn, og at týdningurin av internet-økisnøvnum er eyðsýndur fyri føroyska samfelagið.

Umboðsmaðurin vísti í hesum sambandi á, at danska umsitingin av internet-økisnøvnum, ið føroyska umsitingin m.a. varð grundað á, varð skipað í lóggávu í 2005.

Umboðsmaðurin helt, at ein lóggáva eitt nú kundi skipa almennar reglur kring umsitingina av føroyskum internet-økisnøvnum, ásett neyðug krøv og treytir í mun til KT trygd, ásett reglur um kærumyndugleika og reglur, ið skipa eftirlitið við umsitingini av økisnøvnum.

Málið vísti, at hóast stovnurin ikki hevði neyðuga formliga eyðkenni, sambært § 1, stk. 1 í fyrisitingarlógini, at vera ein partur av hugtakinum „almenn fyrisiting" og ikki kundi rúmast í § 1, stk. 3 í fyrisitingarlógini, so var nógv, ið talaði fyri, at stovnurin átti at havt eina ávísa lógbundna skipan, serliga grundað á samfelagsliga týðandi virksemi, ið stovnurin røkir.

Alment vísti málið eisini, at tað í ávísum førum kann tykjast óskynsamt í mun til rættartrygdina hjá borgarum, at ein stovnur á privatrættarligum grundarlagi útinnir samfelagsliga týðandi virksemi, ið er vent móti borgarum, uttan at fyrisitingarrætturin antin er galdandi ella ásettur at vera galdandi.

Fyri rættartrygdina, hevur rætturin at kæra eina avgerð, ið myndugleikin tekur, skyldan hjá myndugleikanum at lýsa øll mál til fulnar, skyldan at taka avgerðir á sakligum grundarlagi og atliti at regluføstum mannagongdum og gjøgnumskygni týðandi týdning í einum framkomnum rættarsamfelagi.

# Notatskylda

**Sólja í Ólavsstovu,** umboðsmaður (2019)

*Ein myndugleiki eigur at skriva upp innihaldið á øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina, og tá ið eitt setanarmál verður lagt til støðutakan í kommunalari nevnd, eigur eitt tilmæli við grundgevingum at fylgja við, soleiðis at nevndin hevur møguleika fyri at taka støðu til, hvør er best egnaður til starvið (LUM 200700009).*

Eftir innlitslógini hevur ein almennur myndugleiki í øllum málum, har ein avgerð skal takast, skyldu til at notera allar upplýsingar, sum myndugleikin fær munnliga, skrivliga ella á annan hátt. Skyldan umfatar allar upplýsingar um tær veruligu umstøður, sum kunnu hava týdning fyri avgerðina í málinum. Skyldan er eisini galdandi fyri uttanhýsis fakligar metingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum. Notatskyldan er eisini galdandi fyri øll týðandi málsviðgerðarstig, sum verða gjørd í málinum.

## Endamálið við notatskylduni

Notatskyldan skal tryggja, at møguleiki verður fyri at fáa greiðu á, hvat er hent í einum máli, og at møguligt verður at hava eitt munadygt eftirlit við, at myndugleikin hevur viðgjørt málið rætt. Fyrisitingarliga meginreglan um, at avgerðir, sum myndugleikin tekur, eru sakligar og rættar, treytar, at myndugleikin notarar allar upplýsingar og týdningarmikil málsviðgerastig í øllum málum, har avgerð fer at verða tikin.

Notatskyldan er ásett í § 6, stk. 1, sum er soljóðandi:

> § 6. Í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleiki, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, ella sum á annan hátt er kunnugur við sovorðnar upplýsingar, skriva upp innihaldið av teimum. Hetta er tó ikki galdandi, um upplýsingarnar annars síggjast í skjølunum í málinum.

Afturat hesari lógaráløgdu notatskyldu, hevur ein fyrisitingarmyndugleiki eisini eina víðkaða notatskyldu, sum byggir á eina ikki-lógarfesta fyrisitingarliga meginreglu. Hendan skyldan fevnir um at skriva upp innihaldið á øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina. Myndugleikin skal somuleiðis lýsa málið á nøktandi hátt, áðrenn avgerð verður tikin.

## Skjalfesting og eftirlit

Notatskyldan hjálpir til, at tað seinni er gjørligt at skjalprógva, at ein avgerð byggir á saklig atlit (*skjalfestingaratlit*), og at tað verður gjørligt at hava eftirlit við, at myndugleikin hevur viðgjørt málið rætt (*eftirlitsatlit*).

Hesi atlit koma m.a. til sjóndar í máli *LUM 14/00007* har Landssjúkrahúsið hevði noktað fylgjara til sjúkraviðgerð uttanlands. Umboðsmaðurin staðfesti, at myndugleikin ikki hevði skjalfest orsøkina til, at Landssjúkrahúsið hevði noktað eini umbøn um fylgjara í sambandi við sjúkraviðgerð uttanlands(*skjalfestingaratlit*), og tí var tað ikki møguligt hjá Kærunevndini í Almannamálum at viðgera kæruna á nøktandi hátt (*eftirlitsatlit*).

Umboðsmaðurin góðtók ikki umberingina frá Landssjúkrahúsinum um, at tað var ov tungt umsitingarliga at geva sjúklingunum eina skrivliga avgerð. Skyldan til at gera notat um viðurskifti, sum hava týdning fyri avgerðina í einum máli, stendur við, til ein avgerð fyriliggur í málinum. Landssjúkrahúsið hevði sostatt skyldu til í hvørjum einstøkum føri at notera upp orsøkina til, at ein sjúklingur fekk noktað einari umbøn um fylgjara í sambandi við sjúkraviðgerð uttanlands.

Av tí at onki var noterað í einum setanarmáli *LUM 1400038* fekk Umboðsmaðurin ikki eftirkannað, um avgerðin var saklig og røtt. Umboðsmaðurin sá seg ikki føran fyri at meta um, um avgerðin ikki at hava setanarsamrøður var tann rætta, tí onki notat var skrivað frá tí munnliga orðaskifti, sum fór fram millum kommunustýrislimir í sambandi við setanarmálið, og um ta ítøkiligu metingina av førleikum hjá umsøkjarunum. Einki tilmæli var gjørt um, hví mett varð, at tann setti var best egnaður til starvið, og hví kommunan ikki helt tað vera neyðugt at hava setanarsamrøður.

Sama gjørdi seg galdandi í máli *LUM 1600024*. Hóast allir umsøkjararnir vóru til samrøðu viðvíkjandi starvinum, var einki notat skrivað frá samrøðunum. Einki notat var skrivað viðvíkjandi ítøkiligu metingunum av førleikunum hjá umsøkjarunum, og heldur ikki sást nakað tilmæli vera gjørt um, hví mett varð, at tann setti var best egnaður til starvið. Fyri at prógva, at rætti umsøkjari var settur í starv, átti myndugleikin at notera tær metingar, ið vórðu gjørdar undir setanartilgongdini. Hetta fyri at møguleiki var fyri einum munadyggum eftirliti við, at myndugleikin hevði borið seg rætt at, og at málsviðgerðin var farin rætt fram.

Í máli *LUM 200700016* var klagarin ikki boðin til setanarsamrøðu, hóast klagarin leyk øll førleikakrøvini í starvslýsingini. Klagarin var ikki føroyingur av uppruna, men var hetta ikki ein treyt í lýsingini. Hóast klagarin var einasti umsøkjari, sum leyk øll krøvini í lýsingini, var viðkomandi ikki boðin til samrøðu. Setanarmyndugleikin hevði einki notat skrivað, sum lýsti setanartilgongdina; einki notat viðvíkjandi ítøkiligari meting av førleika hjá umsøkjarunum; einki notat um, hvat setanarbólkurin hevur lagt til grund, tá ið bólkurin bert hevur valt at bjóða tveimum umsøkjarum til samrøðu; einki notat frá teimum báðum setanarsamrøðunum; og einki notat um, hví tann eini umsøkjarin varð mettur at verða best egnaður til starvið. Umboðsmaðurin dugdi tí ikki at síggja nakra sakliga grundgeving fyri, at klagarin ikki varð boðin til setanarsamrøðu ella settur í starv. Umboðsmaðurin skilti tí væl, at klagarin segði seg hava varhugan av, at tann veruliga grundgevingin var uppruni klagarans. Umboðsmaðurin heitti á myndugleikan um at taka málið til nýggja viðgerð, tí tann umsøkjarin, sum sambært starvslýsingini tyktist best skikkaði til starvið, ikki varð boðin til setanarsamrøðu, og tí var tað ivasamt, um umsóknin hevði fingið nakra veruliga viðgerð.

Í máli *LUM 18/00044* staðfesti umboðsmaðurin, at týðandi samstarvstrupulleikar vóru á arbeiðsplássinum, og at greitt samband var millum samstarvstrupulleikarnar og klagaran. Út frá skjalatilfarinum var tó ikki greitt, at tað var klagarin, sum var høvuðsatvoldin til, at samstarvstrupulleikarnir tóku seg upp og hildu fram, tí einki var skjalfest í uppritunum um orsøkirnar til ósemjurnar. Heldur ikki var skjalfest í uppritum frá samrøðum, sum klagarin hevði havt við leiðara sín, um talan var um rættleiðandi samrøður, har klagarin fekk ábreiðslur ella munnliga ávaring fyri atburð sín. Ongar upplýsingar vóru í málinum um, at samstarvstrupulleikarnir høvdu týðandi neiliga ávirkan á, hvussu uppgávurnar á arbeiðsplássinum vórðu loystar. Umboðsmaðurin vísti á, at í einum uppsagnarmáli, sum er grundað á samstarvstrupulleikar, er tað týdningarmikið, at skjalfesta fráboðanir og samrøður, sum lýsa orsøkirnar til, at ósemjur koma í, og um samrøðurnar við starvsfólki eru rættleiðandi, og um ábreiðsla ella ávaring verður givin undir samrøðunum. Umboðsmaðurin helt ikki, at myndugleikin kundi prógvað, at tað var klagarin, sum var høvuðsatvoldin til samstarvstrupulleikarnar, og heitti tí á myndugleikan um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

## Ólógarásett rættargrundregla og góður fyrisitingarsiður

Tann formliga notatskyldan er í sínum orðaljóði bara galdandi fyri mál, har myndugleiki fer at taka fyrisitingarrættarliga avgerð, og ikki har myndugleikin ásetir almennar reglur í kunngerð ella rundskrivi, ella tá talan er um veruligt fyrisitingarvirksemi (faktisk forvaltning).

Tað liggur tó í sjálvum hugtøkunum um mál og málsviðgerð og skjøl, sum eru grundleggjandi í fyrisitingarrættinum, at um talan er um eina viðgerð, so eiga málsviðgerastigini, sum hava týdning fyri málið, at vera skjalfest.

Í máli um vantandi loyvi at fiska makrel *LUM 14/00045* dugdi umboðsmaðurin ikki út frá skjølunum í málunum at síggja, hvørji atlit vóru tikin, tá kunngerðin um býtið av makrelkvotuni varð tilevnað. Umboðsmaðurin helt ikki nakað vera til hindurs fyri, at politikarar luttaka í arbeiðinum at tilevna kunngerðir, men vísti á, at bæði politikarar og embætisfólk í hesum arbeiði, eins og í vanligari málsviðgerð, eru bundin at fyrisitingarligum meginreglum um upplýsingarskyldu og sakliga fyrisiting. Umboðsmaðurin helt nógv benda á, at viðgerðin av kvotubýtinum einans hevði verið politisk. Einki notat var skrivað frá fundarvirkseminum hjá bólkinum, sum hevði ásett makrelbýtið, og umboðsmaðurin metti seg tí ikki hava møguleika fyri at siga, um býtið til ymisku skipabólkarnar var grundað á saklig og viðkomandi atlit. Umboðsmaðurin helt tað vera átaluvert, at einki notat var skrivað frá fundum í bólkinum í sambandi við makrelbýtið, og at viðgerðin av makrelbýtinum eftir øllum at døma ikki var farin fram eftir vanligum fyrisitingarrættarligum reglum.

Harumframt áleggur góður fyrisitingarsiður einum myndugleika at skriva upp málsviðgerðarstig, sum hava týdning fyri mál, sjálvt um talan ikki er um eitt avgerðarmál eftir fyrisitingarlógini.

Umboðsmaðurin kom í máli *LUM 18/00071* til ta niðurstøðu í sambandi við, at TAKS setti upp forboðsskeltir fyri mynda- og videoupptøkum í „tollfiltrinum", at talan ikki var um eina fyrisitingarliga avgerð, men um útinning av ræðisrættinum hjá TAKS yvir økinum. Umboðsmaðurin metti tó, at TAKS, sambært góðum fyrisitingarsiði, átti at havt skjalfest samskiftið millum lógardeildina og deildarleiðaran á Tolldeildini, so tað hevði verið lætt at staðfest, nær forboðsskeltini vórðu sett upp, hvat øki forboðið snúði seg um, hvørji atlit vóru grundarlag fyri forboðnum, og um hesi vóru saklig og í samsvari við fyrisitingarligar grundreglur

Í máli *LUM 17/00054* staðfesti umboðsmaðurin, at ein flyting av starvsfólki ikki var ein avgerð í vanligum týdningi, men heldur veruligt fyrisitingarvirksemi, sum ikki var fevnt av notatskylduni í innlitslógini. Hóast hetta helt umboðsmaðurin, at kommunan eftir góðum

fyrisitingarligum siði átti at skrivað upp øll týðandi stig í málinum. Umboðsmaðurin heitti á kommununa um at minnast til at skriva upp allar tær upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri, at býráðið kann taka eina avgerð á fullgóðum grundarlagi.

## Notatskyldan ikki galdandi í ávísum førum

Notatskyldan umfatar ikki fakligar metingarnar hjá starvsfólki um, hvussu avgerðin í einum máli skal loysast. Skyldan er heldur ikki galdandi fyri ta áskoðan ella sannføring eitt starvsfólk hevur til, hvussu avgerðin í einum máli, skal vera.

Harumframt eru tað bara upplýsingar, sum eru viðkomandi og hava týdning fyri eitt mál, sum skulu noterast í málið. Upplýsingar, sum eru at finna í øðrum skjølum o.l. ella sum eru uttan týdning fyri avgerðina í einum máli, eru ikki neyðugar at notera í málið. Upplýsingar, sum einans kunnu ávirka avgerðina á ósakligan hátt, eiga ikki at verða noterað.

Dømi um upplýsingar, sum ikki eiga at verða noterað í eitt mál, sæst í máli *LUM 200500069*. Í hesum ítøkiliga máli hevði Arbeiðsloysisskipanin í einum telefonnotati noterað, at klagarin sambært munnligum upplýsingum frá Toll- og Skattstovu Føroya skuldi vera ein „Ebenesermaður burturav“. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja, at trúarviðurskifti hevði nakran týdning yvirhøvur fyri eitt starv sum málsviðgeri hjá Arbeiðsloysisskipanini. Hendan upplýsing kundi tí einans vera við til at ávirka avgerðina á ósakligan hátt, og átti tí ikki at verið noterað. Harafturat helt umboðsmaðurin ikki, at telefonnotatið leyk tey krøv, ið mugu stillast til slík notat, tvs. at tað framgongur greitt, hvør hevur skrivað notatið, hvønn tosað er við, dagfesting og nær samrøðan hevur verið.

## Avleiðing av at notatskyldan verður brotin

Í tann mun ein fyrisitingarmyndugleiki ikki heldur notatskylduna, kann hetta eftir umstøðunum hava týdning fyri at prógva grundarlagið undir eini avgerð. Tað kann soleiðis verða torført hjá myndugleikanum at lyfta prógvbyrðuna fyri, at ein avgerð er saklig og í samsvari við fyrisitingarrættin.

Úrslitið av hesum kann verða at eftirlitsmyndugleikin antin ógildar avgerðina ella heitur á myndugleikan um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

# Ógegni

**Sólja í Ólavsstovu,** umboðsmaður (2018)

*Avgerandi fyri metingina um ógegni er, um ein persónur hevur eitt slíkt tilknýti til eitt mál ella onkran av pørtunum í málinum, at tað út frá eini almennari meting kann vera ivi um, um viðkomandi kann viðgera málið uttan at taka ósaklig ella óviðkomandi atlit.*

Avgerðir, sum ein almennur myndugleiki tekur, skulu vera sakligar og ikki byggja á ósaklig ella óviðkomandi atlit. Fyri at tryggja, at almenningurin kann hava álit á málsviðgerðini eru í Fyrisitingarlógini í kap. 2 (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg) ásettar reglur um ógegni, soleiðis at ongin, sum hevur persónlig áhugamál í einum máli, kann luttaka í viðgerðini av málinum.

Metingin, um ein persónur er ógegnigur, er objektiv. Tað merkir til dømis, at tað er óviðkomandi, um persónurin sjálvur ella onnur meta, at hann ikki letur seg ávirka av ósakligum atlitum, ella um persónurin í aðramáta kann sigast at hava ein høgan integritet, og at tað tí ikki er sannlíkt, at viðkomandi letur seg ávirka av ósakligum atlitum. Avgerandi fyri metingina um ógegni er, um ein persónur hevur eitt slíkt tilknýti til eitt mál ella onkran av pørtunum í málinum, at tað út frá eini almennari meting kann vera ivi um, um viðkomandi kann viðgera málið uttan at taka ósaklig ella óviðkomandi atlit.

Um ein ógegnigur persónur hevur viðgjørt eitt mál, er talan um ein týðandi feil í málsviðgerðini. Um ein persónur er kunnigur við, at tað eru viðurskifti, sum kunnu gera hann ógegnigan at viðgera eitt mál, skal hann sum skjótast boða leiðara sínum frá hesum, um ikki tað er eyðsæð, at hesi viðurskifti ikki hava týdning. Myndugleikin, sum tekur avgerðina í ítøkiliga málinum, skal taka endaliga støðu til, um persónurin er ógegnigur at viðgera eitt mál.

Ein ógegnigur persónur kann ikki sjálvur taka lut í viðgerðini av spurninginum um ógegni. Hetta merkir, at tá ein partur í einum fyrisitingarligum máli setir spurnartekin við, um ein myndugleikapersónur er ógegnigur, so kann hesin ikki sjálvur vera við til at gera av, um hann er ógegnigur. Tað kann tó vera neyðugt at fáa til vega viðmerkingar frá viðkomandi um veruligu umstøðurnar í málinum. Í teimum førum, har ovasti fyrisitingarligi leiðarin er ógegnigur, er eingin forðing fyri, at embætisfólk hansara viðger ella luttekur í málsviðgerðini, um hetta er neyðugt til tess at tryggja neyðuga kunnleikan fyri at viðgera málið.

## Alment ella ítøkiligt ógegni

Sambært fyrisitingarlógini er ein persónur, sum virkar innan almennu fyrisitingina, ógegnigur, um so er, at viðkomandi sjálvur hevur ein serstakan persónligan ella fíggjarligan áhuga í úrslitinum í málinum. Talan er í slíkum føri um ógegni í ítøkiligum málum. Fyrisitingarlógin hevur onga áseting um alment ógegni, men ein slík áseting er at finna í t.d. kommunustýrislógini (Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003) § 11, stk. 1. Í viðmerkingunum til § 11, stk. 1 í kommunustýrislógini stendur m.a., „at greinin fevnir um generelt gegni ella starvsósambæri“. Sambært hesi áseting verður persónur útihýstur úr fastari nevnd, um so er, at málsøkið hjá tí føstu nevndini fevnir um hansara starvsøki. Ásetingin viðvíkur serliga teimum, ið sita í leiðandi størvum, men eisini starvsfólk, ið kunnu javnmetast við leiðandi starvsfólk – eitt nú tey, ið sita einsamøll á einari deild/øki og tí ongan hava yvir ella undir sær á deildini/økinum.

Í máli *LUM 201400038* kom umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at tað var ivasamt, um skrivarin í Húsavíkar kommunu samstundis kundi vera kommunustýrislimur í kommununi. Skrivarin var einasta starvsfólk á kommunuskrivstovuni, og kundi arbeiðsuppgávurnar hjá skrivaranum javnmetast við tær uppgávur, sum tey starvsfólk røkja, sum sita einsamøll á einum øki og tí ongan hava yvir ella undir sær.

## Persónlig ella fíggjarlig áhugamál

Sambært § 3, stk. 1 nr. 1 og 3 í fyrisitingarlógini, er persónur, sum virkar innan almennu fyrisitingina, ógegnigur, um so er, at viðkomandi sjálvur hevur ein serstakan persónligan ella fíggjarligan áhuga í úrslitinum av málinum. Ein persónur, ið kann hugsast at hava serstøk áhugamál í málinum, eigur ikki at vera við í viðgerðini av málinum.

Í máli *LUM 200700009*, førdi klagarin fram, at formaðurin í teknisku nevnd var ógegnigur at viðvirka í setan av brunaumsjónarmanni í kommununi. Sambært reglugerðini fyri brunaumsjónarmenn, hevur brunaumsjónarmaðurin dagligu leiðsluna av sløkkiliðinum í kommunum, sum hava egið sløkkilið. Formaðurin í Brunanevndini, var eisini formaður í Teknisku nevnd og var harafturat

meinigur sløkkiliðsmaður. Formaðurin hevði einsamallur setanarsamrøður, og var eisini við til at taka avgerð í býráðnum. Afturat hesum var viðkomandi stjóri og átti eitt felag, sum veitti kommununi tænastur í samband við oljudálking. Sambært somu reglugerð hevur brunaumsjónarmaðurin leiðsluna av tí tekniska tiltakinum á skaðastaðnum, tá ið talan t.d. er um oljudálking. Tað er brunaumsjónarmaðurin, sum tekur avgerð um, hvørt tað er neyðugt at tilkalla hjálp, og hvør skal veita hesa tænastu. Vísandi til serligu áhugamálini, sum formaðurin í Teknisku nevnd hevði í málinum, helt umboðsmaðurin, at hann mátti metast at vera ógegnigur. Hann átti tí ikki at verið við í viðgerðini av málinum.

## Familjusambond

Um ein persónur er nær skyldur við ein umsøkjara, sum hevur ein serstakan persónligan ella fíggjarligan áhuga í úrslitinum av málinum ella umboðar onkran, ið hevur ein slíkan áhuga, er viðkomandi jb. § 3, stk. 3 í fyrisitingarlógini, ógegnigur at viðgera málið og skal lata onkran annan viðgera málið.

Í máli *LUM 200700009*, upplýsti kommunan, at brunaleiðarin, luttók á fundinum í Brunanevndini, tá ið nevndin tók avgerð um at mæla til, at ein av umsøkjarunum varð settur í starv sum brunaleiðari. Brunaleiðarin var pápi umsøkjaran. Av tí at brunaleiðarin var ógegnigur, átti hann ikki at verið við í viðgerðini av málinum í Brunanevndini.

## Nærsambond

Har ivi kann vera um, hvørt ein myndugleikapersónur er ópartískur, er ásett í § 3, stk. 1, nr. 5, at t.d. vinskapur ella óvinskapur millum myndugleikapersónin og ein part í málinum hava við sær ógegni. Viðvíkjandi óvinskapi verður sambært siðvenju sett sum krav, at talan er um ein persónligan tvídrátt, sum kann staðfestast, og sum er álvarsligur. Tað er ikki nóg mikið, at annar heldur, at talan er um ein tvídrátt, um útsagnir ella gerðir frá hinum partinum ikki kunnu skjalprógvast.

Í máli *LUM 201000071*, varð spurnartekin serliga sett við gegni hjá einum umboði í setanarnevndini. Hetta umboðið hevði í fleiri ár starvast sum skrivari hjá virkandi aðalstjóranum, sum var ein av umsøkjarunum til starvið. Støðan hjá skrivaranum var sostatt tann, at hon sum eitt undirskipað starvsfólk hjá einum av umsøkjarunum til starvið, hevði sum uppgáva at meta um og innstilla umsøkjarar til starvið hjá stjóranum, millum annað at viðgera umsóknina hjá stjóranum sjálvum, sum hevði ein serligan áhuga í úrslitinum av viðgerðini. Grundað á hesar umstøður metti umboðsmaðurin ikki, at tað út frá eini generellari meting kundi útilokast eitt trýst frá stjóranum, ella at trúfesti hjá skrivaranum mótvegis stjóranum kundi ávirka viðgerðina. Talan er um eina generella meting, og at persónlig viðurskifti ongan týdning hava fyri hesa meting. Vísandi til hetta var tað fatanin hjá umboðsmanninum, at skrivaran sambært § 3, stk. 1, nr. 5 var ógegnig at luttaka í viðgerðini hjá setanarnevndini. Umboðsmaðurin metti tað somuleiðis stuðla hesa fatan, at minnilutin í setanarnevndini, sum skrivarin var partur av, einans innstillaði virkandi aðalstjóran til starvið.

Í máli *LUM 200900001*, varð klagað um, at aðalstjórin í Uttanríkisráðnum var ógegnigur at viðgera málið sambært § 3, stk. 1, nr. 5, í fyrisitingarlógini. Orsøkin til hetta var álvarsligur og persónligur tvídráttur millum klagaran og aðalstjóran í eini ósemju millum Løgmansskrivstovuna og Uttanríkisráðið um skrivstovuhøli. Klagarin og aðalstjórin umrøða í frágreiðingum sínum tvær ítøkiligar hendingar. Eftir fyrru hendingina skrivaði klagarin eitt upprit um, hvat aðalstjórin skal hava sagt, og undir seinnu hendingini boðaði aðalstjórin klagaranum frá, at hann bert viðgjørdi ósemjuna við løgmansstjóran. Umboðsmaðurin metti ikki umrøddu hendingarnar og skrivligu frásøgnina vera tekin um ein persónligan tvídrátt, og grundað á, at viðurskiftini millum klagaran og aðalstjóran ikki vóru nevnd aðrastaðni í skrivliga tilfarinum í málinum, helt umboðsmaðurin ikki grundarlag vera fyri at siga, at nakar álvarsligur tvídráttur var millum klagaran og aðalstjóran í Uttanríkisráðnum.

## Myndugleikaógegni

Hóast ein persónur í fyrisitingini ikki persónliga er ógegnigur at viðgera eitt mál, kann hann gerast ógegnigur, um leiðari hansara kann metast ógegnigur at viðgera málið. Í slíkum førum gerst øll fyrisitingin ógegnig.

Í máli *LUM 200900001*, valdi ein setanarnevnd at síggja burtur frá skjølunum í málinum hjá Løgmansskrivstovuni sum setanarmyndugleika, og tá setanarprofilur skuldi gerast, vendi nevndin sær til ein fyrrverandi leiðara í lýsta starvinum, tí at starvsfólkini vóru ógegnig at viðgera málið. Í ítøkiliga málinum var tað løgmaður, sum var persónliga ógegnigur, og í hansara stað kom varaløgmaður, sum tók endaliga avgerð í málinum. Tað var sostatt hvørki Løgmansskrivstovan sum myndugleiki ella einstøku starvsfólkini, sum upprunaliga vóru ógegnig at viðgera málið. Starvsfólkini vórðu mett ógegnig, tí løgmaður var ógegnigur. Beinleiðis avleiðingin av, at persónur er ógegnigur, er, at viðkomandi ikki má taka avgerð ella vera við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av málinum, uttan so at tað er ógjørligt ella sera trupult ella ivasamt at lata ein annan koma í hansara stað.

## Ógegni hjá kærumyndugleika

Sambært § 3, stk. 1, nr. 4 í fyrisitingarlógini er ein persónur hjá einum yvirskipaðum myndugleika ógegnigur, um hesin áður hevur verið við til at taka avgerð í einum máli, sum verður kært til yvirskipaða myndugleikan. Hetta er grundað á, at endamálið við rættinum at kæra er at tryggja, at eitt mál veruliga fær tvær viðgerðir. Ógegnið er treytað av, at talan er um tveir myndugleikar. Henda áseting forðar t.d. ikki fyri, at ein myndugleiki tekur uppaftur viðgerðina av einum máli. Ásetingin forðar heldur ikki, at ein yvirskipaður myndugleiki vegleiðir einum undirskipaðum myndugleika undir viðgerðini av einum máli, ið kann kærast til yvirskipaða myndugleikan. Umstøðurnar í málinum ella innihaldið í samskiftinum millum starvsfólk hjá myndugleikunum kann tó vera soleiðis háttað, at starvsfólk hjá kærumyndugleikanum verður ógegnig at viðgera eina kæru um málið.

Í máli *LUM 200900041*, metti umboðsmaðurin, at aðalstjórin í Innlendismálaráðnum, sum sambært skjølunum í málinum hevði viðgjørt eina kæru og heitt á undirskipaða myndugleikanum um at taka málið til nýggja viðgerð, var ógegnigur at viðgera eina nýggja kæru um somu viðurskifti. Aðalstjórin hevði undir fyrru kæruviðgerðini ítøkiliga tikið støðu til málið, og hetta bar við sær, at kærurnar um seinnu avgerðirnar ikki kundu sigast at hava fingið eina veruliga viðgerð, og at rættarverjan um at fáa eitt mál viðgjørt tvær ferðir var sett til viks. Av hesi orsøk helt umboðsmaðurin, at talan var um eitt so mikið týðandi brek í málsviðgerðini, at seinnu kæruavgerðirnar máttu metast at vera ógildugar.

## Avleiðing av ógegni

Talan er um ein týðandi feil í málsviðgerðini, um ein ógegnigur persónur hevur tikið lut í eini málsviðgerð. Útgangsstøðið er tí sum meginregla, at avgerðin er at meta sum ógildug. Tað kunnu tó vera viðurskifti, sum tala fyri, at tað í serligum førum, og eftir eini ítøkiligari meting, verður vikið frá hesum útgangsstøði. Hetta kann t.d. vera, um ógegni ikki verður mett at hava havt ítøkiliga ávirkan á innihaldið í avgerðini, um viðkomandi, sum hevur fingið hesa avgerð, ikki hevur havt kunnleika til ógegni, og um viðkomandi - møguliga gjøgnum longri tíð - hevur lagað sítt virksemi í sannføring um, at avgerðin var røtt. Er sjálv avgerðin í málinum ikki at meta sum innihaldsliga skeiv, kann tað haraftrat út frá einum sjónarmiði um rímiligheit mótvegis borgaranum tala fyri, at avgerðin stendur við.

# Partshoyring

**Gurið Joensen,** ráðgevi (2020)

*„Má tað haldast, at ein partur í einum máli ikki er kunnigur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar, og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli. Hetta er tó bert galdandi, um upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part, og hava stóran týdning fyri avgerðina í málinum. Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær ummælið skal verða givið.“ (§ 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini)*

Tá ein myndugleiki skal taka avgerð í einum máli, skulu partarnir í málinum sum oftast hava møguleika at koma við einum ummæli, áðrenn málið verður avgjørt.

Skyldan hjá myndugleikunum til av egnum ávum at hoyra partarnar í einum máli, er ikki bert ein rættur hjá borgarunum, men hevur eisini týdning fyri álitið á almennu fyrisitingina. Samstundis er partshoyring ein neyðugur og týðandi partur í málsupplýsingini hjá myndugleikunum.

## Endamálið við partshoyring

§ 18, stk. 1, í fyrisitingarlógini ásetur høvdusreglurnar um partshoyring.
Endamálið við partshoyringini sambært § 18 í fyrisitingarlógini er at tryggja, at tann sum er partur í málinum:

- veit at málið er til,
- kennir tær faktisku upplýsingarnar og møguligar metingar frá uttanhýsis serfrøði, sum eru grundarlag fyri avgerðini, ið myndugleikin skal taka, og
- fær møguleika at gera viðmerkingar til faktiska grundarlagið í málinum og til metingar frá uttanhýsis serfrøði, áðrenn avgerðin verður tikin.

Fyri myndugleikan er partshoyring eisini ein trygd fyri, at hann hevur tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at taka eina lógliga og rætta avgerð.

## Skyldan at partshoyra

Sambært fyrisitingarlógini § 18, stk. 1, hevur myndugleikin bert skyldu at partshoyringa í hesum førum:

- í málum, har myndugleikin skal taka avgerð í fyrisitingarrættarligum høpi,
- um talan er um part í málinum t.v.s. í mun til tann sum hevur eina beinleiðis, týðandi, serstakan og løgligan áhuga í málinum,
- í mun til avgerðina í málinum. Sum útgangsstøði er ikki skylda at partshoyra um málsviðgerðarstigini í málinum

Reglan í § 18, stk. 1, í fyrisitingarlógini ásetur, nær ein myndugleiki hevur skyldu at partshoyra. Fyrisitingarlógin er ein minimumslóg, og myndugleikin kann tí eisini fremja partshoyring í øðrum førum, har tað ikki er lógarkravt, men har tað eftir umstøðunum í málinum má haldast at vera hóskiligt.

Sambært góðum fyrisitingarsiði hevur ein myndugleiki skyldu at partshoyra í nøkrum førum, sum ikki eru nevnd í § 18. Dømi um slíka víðkaða hoyringsskyldu er í málum um uppsøgn vegna samstarvstrupulleikar, og tá ein starvssettur verður mettur sum óskikkaður til starvið. Í slíkum førum skal myndugleikin ikki bara hoyra um faktiska grundarlagið í málinum, men eisini um metingina í málinum, t.v.s. um grundarlagið fyri ætlaðu avgerðini. Ein víðkað hoyringsskylda er eisini galdandi í málum, har ein myndugleiki skal avgera eina tvístøðu millum fleiri partar.

Eisini eru málsviðgerðarreglur í aðrari lóggávu, sum tryggja partinum at verða hoyrdur, áðrenn avgerð verður tikin. Sum dømi kunnu nevnast § 6 í lóg um Toll- og skattafyrisiting og kap. 4 í Tænastumannalógini um tænastumannaforhoyr.

## Upplýsingar, sum myndugleikin skal partshoyra um

Tað eru ikki allar upplýsingar, sum ein myndugleiki hevur skyldu at partshoyra um sambært § 18, stk. 1. Hesar treytir skulu verða uppfyltar, áðrenn skyldan at partshoyra er galdandi:

- parturin skal ikki verður kunnugur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar,
- upplýsingarnar eru viðvíkjandi teimum faktisku umstøðunum,
- upplýsingarnar eru ikki til fyrimuns fyri viðkomandi part, og
- upplýsingarnar hava stóran týdning fyri avgerðina í málinum

Tað kann tó vera skylda at partshoyra, sjálvt um parturin er vitandi um ávísa upplýsingin. Hetta kann t.d. vera í málum, sum parturin sjálvur hevur tikið upp og myndugleikin hevur fingið upplýsingar til vega t.d. úr eini skrá /yvirliti ella á annan hátt. Hóast parturin hevur kunnleika til upp-

lýsingarnar, kann tað vera, at hann ikki veit, at hesar verða tiknar sum partur í upplýsingini av málinum. Hann skal tí partshoyrast um hesar upplýsinginar.

Vanliga hevur myndugleikin ikki grundarlag fyri at halda, at ein partur hevur kunnleika til aðrar upplýsingar enn tær, sum parturin sjálvur hevur givið myndugleikanum, ella tað á onkran hátt er gjørt greitt fyri partinum, at aðrar upplýsingar eru í málinum. Tí hevur myndugleikin oftast skyldu at hoyra um nærum allar aðrar upplýsingar enn teir, ið parturin sjálvur hevur latið myndugleikanum. Sum dømi kann nevnast mál, har fleiri partar eru í einum máli. Har kann myndugleikin ikki bara ganga út frá, at partarnir kenna upplýsingarnar, herundir viðmerkingar frá hvør øðrum, og hevur myndugleikin tí skyldu at partshoyra um upplýsingarnar í slíkum førum.

Upplýsingarnar, sum myndugleikin hevur skyldu at hoyra um, eru um fakta í málinum, herundir eisini uttanhýsis serfrøðingametingar, um tær eru av slíkum slag, at tær eru við til lýsa próvgrundarlagið í málinum ella eru við til at geva greiðu á faktisku umstøðunum. Hetta kann tí eisini vera galdandi í førum, har upplýsingin inniheldur eina subjektiva meting, um hendan hevur týdning fyri tað fyrisitingarliga próvgrundarlagi sum t.d. meting frá einum sakkønum ella ein teknisk meting. Metingar frá starvsfólki myndugleikans eru tó ikki fevndar av hoyringsskylduni.

Tað er ikki skylda at hoyra um lógargrundarlagið í málinum. T.v.s. tað er ikki skylda at partshoyra um tulkingina av onkrari áseting, ella hvørjar fylgir ein tulking vil hava fyri málið. Ei heldur er skylda at partshoyra um einhvørja almenna løgfrøðiliga meting frá øðrum myndugleika um løgfrøðina í málinum ella um fyrisitingarliga siðvenju, sum kunnu hava týdning fyri málið.

Skyldan at partshoyra er treytað av, at upplýsingin ella metingin ikki er til fyrimuns fyri partin. Er ivi um, um ein upplýsing er ella ikki er til fyrimuns fyri partin, hevur myndugleikin skyldu at partshoyra um upplýsingina. Tað sama ger seg galdandi, um haldast má, at parturin kann hava fyrimun av at fáa høvi at koma við enn fleiri upplýsingum ella ískoytisviðmerkingum um grundarlagið í málinum.

Upplýsingarnar, sum myndugleikin hevur skyldu at partshoyra um, skulu vera av stórum týdningi fyri avgerðina í málinum. Avgerðandi í so máta er, hvat lógargrundarlag skal nýtast.

Í málinum LUM 17/201100095 sum snúði seg um, at Taks hevði noktað einum borgara rentustuðul, hevði Taks umvegis telefon við borgarstjóran í kommununi innheintað upplýsingar um bústaðarstøðuna hjá borgaranum. Taks tók avgerð, uttan at partshoyra borgaran um hesar upplýsingar, sum høvdu stóran týdning fyri avgerðina í málinum. Umboðsmaðurin átalaði, at Taks ikki hevði partshoyrt um hesar upplýsingar, áðrenn avgerð varð tikin.

Partshoyring kann ofta vera viðvirkandi til, at málsviðgerðartíðin gerst long, og verður partshoyrt um allar upplýsingar, eisini teir av lítlum og ongum týdningi, kann hetta verða ein vansi fyri partin sjálvan, tí viðgerðin kann gerast óneyðuga langdrigin. At upplýsingin hevur stóran týdning, verður tí avmarkað til at fevna um tey føri, har tað er grundarlag fyri at halda, at parturin hevur ein áhuga í at verða hoyrdur, og har luttøka frá hansara síðu má haldast at kunna betra um grundarlagið, sum myndugleikin hevur at taka avgerð út frá.

Í § 18, stk. 2, í fyrisitingarlógini eru ásett nøkur føri, har myndugleikin ikki hevur skyldu at partshoyra.
Talan er um hesi føri:

> Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi, um so er, at
> 1) tað, soleiðis sum upplýsingarnar og málið er háttað, ikki kann metast at vera ivingarsamt, at taka avgerð í málinum á verandi grundarlag,
>
> 2) frest fer at viðføra, at farið verður út um lógásetta freist fyri avgerð í málinum.
>
> 3) áhugi partanna í, at avgerðin í málinum verður útsett, eigur at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri pørtunum sjálvum, ella øðrum privatum áhugamálum, ið tala í móti eini tílíkari útsetan.
>
> 4) parturin viðvíkjandi av varðandi spurningum ikki hevur rætt til skjalainnlit sambært reglunum í kapittul 4.
>
> 5) ætlaða avgerðin fer at nema ein víðari óvissan skara av persónum, fyritøkum v.m., ella um framløga av upplýsingunum fyri partinum fer at geva stórar trupulleikar, ella
>
> 6) tað við lóg eru gjørdar serstakar ásetingar, ið tryggja, at parturin fær høvi til at kunna seg um støðið fyri teirri ætlaðu avgerðini og til at geva ummæli í málinum, áðrenn avgerðin verður tikin.

## Partshoyringin

§ 18, stk. 1, í fyrisitingarlógini ásetur ikki nøkur formkrøv fyri, hvussu ein partshoyring skal fremjast, ella nær hoyring skal gerast. Hetta velst alt um umstøðurnar í málinum. Tað avgerðandi er, at partshoyringin gevur partinum møguleika at gera viðmerkingar, rætta og koma við ískoytum til faktisku umstøðurnar í málinum.

Partshoyringin kann vera munnlig ella skrivlig. Hoyringin skal verða lagað til viðkomandi part í málinum. Tað mest vanligt er, at fremja skrivliga partshoyring, men er eitt nú talan um, at munnliga partshoyring má fremjast vegna tíðarfreist, so má myndugleikin tryggja sær, at parturin skilir upplýsingarnar, sum verða givnar honum munnliga. Er partshoyring skrivlig, skulu tey viðkomandi skjølini sendast partinum, ella eisini kann myndugleikin gera eina rætta og nøktandi málslýsing av teimum upplýsingum, sum myndugleikin hevur skyldu at partshoyra um. Málið í eini partshoyring eigur at verða tillagað ítøkuligu støðuna soleiðis, at tað er lætt hjá móttakaranum at skilja. Eisini ber til at fremja partshoyringar við at taka eina fyribils avgerð, har tær viðkomandi upplýsingarnar eru endurgivnar og viðgjørdar av myndugleikarnum. Myndugleikin skal á greiðan hátt upplýsa partin um, hvat hann skal fyrihalda seg til, og at talan er um eina hoyring, har parturin innan ávísa freist hevur møguleika at koma við viðmerkingum.

## Nær í málsviðgerðini skal man partshoyra

Fyristingarlógini hevur ikki ásetingar um, nær í málsviðgerðini myndugleikin hevur skyldu at partshoyra. Hetta velst um umstøðurnar í málinum. Tað er tó givið, at partshoyring altíð skal verða framd soleiðis, at parturin fær høvi at gera viðmerkingar v.m., áðrenn myndugleikin tekur avgerð um málið.

Um tað ber til, er tað ein fyrimunur at gera eina samlaða hoyring av málinum, heldur enn áhaldandi at senda skjøl í einum máli til hoyring hjá partinum.

Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær ummælið ella viðmerkingar frá partinum skulu gevast myndugleikanum. Freistin eigur at vera sett soleiðis, at parturin fær eina rímiliga tíð til at seta seg inn í upplýsingarnar og hugsa um, hvat er at gera. Biður parturin um longda freist, eigur umbønin so vítt gjørligt at verða eftirlíkað. Tað kunnu tó vera umstøður, har tað ikki ber til at leingja freistina. Í slíkum føri eigur myndugleikin at kunna partin um, at um viðmerkingar hansara ikki eru móttiknir innan ávísa freist, tekur myndugleikin avgerð, tá freistin er farin.

## Manglandi partshoyring

Manglandi partshoyring kann í ringasta føri føra til, at myndugleikin tekur eina skeiva avgerð, tí hann ikki hevði allar týðandi upplýsingar í málinum, tá avgerðin varð tikin.

Kravið um partshoyring er ein sonevnd garantiregla, og manglandi partshoyring viðførir tí í útgangsstøðinum, at avgerðin verður ógildað, uttan so at myndugleikin kann prógva, at manglandi partshoyringin ikki hevði nakra týdning fyri avgerðina í tí ítøkiliga førinum.

Manglandi partshoyring førir oftani til kærur, har úrslitið oftast er, at avgerðin verður ógildað, og at myndugleikin tískil má taka málið til nýggja viðgerð. Hetta eru viðurskifti sum gera, at málsviðgerðin í einum máli kann gerast sera drúgv og krevja nógva starvsfólkaorku. Myndugleikar eiga tí í einum avgerðarmáli at taka atlit til reglurnar um partshoyring.

Dømi um LUM mál sum viðgera spurningin um partshoyring : LUM 20/00021 Lendiskærunevndin, byggimál, grannahoyring og partshoyring – LUM 18/00044 Tórshavnar kommuna, uppsøgn vegna samstarvstrupulleikar - LUM 14/00045 Fiskimálaráðið, sýtt loyvi at fiska makrel – LUM 17/201100095 Taks, sýtt rentustuðul – LUM 10/201100099 Tórshavnar kommuna, broytt lønaráseting, starvsaldur– - LUM 200700013 barnsburðarfarloyvi, avgerð hjá Javnstøðunevndini - LUM 200500042 Vinnumálaráðið, innlutningsloyvi til hund – LUM 200300031 Mentamálaráðið, flyting í annað starv.

# Samskifti á Facebook

**Elinborg Apol,** fulltrúi (2015)

*„Nýtslan av alnótini og serliga teimum sosialu alnótstænastunum sum t.d. Facebook hevur havt við sær, at einstaklingar í størri og størri mun handfara persónsupplýsingar.“*

Verja av privatlívi og persónsupplýsingum vekjur størri og størri ans. Nýggj tøkni so sum myndatól í fartelefonum og sosialar alnótstænastur eru m.a. orsøkin til hetta. Facebook er ein av hesum alnótstænastum, sum setur síni krøv til verju av privatlívinum hjá tí einstaka.

Umboðsmaðurin fekk í 2015 tvær klagur, sum snúðu seg um Facebook. Umboðsmaðurin fekk ikki hjálpt klagarunum og gjørdi tí ikki meira við málini.

Í fyrra málinum hevði eitt starvsfólk í Almannaverkinum luttikið í sending hjá Kringvarpi Føroya (KvF) og hevði í sendingini lagt fram nøkur faktuel tøl. Aftan á sendingina vóru viðmerkingar og kjak í einum bólki á Facebook, nevndur „Kringvarp Føroya“, sum bar búmerki hjá KvF og hevði yvir 2600 limir. Starvsfólkið varð í kjakinum lagt undir at koma við skeivum og ófullfíggjaðum upplýsingum. Starvsfólkið klagaði tí til KvF, tí tað helt seg vera útspilt í facebookbólkinum. KvF svaraði, at KvF ikki stóð fyri facebookbólkinum, men at nøkur starvsfólk, sum arbeiddu í KVF høvdu stovnað bólkin og vóru fyrisitarar í bólkinum. Talan var um ein áhugabólkur fyri øll, ið høvdu áhuga í KvF.

KvF upplýsti fyri umboðsmanninum, at leiðslan í KvF hevði roynt at fáa bólkin strikaðan, men at tað var lættari sagt enn gjørt, tí fyrisitarin, sum ikki longur starvaðist í KvF, noktaði at strika bólkin. Leiðslan í KvF hevði eisini biðið fyrisitingina hjá Facebook um at strika bólkin, men uttan úrslit.

Umboðsmaðurin svaraði klagaranum, at leiðslan í KvF hevði tikið avgerð um at strika bólkin, tó eftir øllum at døma uttan at hava nakra ávirkan á, um hetta lat seg gera ella ikki. Eingi starvsfólk í KvF høvdu longur nøkur rættindi við atliti at bólkinum. Fráboðanin frá KvF hevði m.a. havt við sær, at bólkurin ikki longur bar búmerki hjá stovninum, eins og tað týðiliga eisini varð gjørt vart við, at talan ikki var um ein bólk hjá KvF. Av tí at KvF hevði tikið neyðug stig í málinum, og KvF ikki varðaði av bólkinum ella hevði nøkur rættindi í mun til bólkin, kundi umboðsmaðurin ikki hjálpa klagaranum meira við málinum og gjørdi tí ikki meira við tað.

Tað seinna málið snúði seg um eina mynd av einum barni, sum var sett til fosturs. Fosturmamman hevði lagt andlitsmynd av fosturbarninum saman við sínum egnu børnum á vangamynd sína á Facebook. Á vangamyndini sást eisini, at hon starvaðist sum fosturfamilja. Vangamyndin hjá fosturmammuni var so mikið opin, at øll kundi síggja myndina. Mamman at barninum klagaði til umboðsmannin, tí hon helt hetta vera brot á tagnarskylduna hjá fosturmammuni.

Umboðsmaðurin vendi sær til Fosturforeldraskipanina hjá Barnaverndarstovu Føroya, sum tók málið upp og í hesum sambandi gjørdi leiðreglur, sum vóru sendar øllum fosturforeldrum.

Eftir leiðreglunum er útgangsstøðið, at fosturforeldur skulu hava samtykki frá foreldramyndugleikahavara, áðrenn fosturforeldur almannakunngera myndir av fosturbørnum. Skilt verður tó millum støðumyndir og andlitsmyndir. Endamálið við eini støðumynd er at vísa eitthvørt virksemi ella eina støðu. Við eini andlitsmynd er endamálið at avmynda ein ella fleiri ávísar persónar og sýna teir fram. Tað krevst ikki samtykki at almannakunngera eina støðumynd. Afturímóti skulu foreldramyndugleikahavari ella fosturbarnið – tá tað er 15 ár ella eldri - góðtaka, at andlitsmynd verður almannakunngjørd. Foreldramyndugleikahavari kann geva fosturfamiljuni eitt generelt samtykki til at leggja myndir út á Facebook, men um slíkt ikki fæst, er neyðugt at fáa samtykki hvørja ferð ein mynd verður spreidd alment.

## Einstaklingar sum dátuábyrgdarir

Nýtslan av alnótini og serliga teimum sosialu alnótstænastunum, sum t.d. Facebook, hevur havt við sær, at einstaklingar í størri og størri mun handfara persónsupplýsingar. Hetta kann t.d. vera, tá ein persónur á Facebook leggur tekst um ella mynd av øðrum persóni út á vangamynd sína ella í ein bólk, hann fyrisitur.

Á henda hátt kann persónurin gerast dátuábyrgdarari við teimum skyldum, sum Persónsupplýsingarlógin hevur í sær. Henda setur ávís krøv um, hvussu persónsupplýsingar skulu viðgerast. Persónsupplýsingarlógin hevur herd krøv

um viðgerð av viðkvæmum upplýsingum. Dátuábyrgdarin kann verða dømdur revsing og endurgjald, um hann ikki heldur ásetingarnar í lógini.

Persónsupplýsingarlógin er tó ikki galdandi fyri allar vangamyndir ella bólkar á Facebook. Persónsupplýsingarlógin er ikki galdandi fyri virksemi av heilt persónligum slagi, sbrt. § 3, stk. 2, sum t.d. tá vangamyndin ella bólkurin á Facebook er „afturlatin", og bara eitt avmarkað tal av „vinum" hava atgongd til upplýsingarnar á vangamyndini ella í bólkinum.

Hinvegin mugu upplýsingarnar á eini vangamynd ella í einum bólki á Facebook metast at vera almannakunngjørdar um vangamyndin ella bólkurin er „almennur", soleiðis at ikki bara „vinir", men allir brúkarir á Facebook, hava atgongd til upplýsingarnar á vangamyndini ella í bólkinum. Einstaklingurin, sum eigur vangamyndina ella er fyrisitari í bólkinum, er tá dátuábyrgdari.

Tað sama kann gera seg galdandi fyri vangamyndir ella bólkar, sum ikki eru „almenn", men har persónurin, sum eigur vangamyndina ella er fyrisitari í bólkinum, hevur eitt stórt tal av „vinum", serliga „vinum", sum persónurin ikki kennir. Í slíkum føri kunnu persónsupplýsingarnar á vangamyndini ella í bólkinum vera atkomiligar fyri einum so stórum skara av fólki, at tað kann samanberast við, at upplýsingarnir eru almannakunngjørdar til ein óavmarkaðan skara av fólki.

Er ivi, um talan er um, at upplýsingar eru almannakunngjørdar, má ein ítøkilig meting fara fram. Her verður m.a. hugt eftir, hvør hevur ábyrgdina av vangamyndini ella bólkinum, hvat slag av upplýsingum talan er um, hvussu lætt tað er at fáa fatur í upplýsingunum, og hvussu nógv hava atgongd til upplýsingarnar.

## Burturtøka av myndum og upplýsingum á Facebook

Persónur, sum ynskir at mótmæla, at upplýsingar ella myndir av viðkomandi eru almannakunngjørdar á einari sosialari alnótstænastu sum t.d. Facebook, eigur í fyrsta umfari at taka hetta upp við persónin, sum eigur vangamyndina ella er fyrisitari í bólkinum. Hesin skal taka støðu til mótmælið. Um hann ikki vil taka upplýsingarnar ella myndina burtur, kann Dátueftirlitið møguliga hjálpa, um persónurin býr í Føroyum. Dátueftirlitið kann bara hjálpa, um upplýsingarnar kunnu krevjast at verða tiknar burtur eftir Persónsupplýsingarlógini. Dátueftirlitið kann ikki hjálpa við at taka burtur útsøgnir og upplýsingar, sum eru fevndar av talufrælsinum/framburðarfrælsinum.

## Striking av vangamynd ella bólki

Fyrr var ikki møguligt at strika eina vangamynd á Facebook, men bara at gera hana óvirkna, soleiðis at hon seinni, lætt og høgligt, kundi latast upp aftur við øllum teimum gomlu upplýsingunum í varðveitslu. Í dag kann ein persónur eisini strika vangamynd sína, hóast hetta er meira drúgført enn at gera vangamyndina óvirkna, og persónurin kanska má geva alnótstænastuni fleiri upplýsingar, soleiðis at alnótstænastan er vís í, at persónurin hevur rætt til at krevja vangamyndina strikaða. Ein striking førir við sær, at navn, føðingardagur og aðrir upplýsingar, sum eyðmerkja persónin, verða strikaðar á ambætarunum hjá Facebook.

Málið hjá umboðsmanninum um facebookbólkin, nevndur Kringvarp Føroya, vísir, at tað kann vera torført at fáa ein facebookbólk strikaðan. Hóast talan var um ein bólk, sum var nevndur Kringvarp Føroya og bar búmerki hjá KvF, og tí at síggja til sá út til at vera ein bólkur, sum Kringvarp Føroya hevði stovnað, so eydnaðist ikki Kringvarp Føroya at fáa bólkin strikaðan.

# Skjalainnlit í dátugrunnar

**Heini Petersen,** ráðgevi (2019)

*Sambært § 5, stk. 2 í innlitslógini fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv. Hetta merkir m.a., at rætturin til skjalainnlit sum meginregla ikki fevnir um sjálvan dátugrunnin hjá almenna myndugleikanum, t.v.s í tær ráu dáturnar.*

Almennir myndugleikar nýta í dag í stóran mun dátugrunnar í sambandi við málsviðgerð og annað.

Nakrir dátugrunnar verða nýttir í sambandi við goymslu og journalisering av skjølum, t.d. goymslu av elektroniskum skjølum og teldupostum, og sum partur av einari pappírsleysari arbeiðsgongd.

Aðrir dátugrunnar verða nýttir í sambandi útrokningar og samansetingar av tølum frá ymsum geirum. Hesir dátugrunnar eru sum oftast skipaðir á ein sovorðnan hátt, at teir heldur enn at goyma elektronisk skjøl, ið eru liðugt viðgjørd, innihalda eitt hav av upplýsingum, ið eru óviðgjørdar - sokallaðar ráar dátur.

## Rættur til skjalainnlit í elektronisk skjøl og ráar dátur

Tá ein myndugleiki fær eina umbøn um innlit í ávíst mál, skal myndugleikin gera av, um upplýsingarnar í málinum eru av sovorðnum slagi, at tær eru fevndar av rættinum til skjalainnlit sambært § 5, stk. 1 í innlitslógini.

Sambært § 5, stk. 1 í innlitslógini fevnir rætturin til skjalainnlit um øll skjøl, ið eru partur av einum máli, undir hesum innføringar í journalir, skráir og aðrar skrásetingar viðvíkjandi hesum skjølum.

Skjalahugtakið í § 5, stk. 1 í innlitslógini verður sambært løgfrøðiligum ástøði tulkað vítt og fevnir um eina røð av skjalasløgum. Talan er bæði um skjøl, ið myndugleikin framleiðir sjálvur, eins og skjøl, ið myndugleikin fær sent til sín. Umframt „vanlig“ skjøl, eru eisini t.d. ljósmyndir, bíløt av ymsum slagi og skitsur fevndar av hugtakinum.

Í løgfrøðiligum ástøði er dentur eisini lagdur á, at fatanin av skjalahugtakinum ikki skal vera avmarkað av tøknifrøðiligu menningini í samfelagnum. Av hesum ávum fevnir skjalahugtakið bæði um skjøl úr pappíri og skjøl, ið eru elektronisk. Teldupostar eru í hesum høpi sum meginregla at meta sum meinlík elektroniskum skjølum.

Tað er harumframt galdandi, at finst skjalið einans í elektroniskari útgávu, hevur myndugleikin skyldu at gera skjalið tøkniliga atkomuligt hjá tí, ið biðið hevur um innlit. Hetta kann eitt nú gerast soleiðis, at myndugleikin ger eitt útprent av skjalinum, ella at viðkomandi fær møguleika at síggja elektroniska skjalið á einum telduskermi á staðnum.

Sambært § 5, stk. 2 í innlitslógini fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv.

Hetta merkir m.a., at rætturin til skjalainnlit sum meginregla ikki fevnir um sjálvan dátugrunnin hjá almenna myndugleikanum, t.v.s. í tær ráu dáturnar.

Hóast innlitslógin ikki heimilar, at innlit verður veitt í sjálvan dátugrunnin, er hóast alt møguligt at innlit kann verða veitt í elektronisk skjøl, ið eru goymd í einum dátugrunni.
Við støði í skjalahugtakinum ber til at siga, at tá rætturin til skjalainnlit fevnir um pappírsskjøl, goymd í einum vanligum skjalasavni, fevnir rætturin eisini um samanberandi elektronisk skjøl, ið eru goymd í einum dátugrunni. Tað hevur sostatt ikki týdning fyri rættin til skjalainnlit hvussu skjøl og upplýsingar eru skapaði ella hvussu tey eru goymd, men heldur at tey kunnu rúmast í skjalahugtakinum.

Hettar samsvarar eisini við tað, ið omanfyri er nevnt, um, at rætturin til skjalainnlit er óheftur av tøknifrøðiligu menningini í samfelagnum, har alt fleiri viðurskifti í dag verða viðgjørd og avgreidd elektroniskt, heldur enn á pappíri.

Avgerandi er tó, at tað er gjørligt at eyðmerkja hvørji elektronisk skjøl umbønin snýr seg um, smb. § 4, stk. 3 í innlitslógini. Hettar kravið um eyðmerking er tó ikki strangt, og myndugleikin hevur harafturat skyldu at vegleiða um ivi spyrst burturúr einari umbøn um innlit. Myndugleikin skal eisini sambært góðum fyrisitingarsiði sýna fjølmiðlum serligt beinasemi í sambandi við umbønir um innlit, smb. *FOB 1995, s 244*.

Í máli *LUM 201000004* viðgjørdi umboðsmaðurin eitt mál um eina avgerð hjá Fiskimálaráðnum at nokta

innlit í fráboðanir frá Atlantic Airways til MRCC um, at bjargingartyrlan ikki var tøk. MRCC hevði móttikið fráboðanirnar frá Atlantic Airways umvegis telefon og noterað upplýsingarnar í eina elektroniska dagbók. Fiskimálaráðið noktaði at geva innlit vísandi til, at rætturin til innlit ikki fevnir um skráir ella skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv, smb. § 5, stk. 2 í innlitslógini. Umboðsmaðurin vísti á, at ein myndugleiki ikki kann nokta innliti bara vísandi til, at upplýsingarnar eru førdar inn á edv. Umboðsmaðurin metti, at goymdu upplýsingarnar í elektronisku dagbókini vóru at meta sum elektronisk skjøl, ið høvdu samband við fyrisitingarliga virksemi hjá MRCC og fevnd av almennum innliti.

## Rættur til dátuúrdrátt úr einum dátugrunni

Sum staðfest er omanfyri, er rætturin til skjalainnlit í ein dátugrunn, avmarkaður til elektronisk skjøl, ið lúka kravið um eyðmerking og samstundis kunnu rúmast í skjalahugtakinum.

Tá staðfest er, at rætturin til skjalainnlit ikki fevnir um tær ráu dáturnar í sjálvum dátugrunninum, er spurningurin, um almenningurin sambært innlitslógini hevur rætt at krevja, at myndugleikin ger ein sokallaðan dátuúrdrátt úr dátugrunninum.

Ein dátuúrdráttur er í høvuðsheitum ein samanseting av upplýsingum úr dátugrunninum, ið kann nýtast til ymisk høvi. Talan er um eina elektroniska viðgerð av teimum ráu dátunum í dátugrunninum. Dátuúrdráttir verða millum annað nýttir tá talgrundarlag skal finnast í sambandi við útgjald av ymsum peningaligum veitingum.

Sambært § 4, stk. 1, 1. pkt. í innlitslógini er galdandi, at rætturin til skjalainnlit einans er galdandi fyri skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikan. Hetta merkir, at rætturin til skjalainnlit einans fevnir um tey skjøl og upplýsingar, ið eru til taks tá umbønin um innlit er myndugleikanum í hendi. Hetta merkir so eisini, at myndugleikin sambært innlitslógini ikki hevur skyldu at gera ella fáa til vega skjøl ella upplýsingar, ið ikki frammanundan eru til taks í málinum.

Ein dátuúrdráttur verður sambært innlitslógini mettur sum framleiðsla av nýggjum upplýsingum, ið ikki frammanundan eru til taks í einum máli, og av hesum ávum heldur ikki er fevndur av rættinum til skjalainnlit sambært § 5, stk. 1 í innlitslógini.

Í máli *LUM 19/00109* viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um, at Trygdargrunnurin ikki vildi lata Kringvarpi Føroya innlit í upplýsingar viðvíkjandi hýrum í føroyska fiskiflotanum. Umboðsmaðurin helt, at umrøddu upplýsingar vóru av sovorðnum slagi, at tær kravdu eina ávísa dátuviðgerð at framleiða og vóru tískil ikki fevndar av almennum innliti. Ítøkiliga snúði tað seg um, at Trygdargrunnurin fekk upplýsingar sjálvvirkandi frá ymsum upprunakeldum, ið síðani fóru í eina edv kjarnuskipan hjá grunninum, ið grunnurin nýtti í sambandi við virksemi sítt.

## Rættur til dátuúrdrátt sambært donsku innlitslógini

Í 2002 setti danska stjórnin eina nevnd „Offentligheds-kommisonen“ við arbeiðssetninginum at gera uppskot til eina nýggja danska innlitslóg. Nevndin lat úr hondum álit sítt í 2009, ið ber heitið „Betænkning nr. 1510 om Offentlighedsloven“.

Í 2014 kom nýggj innlitslóg „Offentlighedsloven“ í gildi í Danmark, ið er grundað á hetta álit.

Í álitinum mælir nevndin m.a. frá, at heimild verður fyri at veita innlit í sjálvan dátugrunnin hjá myndugleikanum.

Hetta er grundað á eina heildarmeting av teimum serligu viðurskiftum, ið gera seg galdandi kring ein dátugrunn. Eitt nú verður víst á, at ein dátugrunnur ikki inniheldur nakað, sum í innlitshøpi kann kallast fyri upplýsingar, fyrr enn brúkarin hevur fingið upplýsingarnar – t.e. tær ráu dáturnar - úr dátugrunninum við at geva skipanini ávís boð um hetta.

Eisini verður víst á, at dátugrunnurin í sjálvum sær ikki kann sigast at vera partur av einum máli, vísandi til, at rætturin til skjalainnlit einans fevnir um skjøl, ið eru partur av einum máli, smb. § 7, stk. 2 í „Offentlighedsloven“, ið er meinlík § 5, stk. 1 í innlitslógini.

Nevndin mælir hinvegin til, at ásett verður ein rættur hjá almenninginum at fáa til vega dátuúrdrátt úr dátugrunnum myndugleikans. Grundgevingin fyri hesum er tøknifrøðiliga menningin í samfelagnum og økta nýtslan av dátugrunnum innan tað almenna. Nevndin vísur á, at um ikki slíkur rættur verður ásettur, kann tað hava við sær, at rætturin til skjalainnlit í roynd og veru verður avmarkaður vísandi til, at lógin ikki heimilar, at innlit verður veitt í dátugrunnin í sjálvum sær, t.e. tær ráu dáturnar.

Við hesum í huga, er nú ásett í § 11 í „Offentlighedsloven“, at almenningurin sum meginregla kann krevja, at myndugleikin ger ávísan dátuúrdrátt úr dátugrunnum sínum.

Tað er tó ein treyt, at dátuúrdrátturin kann gerast við fáum og einføldum boðum. Hugsanin handan hesa treyt er, at

myndugleikin ikki skal hava ov tunga arbeiðsbyrðu av arbeiðinum at gera dátuúrdráttir.

Treytin um fá og einføld boð er eitt nú ikki lokin, um dátuúrdrátturin ikki kann fremjast eftir stuttari tíð, um myndugleikin noyðist at útvega sær upplýsingar, ið ikki frammanundan eru at finna í dátugrunnum myndugleikans ella um myndugleikin noyðist at útvega sær serkunnleika, ið myndugleikin ikki frammanundan hevur ræðið á.

# Talgild fyrisiting

**Jóhanna Arge,** ráðgevi (2014)

*„Ein myndugleiki kann ikki uttan serstaka lógarheimild krevja, at ein borgari skal senda myndugleikanum skrivligt samskifti í talgildum formi, ella krevja, at borgarin skal móttaka brøv o.a. í talgildum formi frá myndugleikanum.“ (brot úr áliti umboðsmansins í LUM 14/00048)*

Tað er á breddanum, at almenna fyrisitingin skal talgildast. Eitt av aðalmálunum í Visjón 2015 var, at alt samskifti millum virki, stovnar, fyrisitingar og borgarar skuldi vera talgilt. So langt er tó ikki komið, men tað sæst í fíggjarlógini fyri 2015, at farið er undir at seta sjøtul á at talgilda tænastur til borgarar, vinnu og almenna geiran í Føroyum.

Á fleiri økjum eru átøk framd at talgilda fyrisitingina. Í dag er tað eitt lógarkrav, at øll bókhaldsskyldug, deyðsbúgv, feløg, felagsskapir, stovnar v.m. skulu lata sjálvuppgávu, rakstrarroknskap og fíggjarstøðu inn talgilt í serligum sniði um eina ávísa skipan hjá TAKS. Í heilsuverkinum er sett í verk ein felags journal- og samskiftisskipan, Landssjúkrahúsið sendir fólki innkallingar til kanningar talgilt, roknskaparverk landsins er í stóran mun talgilt, útgjaldingin av pensjónum er talgild, søkjast kann um upptøku á miðnámsútbúgving á netinum o.s.fr.

Talgilding av fyrisitingini byggir á eitt ynski um at effektivisera almenna geiran. At tryggja skjótari og smidligari samskifti við tað almenna, skjóta og góða tænastu frá myndugleikunum, effektivari og styttri málsviðgerð og betri málsgongdir.

Talgilding av fyrisitingini er tó ikki bara ein teknisk avbjóðing, og farna árið viðgjørdi umboðsmaðurin tvey mál, sum hava talgilda fyrisiting sum felagsnevnara (LUM 201300055 og 14/00048).

Við skúlaársbyrjan í 2013 lýsti Studni í fjølmiðlunum við, at fyri at fáa lestrarstuðul skuldu tey lesandi søkja lestrarstudning á talgildum umsóknarblaði í elektronisku skipanini Mínboks. Mínboks er ein ókeypis skipan við persónligum talgildum postkassum, har borgarar kunnu fáa atgongd til post frá almennum myndugleikum og privatum virkjum. Upplýst varð, at Studni fór einans at viðgera umsóknirnar í Mínboks. Við øðrum orðum skuldi bara samskiftast í Mínboks, og eingi pappír fóru at verða send millum tann lesandi og Studna.

Tá umboðsmaðurin spurdi Mentamálaráðið og Studna um heimildina fyri átakinum, ásannaðu myndugleikarnir beinanvegin uttan aðra viðmerking, at heimild var ikki fyri hesum og broyttu krøvini.

Umboðsmaðurin nýtti høvið at greiða frá, at ongar generellar reglur eru um, á hvønn hátt ein borgari kann ella skal venda sær til fyrisitingina. Um eingi serlig formkrøv eru ásett, kann borgarin tí sjálvur gera av, hvussu hann vendir sær til fyrisitingina. Sjálvsagt treytað av, at fyrisitingin tekniskt er før fyri at taka ímóti tí, sum sent verður, og at tað ikki eru ásett krøv um t.d. at brúka eitt serligt oyðublað ella krøv um undirskrift.

Ein almennur myndugleiki kann hinvegin ikki uttan serstaka heimild krevja, at skrivligt samskifti millum borgaran og myndugleikan skal vera talgilt. Ein myndugleiki kann ikki krevja, at ein borgari skal senda myndugleikanum skrivligt samskifti í talgildum formi ella krevja, at borgarin skal móttaka brøv o.a. í talgildum formi frá myndugleikanum.

Slíka serstaka heimild hevði Studni ikki, og tí kundi Studni ikki áleggja teimum lesandi at søkja um lestrarstuðul í talgildum formi. Einki forðar borgaranum í sjálvboðin at skráseta seg í t.d. Mínboks og á henda hátt samtykkja í at samskifta talgilt við ein almennan myndugleika. Tó kann hetta samtykkið til eina og hvørja tíð verða tikið aftur og borgarin krevja, at myndugleikin sendir skriv í pappírsformi.

Átakið hjá Studna tóktist ikki vera viðgjørt frá einum løgligum sjónarvinkli, og tí helt umboðsmaðurin tað vera viðkomandi at vísa á, at sama um málsviðgerðin hjá einum myndugleika er manuell ella talgild, so eru reglurnar í fyrisitingarlógini og fyrisitingarligar meginreglur galdandi fyri viðgerðina av málunum. Reglurnar um t.d. partshoyring og partsumboðan eru galdandi, sama á hvønn hátt eitt mál verður viðgjørt, og tað er almenni myndugleikin, sum hevur ábyrgd av at tryggja borgaranum hesi rættindi. Myndugleikin skal, tá lagt verður um til talgilda fyrisiting, tryggja, at tøkniligu loysnirnar taka hædd fyri rættindunum hjá borgarunum.

Sum úrslit av umboðsmansviðgerðini samtykti Løgtingið tríggjar mánaðir seinni, í mai 2014, at heimila landsstýrismanninum í mentamálum at áseta reglur um, at umsóknir um studning og lán skulu latast Studna talgilt.

Landsstýrismaðurin í mentamálum kundi nú krevja, at samskiftið skuldi vera talgilt.

Landsstýrismaðurin hevur tó ikki enn ásett reglur um hetta í kunngerð. Tað kunnu vera fleiri orsøkir til hetta. Men tað tykist sum, at verandi tøkniliga skipan virkar sum forðing fyri, at m.a. ein skipan við talgildum umsóknarbløðum til lestrarstuðul kann setast í verk sum krav fyri øll lesandi. Sum mentanarnevndin eisini vísti á, tá málið var til viðgerðar í Løgtinginum, byggir talgilda skipanin hjá Studna á tøknina í skipanini Mínboks, og ein brúkari av Mínboks kann ikki velja bara at móttaka post frá einum myndugleika og velja samskifti við aðrar myndugleikar og privat virki frá. Sostatt er ikki - enn - møguligt hjá einum brúkara bara at samskifta við Studna í Mínboks. So hóast heimildina frá Løgtinginum kann landsstýrismaðurin í mentamálum ikki gera ætlanina hjá Studna til eina kravda skipan, so leingi sum verandi tekniska skipan er tengd at øðrum tænastum.

Seinna málið snúði seg um, at Gjaldstovan 1. mars 2014 fór undir bara at senda lønarseðlarnar hjá almennum starvsfólki í Mínboks. Lønarseðlar, sum sambært skattalógini skulu sendast løntakarunum skrivliga. Kravið um nýggju mannagongdina fall trimum klagarum fyri bróstið, og teir spurdu umboðsmannin, um Gjaldstovan kundi krevja, at tey skuldu knýta seg í Mínboks fyri at móttaka lønarseðilin. Tað helt umboðsmaðurin ikki, og víst varð til somu grundgevingar sum í málinum viðvíkjandi Studna.

Umboðsmaðurin helt tað somuleiðis vera ivasamt, um skattalógin yvirhøvur heimilaði Gjaldstovuni at senda lønarseðlarnar talgilt. Við tøkniligu menningini í huga var hetta ein praktisk tulking av lógini, men umboðsmaðurin helt, at hetta átti at staðið greitt í lógini. Umboðsmaðurin helt tó ongan iva vera um, at lógargrundarlagið heimilaði ikki, at skrivligi lønarseðilin einans varð sendur talgilt, t.v.s. at *talgilt* varð sett í staðin fyri *skrivligt* í skattalógini. Tí slík mannagongd hevði við sær, at allir løntakarar ikki fingu lønarseðilin.

Nakrar mánaðir seinni heimilaði Løgtingið Gjaldstovuni at senda almennu starvsfólkunum lønarseðilin talgilt. Í dag verður lønarseðilin sendur í Mínboks til teir løntakarar, sum sjálvbodnir hava meldað seg til Mínboks. Løntakari kann tó velja at fáa fráboðanina í pappírsformi.

Tað er ikki lutur umboðsmansins at taka støðu til ætlanirnar um talgilding – tó at ivi neyvan er um, at tekniska menningin kann vera við til at betra um rættartrygdina. Men tá myndugleikarnir greiddu frá orsøkunum til og fyrimununum við talgildari fyrisiting, helt umboðsmaðurin høvuðsdentin liggja á tekniskum, fíggjarligum og fyrisitingarligum atlitum. Løgliga viðgerðin tyktist vanta.

Samanumtikið varpaði viðgerðin av klagunum ljós á nøkur týðandi løglig viðurskifti í sambandi við talgilding av fyrisitingini.

- Lóggávan loyvir ikki landsstýrisfólkum at áseta ella myndugleikum at krevja, at borgarin skal samskifta talgilt við fyrisitingina. Tískil er neyðugt í hvørjum einstøkum føri at biðja Løgtingið um heimild til hetta.
- Ætlanirnar í báðum málunum byggja á eina talgilda skipan, sum myndugleikarnir ikki kunnu krevja, at borgarar skulu melda seg inn í. Ætlanirnar eru tí í stóran mun treytaðar av samtykki frá borgaranum. Skal tað áleggjast borgaranum at samskifta í ávísari skipan, er tørvur á yvirskipaðum lóggávutiltøkum.
- Lóggávan á ymsu málsøkjunum er í nógvum førum frá eini tíð, tá spurningurin um talgilding ikki var viðkomandi. Tá lagt verður um til talgilda fyrisiting er neyðugt at gjøgnumganga lóggávuna á málsøkinum til tess at staðfesta, um lóggávan er talgildingarklár, ella um hon hinvegin ásetir formkrøv, sum forða fyri talgildari málsviðgerð. Hetta eigur eisini at havast í huga, tá nýggj lóggáva verður smíðað.

# Talufrælsi, tagnarskylda og loyalitetur

**Sólja í Ólavsstovu,** umboðsmaður (2012)

*„Sum ein liður í loyalitetsskylduni móti arbeiðsplássinum mugu starvsfólk metast at hava bæði rætt og skyldu til at boða leiðsluni frá viðurskiftum, sum ikki eru nøktandi. Hetta skal tó verða gjørt á ein sømiligan hátt, og uttan at nýta ein ov harðan ella grovan málburð, sum av røttum kann skaða viðurskiftini á arbeiðsplássinum“ (Brot úr áliti frá LUM j. nr. 200700008)*

Hóast umboðsmaðurin bert hevur viðgjørt fáar klagur um brot á tagnar- og loyalitetsskylduna hjá alment settum starvsfólkum, verður hetta evnið stundum viðgjørt í almenna kjakinum. Tað eru serliga fjølmiðlafólk, sum finnast at alment settum starvsfólki, tí tey luttaka ov lítið í kjakinum um samfelagsviðurskifti gererelt ella um teirra arbeiðsøki serstakt, sjálv um tey sum serfrøðingar kunnu geva eitt gott og týdningarmikið íkast til samfelagskjakið.

Hví so er, er ikki lætt at siga. Onkur vil halda, at tey sum alment sett starvsfólk skulu vera loyal mótvegis arbeiðsgevaranum, og henda loyalitet vísa tey best við onki at siga alment. Onnur tora snøgt sagt ikki, tí tey eru bangin fyri teimum avleiðingum, sum tað kann hava fyri setanarviðurskiftini, um tey taka lut í almenna kjakinum.

Lógin um alment innlit og fyrisitingarlógin hava til endamáls at geva betri gjøgnumskygni og opinleika í almennu fyrisitingini. Tí er tað bæði í lagi og neyðugt, at almenn starvsfólk gera vart við viðurskifti, sum tey hava eina serligan vitan og kunnleika um.

## Talufrælsi fyritreyt fyri fólkaræði

Talufrælsi er grundarlag undir og ein fyritreyt fyri einum vælvirkandi fólkaræði. Talufrælsi er grundfest í § 77 í grundlógini, har ásett verður, at, „ein og hvør hevur rætt til á prenti, skrift og talu at almannakunngera sína hugsan, tó undir ábyrgd mótvegis dómstólunum“. Hetta talufrælsi er galdandi fyri bæði faklig viðurskifti, persónlig sjónarmið, politiska støðutakan, og tá ítøkilig viðurskifti, praktiskar vegleiðingar o.a. skulu endurgevast.

Í grundlógini er ásett eitt forboð ímóti, at almennir myndugleikar seta í verk sensur ella aðrar fyriskipanir, sum skerja talufrælsið. Hetta merkir, at ein myndugleiki kann ikki avmarka starvsfólk í at bera fram síni sjónarmið alment ella krevja, at starvsfólk skulu hava eina góðkenning frá arbeiðsgevaranum, áðrenn viðkomandi sigur sína hugsan alment. Talufrælsi er somuleiðis grundfest í grein 10 í mannarættindarsáttmálanum.

Almenn starvsfólk hava sama talufrælsi sum allir aðrir borgarar, og tey kunnu taka lut í almennum orðaskifti og koma við sínum persónligu sjónarmiðum. Hetta er eisini galdandi fyri viðurskifti innan fyri egið arbeiðsøki.

Tað hevur serliga stóran týdning í einum lítlum samfelagi, at alment starvsfólk – ikki minst í miðfyrisitingini – geva sítt íkast til almenna orðaskiftið. Orðaskifti um samfelagsviðurskifti hava stóran týdning fyri ta fólkaræðiligu samfelagstilgongdina, og tí er neyðugt at fáa mál lýst frá so nógvum sjónarhornum sum gjørligt.

Sambært donsku umboðsmans- og rættarsiðvenjuni á økinum hava almenn starvsfólk rætt til, eisini alment, at finnast at, um so er, at arbeiðsumstøður teirra ella tað virksemi, sum tey fáast við, má metast at vera óforsvarligt, t.d. orsakað av arbeiðsumstøðunum, vantandi játtan e.l.

Tað eru tó nakrar avmarkingar í talufrælsinum, men tær eru fáar. Starvsfólk hava ikki rætt til at úttala seg um viðurskifti, sum koma undir tagnarskyldu, ella at koma við ærumeiðandi viðmerkingum. Starvsfólk hava heldur ikki rætt til at koma við órímiliga grovum viðmerkingum, ella koma við (tilvitaðum) skeivum upplýsingum um týdningarmikil viðurskifti innan fyri egið arbeiðsøki.

Við atliti at avgerðatilgongd og virkisføri hjá almennum myndugleikum kunnu vera ávísar avmarkingar í frælsinum at útala seg um sítt egna arbeiðsøki. Henda avmarking er vanliga bert galdandi fyri leiðandi starvsfólk, so sum aðalstjórar, deildarstjórar og líknandi. Hetta er ikki galdandi fyri stovnsleiðarar, tá talan t.d. er um manglandi játtan o.l.

## Tagnarskylda avmarkar talifrælsið

Ein lógarásett tagnarskylda avmarkar í stóran mun talifrælsið hjá alment settum starvsfólki. Tagnarskyldan merkir, at starvsfólk ikki mugu lata víðari ella brúka trúnaðarupplýsingar. Reglur um hetta eru í kap. 8 í fyrisitingarlógini, jbr. § 152 og §§ 152c – 152f í revsilógini.

Tað kann ofta vera torført at seta greið mørk fyri tagnarskylduni. Tá talan er um eymar, persónligar, fíggjarligar ella sosialar upplýsingar, er lættari at staðfesta,

at hesar upplýsingar koma undir tagnarskyldu. Men ofta hava fólk ta skeivu fatan, at allar upplýsingar, sum tey fáa í starvi sínum, koma undir tagnarskylduna. Men soleiðis er veruleikin ikki. Sum ein vegleiðandi regla kann sigast, at allar upplýsingar, sum eru almennar sambært lógini um alment innlit, kunnu starvsfólk í útgangsstøðinum eisini siga sín hugsan um alment - tað valdast sjálvsagt mátan, hetta verður gjørt, nær og í hvørjum sambandi.

Í áliti frá LUM j.nr. 200900115 viðvíkjandi klagu um skrivliga ávaring til ein lærara á Vinnuháskúlanum førdi klagarin fram, at skúlastjórin á einum starvsfólkafundi framdi brot á tagnarskyldu sína, tá hann kunnaði um, at leiðslan hevði slept ætlanini um at siga klagaran úr starvi, og hevði broytt ætlanina til eina skrivliga ávaring. Upplýsingar um starvsviðurskifti, eitt nú um ætlanarskriv um uppsagnir ella ávaringar, sum skal latast einum alment settum persóni, eru ikki at meta sum trúnaðarupplýsingar. Hóast talan í hesum føri ikki eru um trúnaðarupplýsingar, er talan um persónsupplýsingar, sum koma undir persónsupplýsingarlógina (løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004). Sambært § 8, stk. 1, í persónsupplýsingarlógini, skulu persónsupplýsingar verða viðgjørdar samsvarandi góðum dátuviðgerðarsiði og kunnu ikki latast víðari til onnur uttan so, at talan er um samtykki frá tí persóni, sum upplýsingarnar viðvíkja, ella um víðarigevingin av persónsupplýsingum byggir á saklig atlit. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja nakað endamál við, at stjórin á Vinnuháskúlanum av sínum eintingum boðaði starvsfólkunum frá, at ætlanin var at geva klagaranum eina skrivliga ávaring. Hetta kann, umframt at vera tyngjandi fyri klagaran, geva ta óhepnu fatan, at avgerðin í veruleikanum var tikin, og at tað tí var nyttuleyst hjá klagaranum at gera viðmerkingar til ætlaðu ávaringina.

## Hóast loyalitetsskyldu kunnu starvsfólk vísa á brek

Reglunar um loyalitet og samstarvsvilja hjá alment settum starvsfólkum byggja á eina siðvenju, sum er galdandi fyri øll starvsfólk. Ein arbeiðsgevari kann krevja, at starvsfólk, meðan tey eru í starvi, eru samstarvsfús og loyal móti leiðslu og arbeiðsplássi sínum. Loyalitetskravið er galdandi bæði í og uttan fyri arbeiðstíð.

Í áliti frá LUM j. nr. 200700008 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu frá einum starvsfólki, sum hevði fingið eina munnliga ávaring. Ávaringin varð grundað á eitt skriv, sum starvsfólkið hevði skrivað aftaná eina kvøldvakt og síðani lagt á borðið hjá leiðaranum, umframt trý teldubrøv, sum starvsfólkið hevði sent leiðaranum. Í skrivinum fanst starvsfólkið serliga at vánaligu arbeiðsumstøðunum. Umboðsmaðurin vísti á, at almenn starvsfólk hava bæði rætt og skyldu at vísa á viðurskifti, sum eru óforsvarlig. Teldubrøvini vórðu skrivað sum framhald av umrødda skrivi, og eftir at leiðslan hevði konfronterað starvsfólkið við eina klagu frá einum avvarðandi. Umboðsmaðurin helt heldur ikki, at innihaldið ella tónalagið í teldubrøvunum til leiðaran var soleiðis háttað, at tað av røttum skuldi kunnað gera tað trupult hjá leiðaranum at samstarva við starvsfólkið. Umboðsmaðurin helt tí ikki, at grundarlag var fyri ávaringini, sum var latin, og mælti kommununi til at taka málið upp aftur til viðgerðar og at ógilda hesa ávaring.

## Atfinningin skal vera sømilig

Í áliti frá LUM j.nr. 200900115 viðvíkjandi klagu um skrivliga ávaring til ein lærara á Vinnuháskúlanum viðgjørdi umboðsmaðurin spurningin um vantandi samstarvsvilji eins og manglandi loyalitetur kundu verða sakligar orsøkir til at geva einum starvsfólki eina skrivliga ávaring. Umboðsmaðurin metti, at starvsfólk sum ein liður í loyalitetsskylduni móti arbeiðsplássinum mugu metast at hava bæði rætt og skyldu til at boða leiðsluni frá viðurskiftum, sum ikki eru nøktandi. Ein grundleggjandi partur av loyalitsskylduni hjá starvsfólki er, at um starvsfólk vilja gera vart við viðurskifti á arbeiðsplássinum, sum ikki eru nøktandi, skulu starvsfólk í fyrsta lagi venda sær til leiðsluna, soleiðis at leiðslan fær høvi at meta um málið og rætta møgulig misstøk og feilir. Umboðsmaðurin metti, at framferðarhátturin og skuldsetingarnar í skrivinum til Mentamálaráðið ikki vóru gjørdar á ein sømiligan hátt, eins og málburðurin í skrivinum vóru óhóskandi. Tað var uttan týdning í hesum sambandi, um ákærurnar vóru rættar ella skeivar. Umboðsmaðurin hevði tí onga viðmerking til, at Vinnuháskúlin av hesi orsøk valdi at geva klagaranum eina skrivliga ávaring fyri brot á loyalitetsskylduna.

## Atfinningarsom – men ikki illoyal

Danski umboðsmaðurin viðgjørdi í FOB nr. 98.319 eitt mál um trý starvsfólk hjá „Told og Skat“. Hesi høvdu í einum vikublaði verið atfinningarsom um avgerðina hjá stýrinum fyri „Told og Skat“ at leggja um partar í tolleftirlitinum. Leiðslan helt, at starvsfólkini vóru illoyal ímóti stovninum. Leiðslan gav starvsfólkunum boð um, at hon hvørki vildi hava slíka umrøðu ella hava framtíðarætlanir fyri stovnin almannakunngjørdar. Umboðsmaðurin helt, at alment sett starvsfólk, sum siga sína hugsan í arbeiðsørindum, mugu vera lýðin móti teimum boðum, sum leiðslan ásetir. Men leiðslan í einum stovni kann ikki skerja rættin hjá starvsfólkum at siga sína hugsan sum privatpersónar. Umboðsmaðurin metti, at tey trý starvsfólkini høvdu úttalað seg sum privatpersónar innan teirra starvsøki. Tey høvdu ikki tikið lut í avgerðini at leggja um partar í tolleftirlitinum og kendu tí ikki avgerðina. Starvsfólk eiga at kunna siga

sína meining um eitt arbeiðsøki og vera atfinningarsom uttan at vera mett sum illoyal. Tí metti umboðsmaðurin, at tey trý starvsfólkini áttu ikki at havt fingið átaluna frá leiðsluni.

## Hvassorðað tíðindaskriv í lagi

Eitt dømi um, hvar markið gongur hjá starvsfólki alment at finnast at viðurskiftum á arbeiðsplássinum, er at finna í FOB nr. 95.422 frá danska umboðsmanninum. Tveir sjúkrarøktarfrøðingar sendu eitt hvassorðað tíðindaskriv út um starvsviðurskiftini á einum amtssjúkrahúsi. Eina viku seinni sendi kommunan eitt tíðindaskriv um, at heilsunevndin harmaðist um, at sjúkrarøktarfrøðingarnir ikki høvdu brúkt ta vanligu álitismanna- og leiðsluskipanina á sjúkrahúsinum. Tá umboðsmaðurin viðgjørdi málið, segði amtið, at tíðindaskrivið skuldi skiljast sum eitt harmaskriv um framferðarháttin hjá sjúkrarøktarfrøðingunum, og at tað ikki var at skilja sum, at tær vóru átalaðar persónliga. Umboðsmaðurin skilti afturímóti orðingina í tíðindaskrivinum sum atfinning móti sjúkrarøktarfrøðingunum. Umboðsmaðurin helt atfinningina verða ógrundaða, tí at viðmerkingin hjá sjúkrarøktarfrøðingunum lá innan fyri vanliga talufrælsið hjá alment settum starvsfólki. Harafturat hevði umboðsmaðurin onga viðmerking til, at leiðslan á einum almennum arbeiðsplássi hevði ávísar innanhýsis skipanir til at føra fram sínar atfinningar. Men hugburðurin ella framferðin hjá leiðsluni má ikki verða soleiðis háttað, at hesar skipanir í veruleikanum kunnu skiljast sum sensurur. Tá leiðslan mælir til at brúka innanhýsis skipanir, má tað undirvstrikast mótvegis starvsfólkunum, at rætturin til at siga sína meining alment ikki hervið verður skerdur.

## Leiðslan kann áseta samskiftispolitikkin

Talifrælsi er bara vart ella er galdandi, tá eitt starvsfólk sigur sína hugsan egna vegna. Leiðslan á einum stovni kann áseta avmarkingar fyri, hvør kann gera viðmerkingar ella tosa við fjølmiðlar fyri myndugleikan ella stovnin, og leiðslan kann gera vegleiðingar fyri, hvussu viðmerkingin skal berast fram.

Tá eitt starvsfólk úttalar seg egna vegna, kann leiðslan ikki krevja, at viðkomandi skal hava eina góðkenning frammanundan, ella at leiðslan skal kunnast um hetta.

Um vandi er fyri, at almenningurin kann fáa ta fatan, at starvsfólk úttalar seg vegna myndugleikan, hevur tann, sum úttalar seg um sítt egna arbeiðsøki, ábyrgd av at gera greitt, at viðkomandi úttalar seg egna vegna.

## Summir stovnar hava samskiftispolitikk

Tað er torført at meta um, hvussu stórur tørvur er á serligum reglum ella vegleiðingum fyri tagnarskylduni mótvegis loyalitetsskylduni og talufrælsinum.

Ávísir almennir stovnar hava gjørt ein samskiftispolitikk fyri stovnin. Ein slíkur politikkur er at finna á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum, har m.a. stendur, at opinleiki, gjøgnumskygni, skjótleiki og trúvirði eru lyklaorð í samskiftinum hjá Fíggjarmálaráðnum við umheimin, og at endamálið við samskiftinum er at geva borgarum, fjølmiðlum og almenninginum annars eina rættvísandi mynd av virkseminum hjá Fíggjarmálaráðnum.

## Almenna fatanin

Hóast almennir stovnar hava ein samskiftispolitikk, sum ásetir leiðreglur fyri, hvussu tað almenna samskiftið við umheimin skal vera, kann tann vanliga fatan vera, at starvsfólk ikki hava rætt til at úttala seg um ávís viðurskifti, ella at taka lut í tí almenna kjakinum. Men sum áður nevnt hevur fyrisitingarlógin og lógin um alment innlit júst til endamáls at geva betri gjøgnumskygni og opinleika í almennu fyrisitinga, og tí er tað bæði í lagi og neyðugt, at almenn starvsfólk gera vart við viðurskifti, sum tey hava eina servitan um.

# Valdsreingjan

**Birta Biskopstø,** ráðgevi (2014)

*„Grundað upplýsingar í málinum helt umboðsmaðurin tað vera sannlíkt, at landsstýrismaðurin, eins og hinir limirnir í makrelbólkinum, vóru greið yvir, at kvotan hjá línuskipunum møguliga ikki fór at verða fiskað av línuskipunum. Av tí at línuskipini ikki høvdu tann neyðuga reiðskapin til at fiska makrel, hevði umboðsmaðurin torført við at síggja, at tað var sakligt í makrelkunngerðini at tilluta línuskipum eina makrelkvotu, sum tey ikki kundu gagnnýta." (Brot úr áliti hjá umboðsmanninum, LUM 14/00045)*

Tað er ikki loyvt almennum myndugleikum at fremja valdsreingjan. Tað kann m.a. sigast á tann hátt, at ikki er loyvt almennum myndugleikum at misnýta tær heimildir, sum løggávuvaldið hevur ásett við lóg. Men hugtakið er breiðari, tí almennir myndugleikar kunnu heldur ikki fylgja ósakligum áhugamálum á økjum, har ongin skrivað lóg er. Hugtakið „valdsreingjan", á donskum „magtfordrejning", er ment gjøgnum løgfrøðiligar bókmentir av dómstólunum umframt gjøgnum kæruviðgerðir og hevur verið ein týðandi partur í menningini av grundleggjandi kravinum um sakliga málsviðgerð, sum verður sett fyrisitingini.

Hóast vit sjáldan síggja orðið „valdsreingjan" á skrift, so er valdsreingjan eitt hugtak, sum verður nýtt, tá ið kærustovnar og dómstólar royna avgerðir, ið fyrisitingin hevur tikið. Umboðsmaðurin hevur somuleiðis hugtakið við í viðgerðini í sambandi við viðgerð av klagum og í sínum eftirkanningararbeiði av avgerðum hjá fyrisitingini. Hugtakið valdsreingjan fer tí, í hesi grein, í stóran mun at verða lýst við at taka dømi úr Makrelálitinum, LUM 14/00045.

## Hugtakið valdsreingjan

Sambært Poul Andersen í „Dansk Forvaltningsret (1965)" á bl.s. 371 ff. eru 5 formar fyri valdsreingjan:

> „1) hvis en af dens ansatte varetager egne private interesser, 2) hvis myndigheden forfølger private interesser, som er den eller sagen uvedkommede (disse hensyn kan altså være lovlige, f.eks. hvis de er legitimeret ved lov), 3) hvis myndigheden lader sin forvaltning af skønsmæssige beføjelser bevæge af parti- eller fagforeningspolitiske grunde, 4) hvis myndigheden begunstiger kommunale erhvervsdrivende fremfor udenbys erhvervsdrivende eller 5) hvis myndigheder lader ulovlige finansielle hensyn være afgørende for en skønsmæssig afgørelse."

Tá hugtakið verður viðgjørt, verður millum annað skilt millum eina subjektiva (moralska) og eina objektiva (tekniska) fatan og nýtslu av hugtakinum valdsreingjan.

## Subjektiv (moralska) valdsreingjan

Subjektivt verður sagt, at valdsreingjan er ein spurningur um at fordøma misnýtslu og at fyribyrgja siðaspillu av myndugleikapersónum. Her er talan um at forða fyri, at tann, sum tekur avgerðir, tekur avgerðir út frá privatum áhugamálum ella kenslum, sum sambært heimildini, sum viðkomandi hevur at arbeiða eftir, eru óviðkomandi. Í summum førum sæst, at viðkomandi myndugleikapersónur í sínum arbeiði tekur atlit at privatum, persónligum viðurskiftum, sum eru óviðkomandi í málinum, sum viðkomandi arbeiðir eftir og skal halda seg innanfyri.

## Objektiv (legalitetsteknisk) valdsreingjan

Objektivt verður hugtakið um valdsreingjan sæð sum ein spurningur um heimild. Mett verður um, hvørt heimildarkravið er lokið, eins og mett verður um, hvørt krøv um sakliga viðgerð og viðkomandi atlit eru lokin, tá ið løggávan eitt nú loyvir einari metan.

## Makrelálitið

Umboðsmaðurin hevur ikki í nakrari niðurstøðu beinleiðis nevnt, at talan kann vera um valdsreingjan hjá myndugleikanum. Hinvegin hevur umboðsmaðurin í fleiri niðurstøðum viðgjørt spurningar um, hvørt atlit, sum myndugleikin hevur tikið, eru viðkomandi og saklig í sambandi við málsviðgerðina, tá ið myndugleikin hevur tikið eina avgerð. Hugtakið hevur tí eisini hjá umboðsmanninum verið ein týðandi partur av grundarlagnum undir viðgerðini av einstøkum málum.

Sum dømi um hetta kann nevnast, at í áðurnevnda Makrelálitinum hjá umboðsmanninum metti umboðsmaðurin um, hvørt myndugleikin hevði nýtt viðkomandi og saklig atlit, tá ið línuskipini við makrelkunngerðini fyri 2012 fingu tillutað 5.000 tons av makreli.

Partar av hesum áliti vísa, at umboðsmaðurin, eins og aðrir myndugleikar, sum royna avgerðir hjá fyrisitingini, metir um, í hvønn mun virksemið hjá myndugleikanum liggur innanfyri tey endamál og teir karmar, sum lógin heimilar.

## Vóru saklig atlit tikin, tá ið makrelbýtið varð ásett

Umboðsmaðurin vísti í álitinum á, at hóast ongar formligar reglur eru í fyrisitingarlógini um, hvussu mannagongdin skal vera, tá ið umsitingin fyrireikar og arbeiðir við at gera kunngerðir, eru fyrisitingarligar meginreglur eisini galdandi, tá ið myndugleikin ger almennar reglur, eitt nú kunngerðir, eins og hesar formligu reglur eru galdandi fyri avgerðir, sum fyrisitingin tekur.

Tað kann her nevnast, at tað, at myndugleikin skal virða endamálið við lógini og halda seg innanfyri teir karmar, sum lógin setir fyri virkseminum, eisini er galdandi fyri ítøkiliga arbeiðið við at gera makrelkunngerðina.

Í álitinum vísti umboðsmaðurin á, at ein av fortreytunum fyri, at málsviðgerðin kundi vera nøktandi, og málið kundi vera fakliga væl upplýst, var, at arbeiðið var fyrireikað av fyrisitingini. Verður fakliga fyrisitingin sett til viks, og málsviðgerðin løgd til ein bólk av politikarum, er eingin trygd fyri fakliga dygdargóðari fyrisiting, sum upplýsingarskyldan er ætlað at borga fyri.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at tað, at politikarar standa fyri allari týðandi málsviðgerð í einum máli, er ikki einans brot á upplýsingarregluna, men tekur eisini fortreytirnar undan, at fyrisitingin kann virka samsvarandi grundleggjandi krøvum um sakliga fyrisiting, sum ikki bara er galdandi fyri málsviðgerð í ítøkiligum málum, men eisini alment virksemi sum gerð av kunngerðum. Umboðsmaðurin metti, at einans fakliga fyrisitingin kundi gera nøktandi fakliga meting av, hvørji atlit skuldu takast við, fyri at kunngerðin um makrelfiskiskap, herundir serliga makrelbýtið millum skipabólkarnar, kundi lúka krøvini til sakliga og lógliga fyrisiting.

Her skal viðmerkjast, at tað eisini í mun til læruna um valdsreingjan er týdningarmikið at hava fakliga førleikan innan fyrisiting við í viðgerðini fyri á tann hátt at minka um vandan fyri, at ósaklig og óviðkomandi atlit verða tikin. Ein uppgáva hjá fyrisitingini er júst at vegleiða politisku myndugleikarnir um, hvørjar heimildir galdandi lóggáva á einum ítøkiligum øki inniheldur, soleiðis at fakliga fyrisitingin saman við politiska myndugleikanum kann virka fyri, at avgerðir, ið verða tiknar, eru innanfyri galdandi lógarkarmar.

Í umrødda álitið metti umboðsmaðurin, at viðgerðin av felagskvotuni, herundir eisini býtið av tonsatali til teir ymisku skipabólkarnar í sambandi við gerð av makrelkunngerðini, kundi bent á eina politiska viðgerð av makrelbýtinum heldur enn eina viðgerð eftir vanligum fyrisitingarrættarligum meginreglum. Hetta helt umboðsmaðurin ikki vera nøktandi.

Av teimum uppritum og skjølum, sum vóru í málinum, dugdi umboðsmaðurin ikki at síggja, hvørji atlit vóru tikin, tá ið býtið av makrelkvotuni varð ásett, og tí kundi umboðsmaðurin ikki meta um, hvørt tað var sakligt at tilluta línuflotanum 5.000 tons av makreli at fiska, eins og umboðsmaðurin ikki dugdi at síggja, um umsitingin í Fiskimálaráðnum hevði luttikið beinleiðis í arbeiðinum at viðgera kvotubýtið av makrelinum. Hetta helt umboðsmaðurin vera alt annað enn nøktandi, men av tí at einki var skjalfest í sambandi við, hvussu býtið av felagskvotuni av makreli millum skipabólkarnar var íkomið, hevði umboðsmaðurin ikki møguleika at siga, um býtið var grundað á saklig og viðkomandi atlit.

Endamálið við makrelkunngerðini var, at ymiskir skipabólkar fingu makrelkvotu at fiska. Greitt er, at ein meginregla í fyrisitingarrættinum er, at tað er bann móti at røkja ósaklig áhugamál, eisini tá talan er um gerð av kunngerðum.

Spurnartekin kann tí verða sett við, um endamálið í kunngerðini varð rokkið við at geva línuflotanum part av makrelinum, tí tað var ivingarsamt, um línuskipini fóru til makrelfiskiskap.

Tað framgekk av einum skrivi í málinum, sum landsstýrismaðurin hevði skrivað til ein lim í politiska makrelbólkinum, at: „... Sum einasti bólkur í fiskidagaskipanini kunnu línuskip verða skift út uttan støddaravmarking. Tað ber tí til at flyta veiðiloyvi av einum línuskipi á eitt størri skip, sum so kann gagnnýta tey rættindini, sum línuskipið hevði, í hesum førinum at fiska makrel av felagskvotu upp til 500 tons. Hetta kunnaði eg um á fundinum í „makrelbólkinum“, og tí var tann broytingin gjørd, at bólkur 3, línuskip, vórðu koyrd í ein bólk fyri seg.“

Umboðsmaðurin metti, at hetta svarið kundi bent á, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, eins og hini í makrelbólkinum, eftir øllum at døma vóru greið yvir, at kvotan, sum línuskipini fingu tillutað, møguliga ikki fór at verða fiskað av línuskipunum. Umboðsmaðurin spurdi landsstýrismannin undir viðgerðini av málinum, um ráðið metti, at línuskip høvdu veiðireiðskap at fiska makrel í 2012, men fekk ikki eitt nøktandi svar upp á fyrispurningin. Umboðsmaðurin helt tað vera sannlíkt, at Fiskimálaráðið var vitandi um, at línuskipini ikki høvdu útgerð at fiska makrel í 2012 og tí ikki høvdu møguleika at fiska ta kvotu, sum var tillutað teimum í makrelkunngerðini. Av tí at línuskipini ikki høvdu tann neyðuga reiðskapin til at fiska

makrel, hevði umboðsmaðurin torført við at síggja, at tað var sakligt í makrelkunngerðini at tilluta línuskipum eina makrelkvotu, sum tey ikki kundu gagnnýta.

## Samanumtikið

Vanligu fyrisitingarrættarligu meginreglurnar, sum bann móti valdsreingjan og bann móti at røkja ósaklig áhugamál, eru ikki einans galdandi fyri mál, har avgerð fer at verða tikin, men eisini fyri arbeiðið hjá myndugleikum, tá eitt nú kunngerðir verða gjørdar. Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at tillutanin av makrelkvotu til línuskipini ikki, út frá verandi regluverki, var grundað á saklig og viðkomandi atlit.

Endamálið við at tilluta makrelkvotu til línuflotan var eftir øllum at døma at geva hesum skipabólki møguleika fyri at flyta makrelkvotuna víðari til onnur skip at fiska.

Lógarverkið, sum var grundarlagið undir makrelkunngerðini, gevur ikki myndugleikunum heimild til at veita skipum kvotu, sum ikki hava møguleika fyri sjálv at fiska hesa kvotu, og tí kann málið um tillutan av hesum kvotum síggjast sum eitt dømi um, at myndugleikarnir hava nýtt lógargrundarlagið á ein annan hátt, enn endamálið við lógini gevur heimild til.

# Vegleiðing

**Gurið Joensen,** ráðgevi (2019)

*Ein fyrisitingarmyndugleiki skal í tørvandi mun veita vegleiðing og hjálp til persónar, sum venda sær til myndugleikan við spurningum innan málsøkið hjá myndugleikanum (§ 7, stk. 1 í Fyrisitingarlógini)*

Myndugleikar hava skyldu til at vegleiða borgarum, sum venda sær til myndugleikan. Skilt verður ímillum vegleiðingarskyldu smb. § 7 stk. 1 í fyrisitingarlógini, vegleiðingarskyldu eftir vanligum rættargrundsetningum og góðum fyrisitingarsiði og vegleiðingarskyldu, sum er ásett í serlóggávu.

## Vanlig vegleiðingarskylda

Endamálið við vegleiðingarskylduni er at tryggja borgarum neyðuga kunning um rættarstøðu teirra, og soleiðis forða fyri, at teir vegna vantandi vitan, feilir ella misskiljingar verða fyri vanbýti. Myndugleikar skulu í mun til tørvin veita vegleiðing og hjálp til borgarar, sum venda sær til myndugleikan við spurningum innan málsøkið hjá myndugleikanum.

Vegleiðingarskyldan sambært § 7 stk. 1 í fyrisitingarlógini er bert galdandi í mun til mál, har myndugleikin hevur ella fer at taka avgerð smb. § 2 stk. 1 í fyrisitingarlógini. Tað er sostatt ikki eitt krav, at myndugleikin vegleiðir og hjálpir í sambandi við veruligt fyrisitingarvirksemi (faktisk forvaltningsvirksemhed), men myndugleikin skal sambært vanligum rættargrundsetningum og góðum fyrisitingarsiði veita vegleiðing og hjálp til borgarar í sambandi við alt sítt virksemi, herundir eisini í sambandi við veruligt fyrisitingarvirksemi. Myndugleikin kann somuleiðis hava skyldu til at vegleiða í øðrum málum enn avgerðarmálum, um hetta fylgir av serlóggávu, ið er galdandi fyri myndugleikan.

Sambært orðaljóðinum í § 7 stk. 1 er vegleiðingarskyldan bert galdandi, tá borgarin sjálvur vendir sær til myndugleikan. Hóast hetta, er vanliga hugsanin, at vegleiðingarskyldan eisini er galdandi í støðum, har borgarin ikki beinleiðis spyr myndugleikan, men har tað vildi verið natúrligt og viðkomandi at vegleitt borgara, tí tað tyktist sum borgarin ikki kennir síni rættindi. Um borgari hevur biðið um vegleiðing, skal myndugleikin ikki avmarkað vegleiðingina til júst tann spurning, ið borgarin hevur sett, men skal vegleiða um tey viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri málið.

Vegleiðingin eftir § 7 stk. 1 í fyrisitingarlógini er eftir sínum orðaljóði bert galdandi innan málsøkið hjá myndugleikanum. Spurningar um onnur málsøki, eiga tí so vítt gjørligt at verða sendir ella vístir til annan viðkomandi myndugleika at svara.

Tað veldst um tær ítøkiligu umstøðurnar, hvussu vegleiðingin eigur at vera givin. Tað er onki krav til innihaldið og vavi av vegleiðingini. Vegleiðingin er knýtt at teimum ítøkiligu umstøðunum í málinum, og avgerandi er, at innihaldið í vegleiðingini tryggjar, at borgarin ikki verður fyri tapi av rættindum vegna feilir, vantandi kunnleika ella misskiljingum. Tørvurin á vegleiðing kann vera ymiskur alt eftir, hvønn borgara talan er um, og um hesin hevur serkøna umboðan ella ikki. Vegleiðingin má tí tillagast tí ítøkiliga tørvinum hjá tí einstaka. Myndugleikin skal í hesum sambandi ansa eftir ikki at viðgera málið út í æsir, soleiðis at talan í veruleikanum eru eini forhondsboð um niðurstøðuna í einum komandi ella ítøkiligum máli.

Ein myndugleiki skal eisini hjálpa borgarum í sambandi við at útfylla umsóknir, oyðibløð og annað, um tørvur er á tí og eisini vegleiða um málsgongdina í málinum og viðkomandi tíðarfreistir.

Vegleiðingin frá myndugleikanum skal, uttan mun til hvussu neyv ella yvirskipað hon er, verða løgfrøðiliga røtt og sonn. Hevur ein myndugleiki givið skeiva ella ófullfíggjaða vegleiðing, eigur myndugleikin sum skjótast og av egnum ávum at rætta vegleiðingina.

Vegleiðingin kann vera skrivlig ella munnlig, alt eftir, hvussu umstøðurnar eru. Er vegleiðingin givin munnliga og talan er um týðandi málsviðgerðarstig í einum avgerðarmáli, skal myndugleikin sum skjótast gera notat um vegleiðingina, so skjalprógv er fyri, hvat vegleitt er um og hvussu.

Myndugleikin skal vanliga tryggja, at móttakarin er førur fyri at skilja vegleiðingina. Eftir umstøðunum kann t.d. verða viðkomandi at bjóða tulkatænasta ella at umseta til annað mál, um hetta eftir umstøðunum í ítøkiliga málinum er neyðugt.

## Serlóggáva um vegleiðingarskyldu

Umframt vanligu vegleiðingarskyldu eftir § 7 stk. 1 í fyrisitingarlógini kunnu myndugleikar vera álagdir vegleiðingarskyldu í serlóggávu.

Hetta er m.a. galdandi innan almannaøki. Almannaverkið hevur sambært § 1, stk. 1 og 2, í forsorgarlógini og í kunngerð, fingið álagt eina víðkaða vegleiðingarskyldu. Henda víðkaða vegleiðingarskyldan er eitt slag av heildarvegleiðing, sum inniber, at Almannaverkið ikki bara hevur skyldu at vegleiða alment og persónliga innan almannalóggávuna, men eisini hevur skyldu at bjóða ávísum borgarum framhaldandi vegleiðing, t.e. um viðurskifti, sum kunnu gera borgaran betri føran fyri frameftir at loysa trupulleikar sjálvar um fíggjarlig, arbeiðslig og persónlig viðurskifti.

Umboðsmaðurin viðgjørdi hendan spurning í máli LUM 19/00062, har umboðsmaðurin metti, at klagarin ikki hevði fingið nøktandi vegleiðing í mun til ta strongdu støðu, klagarin var í, og sum gjørdi, at klagarin hevði sagt seg úr starvi og av hesum kom í eina fíggjarliga óhepna støðu.

## Kunning til almenningin

Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur ein myndugleiki at geva borgarum almenna kunning um sítt virksemi og teirra praksis. Hetta kann t.d. gerast við kunning á heimasíðuni hjá myndugleikanum ella við at myndugleikin ger kunningarfaldarar, sum eru alment atkomuligt.

Myndugleikin eigur at tryggja sær, at tær upplýsingar, ið eru atkomuligir á heimasíðu og í faldaranum eru rættar, greiðar, lættskiljandi og dagførdar.

Kunningarskyldan kann eisini verða ásett í serlóggávum. Almannaverkið hevur sambært kunngerð nr. 38 frá 22. mars 1993 um ráðgevingar- og vegleiðingarskyldu, skyldu til at kunna almenningin um teirra rættindi sambært almannalóggávuni. Kunngerðin ásetur, at hetta kann gerast í skapi av leiðbeiningum, lýsingum í dagbløðum, tíðindaskrivum, smáritum, bóklingum v.m. Kunningartilfar til ávísar bólkar av borgarum sum t.d. avlami – og fólkapensjonistum v.m. skal verða tillagað eftir tørvinum hjá teimum ymisku bólkunum, og Almannaverkið skal ansa eftir, at kunningartilfarið er til taks á almennum støðum, so sum bókasøvnum, kommunulæknum, sjúkrahúsum, arbeiðsloysistrygging- og ávísing o.l.

Í Danmark er almenna kunningarskyldan ásett í nýggju offentlighedslógini § 17. Áður fylgdi almenna kunningarskyldan eins og í Føroyum av góðan fyrisitingarsiði og ásetingum í serlóggávu.

## Senda víðari til rætta myndugleika

Sambært § 7, stk. 2 í fyrisitingarlógini skal ein myndugleiki sum fær eina skrivliga áheitan, sum ikki viðvíkur málsøkinum hjá honum, um gjørligt senda áheitanina til rætta myndugleika. Vendir ein borgari seg persónliga ella umvegis telefon til skeivan myndugleika, skal myndugleikin vegleiða borgaran um, hvønn myndugleika hann skal venda seg til. Er talan um umsóknir ella kærufreistir v.m., verður móttøkan av skrivi og skjølum roknað sum innkomin, tá tann skeivi myndugleikin móttók skjølini.

Skyldan at senda málið víðari er bert galdandi, um hetta er gjørligt. Er áheitanin so ógreið, at tað ikki við rímiligari vissu kann sigast, hvør er rætti myndugleiki at viðgera áheitanina, hevur ein myndugleiki ikki skyldu at senda málið til annan myndugleika.

Tað kunnu eisini verða serligar umstøður í málinum sum gera, at myndugleikin ikki sendur tað víðari. Hetta er greitt, um borgarin ikki ynskir hetta, tí talan er um sera privat viðurskifti, sum t.d. revsiverd viðurskifti ella álvarsama sjúku. Myndugleikin skal í slíkum førum vegleiða borgaran um, hvønn myndugleika hann eigur at venda sær til.

## Kæruvegleiðing

Sambært § 24 í fyrisitingarlógini skula avgerðir, sum kunnu kærast til annan fyrisitingarmyndugleika, tá tær verða fráboðaðar skrivliga, hava vegleiðing um kærumøguleika, við tilskilan av kærustovni og upplýsing um mannagongd, tá kært verður og um eina møguliga tíðarfreist. Hetta er tó ikki galdandi um so er, at avgerðin til fulnar gongur viðkomandi á møti. Er noktandi avgerðin fráboðað munnliga, er vanliga vegleiðingarskyldan í § 7 stk. 1 galdandi og sambært góðum fyrisitingarsiði skal myndugleikin eisini geva kæruvegleiðing, um ein noktandi avgerð verður fráboðað munnliga. Er avgerð og kæruvegleiðing givin munnliga, eigur myndugleikin at gera notat um avgerð og vegleiðing, so hesi viðurskifti eru skjalfest.

Umboðsmaðurin viðgjørdi hesi viðurskifti í grein í ársfrágreiðingini fyri 2015 og í LUM 1400007. Málið snúði seg um, at Landssjúkrahúsið boðaði avgerðir um fylgjara í samband við viðgerð uttanlands, munnliga. Umboðsmaðurin hevði ta fatan, at ein sjúklingur, sum fær noktað fylgjara, eigur at fáa avgerðina fráboðaða skrivliga saman við eini grundgeving. Umboðsmaðurin vísti annars á, at tá tílíkar avgerðir verða fráboðaðar munnliga, er notatskyldan og vegleiðingarskyldan um kæruvegleiðing galdandi.

## Vegleiðing um freistir fyri rættarførslu v.m.

Sambært § 25 í fyrisitingarlógini skulu avgerðir, sum bert kunnu leggjast fyri dómstólarnar innanfyri eina lógarásetta freist fyri, nær málið skal vera lagt fyri rættin, hava upplýsing um hetta.

Myndugleikin skal ikki bara vísa á møguleikan og freistina fyri at leggja málið fyri rættin, men eisini vísa á, hvønn rætt málið skal leggjast fyri, við adressu og við ávísing um, hvønn málið skal reisast ímóti. Eisini eigur myndugleikin at vísa borgaranum á, at hann kann venda sær til viðkomandi rætt fyri at fáa neyvari vegleiðing um t.d., møguleikarnar fyri rættarhjálp og fríari rættarførslu.

Tað er vanliga ikki ein lógarskylda hjá myndugleikunum at upplýsa borgarar um møguleikan at klaga til Løgtingsins umboðsmann ella til annan eftirlitsmyndugleika sum t.d. kommunala eftirlitið. Hetta er eisini galdandi, hóast freistir kunnu vera tengdar at hesum klagumøguleikum.

Tað fylgir tó av vanligu vegleiðingarskylduni og góðum fyrisitingarsiði, at tá tað má metast at vera tørvur á tí, eigur myndugleikin at upplýsa borgarar um møguleikan at venda sær til ein eftirlitsmyndugleika sum t.d. kommunala eftirlitið ella Løgtingsins umboðsmann. Hetta vil vanliga vera í førum, har tað ikki er nakar fyrisitingarligur kærumøguleiki ella um borgarin spyr, hvørjir klagumøguleikar eru.

## Fylgjur av vantandi ella ikki nøktandi vegleiðing

Vantandi ella ikki nøktandi vegleiðing vil sum oftast ikki vera avgerandi fyri, um avgerðin er galdandi ella ikki. Men hevur vegleiðingin verið ófullfíggjað ella beinleiðis skeiv, kann hetta eftir ítøkiligari meting av umstøðunum í málinum, gera, at myndugleikin skal rætta feilin og stilla borgaran, sum um røtt vegleiðing varð givin og borgarin hevði virkað eftir hesum.

Vantandi vegleiðing um freistir fær vanliga ta fylgju, at freistin verður útsett.

Um myndugleikin als ikki hevur givið vegleiðing ella ikki hevur givið nøktandi vegleiðing og hetta hevur viðført tap av rættindum hjá einum borgara, kann tað eftir ítøkiligari meting av umstøðunum í málinum føra til endurgjaldskrav.



*Partur 3.*

# Barnarættindi

# Børn hava eisini rætt

**Sólja í Ólavsstovu,** umboðsmaður (2014)

*Umboðsmaðurin er fyri øll børn – eisini tey, ið ikki eru før fyri sjálvi at klaga. Í hesum førum eru foreldur ella onnur vaksin vælkomin at klaga fyri eitt barn. Umboðsmaðurin tekur altíð eina klagu í álvara og roynir at hjálpa, um tað er gjørligt.*

„Børn hava eisini rætt" er yvirskriftin á kunningarátakinum, sum umboðsmaðurin hevur valt at brúka í sambandi við, at umboðsmaðurin tann 1. oktober 2014 fekk uppgávuna at hava eitt serligt eftirlit við, at ST-Barnarættindasáttmálan verður hildin.

Endamálið við hesum eftirlitinum er at styrkja rættartrygdina og rættindini hjá børnum og ungum í Føroyum. Hóast hugburðurin leingi hevur verið, at foreldur ikki hava rætt at brúka harðskap í uppalingini av børnum, varð hetta ikki beinleiðis bannað fyrr enn í 2007, tá Løgtingið samtykti at seta „Anordning nr. 228 af 15. marts 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær" í gildi í Føroyum. Sambært § 2, stk. 2, í hesari fyriskipan hava børn rætt til umsorgan og tryggleika, og skulu børn viðgerast við virðing og ikki vera fyri kropsligum harðskapi.

Danir framdu somu lógarbroyting í 1997, og hendi hetta eftir áheitan frá Barnanevndini hjá ST, sum heitti á Danmark um at taka neyðug stig til tess at steðga harðskapi móti børnum, herundir eisini í heimunum.

## ST-Barnarættindasáttmálin

ST samtykti í 1989 ein altjóða sáttmála um barnarættindi. Meira enn 140 lond hava skrivað undir uppá, at tey vilja halda tað, sum stendur í Barnarættindasáttmálanum. Løgtingið setti Barnarættindasáttmálan hjá ST í gildi í Føroyum í 1993.

Barnarættindasáttmálin sigur, at børn hava sjálvstøðug rættindi eins og vaksin og eiga at verða tikin við og hoyrd, tá ið avgerðir verða tiknar, sum ávirka tey og umstøður teirra. Í hesum sáttmála stendur eisini, at børn hava brúk fyri vernd, og at tey hava grundleggjandi borgarlig, búskaparlig, politisk, sosial og mentanarlig rættindir.

Umboðsmaðurin hevur fingið sáttmálan umsettan til føroyskt. Ætlanin er at fara út á skúlar og kunna um sáttmálan og teir møguleikar, sum børn hava at gera vart við síni rættindi til at klaga til umboðsmannin.

Ein grein um „Hoyring av børnum" og ST-Barnarættindasáttmálin er at finna í hesi ársfrágreiðing.

## Óheftur stovnur

Tað hevur leingi verið umrøtt alment, at vit skulu hava ein óheftan stovn í Føroyum, sum skal hava eftirlit við, at rættindini hjá børnum verða vird. Føroyar hava bundið seg til at arbeiða fyri at betra korini og rættindini hjá børnum, tá Løgtingið setti Barnarættindasáttmálan hjá ST í gildi.

Í eini fráboðan í 2011 segði ST, at rættartrygdin og rættindini hjá børnum og ungum í Føroyum ikki vóru nóg góð. Landsstýrið gjørdi tí av at seta nøkur tiltøk í verk, sum skuldu tryggja, at órættur ikki verður gjørdur móti børnum í Føroyum.

Eitt samt Løgting avgjørdi, at umboðsmaðurin skuldi hava eftirlit við rættartrygdini hjá børnum og ungum. Umboðsmaður hevur longu frammanundan eftirlit við, at myndugleikarnir ikki vanrøkja sínar skyldur, gera nøkrum fólkum órætt, og viðger klagur frá fólki, sum halda, at ein myndugleiki hevur borið seg skeivt at móti teimum.

Eitt grundleggjandi eyðkenni við umboðsmansstovninum er, at hann virkar óheftur av øðrum myndugleikum og áhugamálum, og umboðsmaðurin ger sjálvur av, hvørji mál hann tekur til viðgerðar. Uppgávurnar á økinum verða í stóran mun røktar innan karmarnar í galdandi lóg.

## Eftirlitið

Tað er ein av uppgávunum hjá umboðsmanninum at gera almennu myndugleikarnar varug við, um lóggávan ella aðrar fyriskipanir ikki eru í samsvari við Barnasáttmálan. Ítøkiliga fer eftirlitið hjá umboðsmanninum at verða framt á tann hátt, at umboðsmaðurin viðger klagur um viðurskifti hjá børnum, tekur mál upp av egnum ávum, fer á eftirlitsvitjanir á m.a. stovnum, har børn eru, og við at gera Løgting og landsstýri varug við, um lógir og fyrisitingarligar ásetingar ikki eru sambæriligar við barnarættindasáttmálan.

Týdningarmesta broytingin í verandi arbeiði hjá umboðsmanninum hevur verið, at nú er heimild at fremja

eftirlitsvitjanir á privatum stovnum og í fosturheimum. At neyðugt er við hesi heimild kemst av, at eisini einstakir stovnar og privat heim hava ábyrgd av børnum. Hetta er t.d. galdandi fyri frískúlar, bú- og umlættingarstovnar, sum eru privatir, og fosturfamiljur sambært barnaverndarlógini. Grundað á stóra talið av fosturfamiljum væntast umboðsmaðurin einans at brúka hesa heimild, um ein fosturfamilja hevur fleiri fosturbørn og tískil kann sigast at hava stovnslig eyðkenni.

## Málbólkurin

Umboðsmaðurin skal halda eyga við, um rættindini hjá børnum verða hildin og vird av almennum myndugleika. Øll børn kunnu koma í støður, har teirra rættindi ikki verða vird ella tey kunnu hava tørv á, at onkur hyggur eftir og metir um tær umstøður, sum tey liva undir, og sum er brot á teirra rættindi. Umboðsmaðurin ger ikki mun á, hvussu gomul børn eru, teirra sosialu støðu ella um tey sjálvi eru før fyri at klaga til umboðsmannin. Tað eru tó børn og ung, sum umboðsmaðurin metir seg hava eina serliga ábyrgd at verja. Tað eru tey, sum hava torført við sjálvi at tala sína sak, eru á samdøgursstovnum, bera brek ella eru sett heiman á stovn ella fosturfamilju.

## Hvør kann klaga

Børn og vaksin kunnu klaga til umboðsmannin, um tey halda, at ein almennur ella privatur myndugleiki ella stovnur ikki hevur borið seg rætt at móti einum barni.

Tað er sjálvandi ikki alt, sum kann klagast til umboðsmannin. Men børn og ung kunnu altíð venda sær til umboðsmannin, um tey hava trupulleikar við onkran myndugleika. Um umboðsmaðurin ikki kann veita hjálp, kann umboðsmaðurin vísa á onkran annan, sum kann hjálpa.

Børn og ung kunnu til dømis klaga til umboðsmannin:

- Um skúlin ella ein annar myndugleiki ikki vil hjálpa teimum ella ikki ger nóg mikið fyri at hjálpa.
- Um skúlin ella ein annar myndugleiki hevur tikið eina avgerð, sum tey eru ósamd í ella kedd av.
- Um tey búgva hjá eini fosturfamilju ella á einum stovni, og tey halda, at tey verða skeivt viðfarin.

Umboðsmaðurin er sum áður nevnt fyri øll børn – eisini tey, ið ikki eru før fyri at klaga sjálvi. Í hesum førum eru foreldur ella onnur vaksin vælkomin at klaga fyri eitt barn. Umboðsmaðurin tekur altíð eina klagu í álvara og roynir at hjálpa, um tað er gjørligt.

## Kunningarátak

Umboðsmaðurin hevur ikki royndir at viðgera klagur frá børnum. Heldur ikki hava børn og ung stóran kunnleika til, hvørjar møguleikar tey hava til at klaga til umboðsmannin. Tað hevur tí verið neyðugt at gera nakað burtur úr at kunna almenning og serliga børn og ung um møguleikarnar at klaga til umboðsmannin, og hvat umboðsmaðurin kann gera fyri at hjálpa klagarunum.

Fyrsta stigi til hetta hevur verið at gera eina nýggja barnavinarliga heimasíðu, sum er ein roynd á ein einfaldan hátt at greiða frá teimum rættindum børn og ung hava. Heitið á heimasíðani er: **bum.fo**. Harumframt hevur umboðsmaðurin eina fasta lýsing í skúlablaðnum Strok og á Facebook, sum eru teir miðlar, sum flest børn og ung hava atgongd og kunnleika til.

# Hoyring av børnum – grein 12 í Barnarættindasáttmálanum

**Elinborg Apol,** fulltrúi (2014)

*Grein 12 í Barnarættindasáttmálanum gevur barninum rætt til samrøði, men ikki sjálvsavgerðarrætt. Barnið skal síggjast sum ein einstaklingur, sum sjálvur dugir at hugsa og virka, og sum hevur rætt til størri og størri sjálvsavgerðarrætt í samsvari við aldur og búning, til at virka í persónligum spurningum og at ávirka sítt egna lív. Tá mett verður um, hvat er best fyri barnið, eigur størri dentur at verða lagdur á serstøku áhugamálini hjá barninum, so hvørt sum barnið eldist og búnast, meðan samsvarandi minni dentur eigur at verða lagdur á serliga tørvin hjá barninum. Sæð út frá einum barnasjónarhorni eru tað fyrst og fremst sjónarmiðini hjá barninum og tess fatan av egnari støðu, sum skulu vera galdandi.*

Ein av meginreglunum í Barnarættindasáttmálanum hjá ST er grein 12 um rættin hjá barninum at verða hoyrt. Av tí at grein 12 er ein meginregla, skal fyrilit takast til hesa áseting, tá øll onnur rættindi hjá barninum verða tulkað og framd.

Grein 12 í Barnarættindasáttmálanum hjá ST ljóðar soleiðis:

> Stk. 1. Luttakaralondini 1)skulu tryggja einum barni, sum er 2)ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, 3) rættin til frítt at greiða frá hesum sjónarmiðum 4)í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið; 5) dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið í samsvari við aldurin á barninum og hvussu búgvið tað er.
>
> Stk. 2. Við atliti at hesum skal barnið serliga fáa høvi til at koma til orðanna 6)í einari og hvørjari viðgerð av málum við dóms- ella fyrisitingarmyndugleika, sum viðvíkja barninum, 7)annaðhvørt beinleiðis ella gjøgnum eitt umboð ella ein hóskandi stovn, og skal tað gerast í samsvari við mannagongdir, sum eru ásettar í tjóðarrætti.

## Greining av § 12 í Barnarættindasáttmálanum

***1)Skulu tryggja***

Luttakaralondini skulu tryggja barninum rætt til frítt at orða síni egnu sjónarmið. Orðingin, „skulu tryggja", er ein løglig orðing við serligari styrki, ið ikki gevur luttakaralondunum rásarúm fyri nakrari meting. Luttakaralondini hava sostatt eina klára løgliga skyldu at viðurkenna hendan rættin hjá barninum og at tryggja øllum børnum henda rætt.

***2)Ført fyri at orða síni egnu sjónarmið***

Eitt barn, sum er ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, hevur rætt til frítt at greiða frá hesum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið. Hendan orðingin skal ikki skiljast sum ein avmarking, men heldur sum ein skylda hjá luttakaralondunum í størst møguligan mun at meta um førleikan hjá barninum at gera sær síni egnu meiningar. Hetta hevur við sær, at luttakaralondini ikki kunnu byrja við at taka ta niðurstøðu, at eitt barn ikki dugir at bera fram síni egnu sjónarmið. Tvørturímóti skulu luttakaralondini hugsa, at barnið er ført fyri at gera sær síni egnu meiningar og viðurkenna, at barnið hevur rætt til at greiða frá teimum. Tað er ikki ábyrgdin hjá barninum fyrst at prógva, at tað er ført fyri tí.

Einki aldursmark er fyri, nær eitt barn hevur rætt til at bera síni sjónarmið fram. Barnarættindanevndin hjá ST ræður luttakaralondunum frá at seta nakað aldursmark, tað verði seg í lóggávu ella í praksis, sum avmarkar rættin hjá barninum at verða hoyrt í øllum spurningum, sum hava samband við barnið. Aldur má sostatt ikki forða fyri, at barnið fær loyvi at koma við sínum sjónarmiðum. Gransking vísir, at børn tíðliga menna sín egna vilja og evni at gera sær sjónarmið á ein ella annan hátt, hóast barnið ikki dugir at siga frá teimum við orðum.

Í sambandi við hoyring av einum barni er sostatt ikki neyðugt, at barnið dugir at orða síni sjónarmið týðiliga. Eisini samskifti uttan orð, so sum spæl, andlitsbrá, tekningar og málningar hjá barninum, skal viðurkennast og virðast. Tó má barnið hava vit, vilja og kenslur og duga at samskifta í ein slíkan mun, at tað er møguligt hjá teimum vaksnu at tulka, hvat barnið sigur, og hvat annars kemur til sjóndar hjá barninum so sum yvirbrá og kropsburð. Tað er heldur ikki neyðugt, at barnið hevur sjónarmið um sjálvan spurningin, sum avgerð skal takast um. Tað er nóg mikið, at barnið er ført fyri at meina okkurt av týdningi í sambandi við spurningin.

***3)Rættin til frítt at greiða frá hesum sjónarmiðum***

Barnið hevur rætt til at bera síni sjónarmið fram frítt. Hetta merkir, at barnið skal kunna greiða frá sínum

sjónarmiðum uttan at verða trýst til tað. Barnið má heldur ikki manipulerast. Orðið „frítt“ er tengt at barnsins egnu áskoðan, t.v.s. at barnið hevur rætt til at koma við sínum egnu sjónarmiðum og ikki sjónarmiðunum hjá øðrum. Barnið skal ikki hoyrast oftari enn neyðugt.

Barnið hevur eisini rætt til at fáa kunning um málið og málsviðgerðina, soleiðis at barnið skilur málið. Hesin rætturin til kunning er av grundleggjandi týdningi, tí kunning er ein fortreyt fyri, at barnið kann taka eina greiða avgerð og greiða frá sínum sjónarmiðum. Tí er neyðugt, at tey, sum hava ábyrgdina av at hoyra barnið og foreldur ella verjar, upplýsa barnið um aktuella málið, hvørjar avgerðir kunnu verða tiknar, og hvørjar avleiðingar tær kunnu fáa. Barnið má eisini fáa at vita, undir hvørjum umstøðum tað sleppur at koma við sínum sjónarmiðum.

Barnið hevur ikki skyldu til at greiða frá sínum sjónarmiðum. Barnið skal upplýsast um, at tað hevur rætt til at siga, hvat tað heldur og ynskir, men eisini at tað hevur rætt til at lata vera at siga nakað. Um barnið ikki ynskir at siga nakað, eiga myndugleikarnir á annan hátt at royna at finna útav, hvørja áskoðan barnið hevur, t.d. við at tosa við persónar, sum barnið er væl í øgn við ella við at hyggja at upplýsingum, sum liggja í málinum frammanundan.

Luttakaralondini skulu eisini tryggja, at tey børn, sum hava torført við at føra síni sjónarmið fram, fáa møguleika til tess. Til dømis skulu børn við skerdum førleika hava ta útgerð til samskifti, sum krevst fyri, at tey lættari kunnu framføra síni sjónarmið, og tað skal vera møguligt hjá teimum at brúka hesa útgerð.

***4)Í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið***

Rættindini hjá barninum at greiða frá sínum sjónarmiðum eru víðfevnandi og strekkja seg longur enn rættindini í Barnarættindasáttmálanum. Rættindini verða avmarkað av, at viðurskiftini skulu viðvíkja barninum, men kravið er ikki strangt. Viðurskiftini skulu bara hava eina ella aðra ávirkan á barnið. Luttakaralondini skulu tí lurta eftir sjónarmiðum hjá børnum á øllum økjum, har áskoðan hjá børnum kann betra góðskuna á loysnini.

***5)Dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið í samsvari við aldurin á barninum og hvussu búgvið tað er***

Dentur skal leggjast á sjónarmiðini hjá barninum í samsvari við aldurin á barninum, og hvussu búgvið barnið er. Aldur, og hvussu búgvið barnið er, eru tvær týdningarmiklar og javnsettar treytir, tá metast skal um, í hvønn mun barnsins sjónarmið og ynskir skulu ávirka avgerðina. Hvussu stórur dentur skal leggjast á sjónarmiðið hjá barninum, kann sostatt ikki bara avgerast út frá aldrinum á barninum, tí hvussu búgvið eitt barn er, er ikki bara treytað av, hvussu gamalt barnið er. Tess meiri úrslitið av avgerðini ávirkar lívið hjá barninum, tess størri týdning hevur ein røtt meting av, hvussu búgvið barnið er.

Av tí at hugtakið um, hvussu búgvið barnið er, er ógreitt og subjektivt, er tað týdningarmikið, at myndugleikarnir grundgeva, hvussu spurningurin um búning verður mettur, soleiðis at integriteturin hjá barninum verður vardur.

Hvussu stórur dentur skal leggjast á sjónarmiðini og ynskini hjá barninum er eisini treytað av, hvat málið snýr seg um, og hvussu sterk, áhaldandi, veruleikakend, umhugsað og vælgrundað sjónarmiðini hjá barninum eru.

***6)Í einari og hvørjari viðgerð av málum við dóms- ella fyrisitingarmyndugleika, sum viðvíkja barninum***

Áherðsla verður løgd á rættin hjá barninum at koma til orðanna í mun til dómstólar og fyrisitingarmyndugleikar. Rætturin hjá barninum at verða hoyrt er galdandi bæði í málum, sum barnið sjálvt tekur stig til, sum t.d. at klaga um ringa viðferð og at senda áheitan til skúla viðvíkjandi útblaking, og í málum, sum onnur hava tikið stig til, og sum ávirkar barnið, sum t.d. tá foreldrini verða sundurlisin, ættleiðing og fráboðanir til barnavernd.

Hoyringin av barninum skal vera í einum umhvørvi, har barnið kennir seg virt og trygt. Tað er ikki møguligt at hoyra eitt barn á munagóðan hátt, um kringumstøðurnar eru ræðandi, kensluleysar og óhóskandi fyri aldurin hjá barninum. Mannagongdir og umstøður í sambandi við hoyring av børnum mugu tí vera hóskandi fyri børn. Kunningin til barnið má vera barnavinarlig, barnið má stuðlast til at koma við sínum sjónarmiðum, tey starvsfólk, sum eru í samband við barnið mugu hava hóskandi útbúgving til tess, hugsast skal um innrættingina av bíðirúmi og høli, har barnið verður hoyrt og hvussu tey sum hoyra barnið og annars starvsfólk, sum eru um barnið, eru ílatin. Hoyringin av barninum má vera á einum máli, sum barnið bæði skilur og dugir at tosa til fulnar.

***7)Annaðhvørt beinleiðis ella gjøgnum eitt umboð ella ein hóskandi stovn***

Tá barnið hevur avgjørt, at tað vil koma við sínum sjónarmiðum, má barnið taka avgerð um, hvussu hetta skal ganga fyri seg. Barnið kann velja antin sjálvt at framføra

síni sjónarmið, ella lata eitt umboð ella ein hóskandi stovn framføra sjónarmiðini fyri seg. Um barnið ynskir, at eitt umboð skal bera sjónarmiðini fram fyri seg, kann umboðið t.d. vera eitt foreldur, ein advokatur ella annar persónur, t.d. ein sosialráðgevi. Tað mest sjálvsagda umboðið fyri barnið er foreldrini, men her má havast í huga, at í nógvum málum er vandi fyri áhugamálsstríði millum barn og foreldur.

Hóast ásetingin er lokin, um sjónarmiðini hjá barninum verða borin fram av øðrum enn barninum sjálvum, so er tað týdningarmikið, at barnið, so vítt tað er gjørligt, sjálvt fær møguleika at bera síni sjónarmið fram, tí sjónarmið kunnu skiljast annarleiðis, tá onnur bera tey fram.

Eitt barn, ið úttalar seg gjøgnum eitt umboð, má hava álit á umboðnum, soleiðis at barnið frítt kemur fram við sínum sjónarmiðum og ynskjum yvir fyri umboðnum. Umboðið skal bera sjónarmiðini og ynskini hjá barninum víðari ærliga og reiðiliga og má hava kunnleika um og skil á avgerðargongdini í málinum og hava royndir við at umgangast børn. Umboðið skal geva barninum hóskandi kunning og má ikki ávirka barnið við sínum egnu meiningum. Umboðið skal vera tilvitað um, at viðkomandi bara umboðar sjónarmiðini hjá barninum og ikki eisini sjónarmiðini hjá øðrum, t.d. foreldrum, stovnum og myndugleikum.

Um barnið úttalar seg gjøgnum ein hóskandi stovn, má hesin vera óheftur av pørtunum. T.d. kann tað ikki metast at vera hóskandi, at ein málsviðgeri í kommunalu barnaverndarumsitingini ber sjónarmiðini hjá einum barni fram fyri Høvuðsbarnaverndarnevndini í einum máli, har barnið verður sett heiman, tí kommunan er sjálv partur í málinum. Harafturímóti kann ein barnaserkønur, sum kannar málið, tá barnið verður sett heiman, vera hóskandi stovnur, um viðkomandi ber sjónarmiðini hjá barninum týðiliga fram og ikki blandar síni egnu sjónarmið um barnsins besta uppí.

# Barnsins rættur til umsorgan í fosturheimi og á stovni - grein 20 í Barnarættindasáttmálanum

**Elinborg Apol,** ráðgevi (2019)

*„Eitt barn, sum fyribils ella støðugt ikki fær verið heima saman við næstingum sínum ella, av tí at tað er best fyri barnið sjálvt, ikki fær loyvi at verða verandi heima, hevur rætt til serliga vernd og stuðul frá landsins myndugleikum". (Grein 20, stk. 1 í Barnarættindasáttmálanum).*

Sambært grein 20, stk. 1 og 2 í Barnarættindasáttmálanum hevur landið ábyrgd av at veita børnum, sum ikki fáa verið í sínum natúrliga familjuumhvørvi, serliga vernd og stuðul og tryggja teimum aðra umsorgan. Millum hesi børn eru tey børn, sum myndugleikarnir yvirtaka umsorganina fyri. Orðingin „rætt til serliga vernd og stuðul" verður í mannarættindahøpi brúkt um serliga viðbreknar bólkar. Rættindini verða roknað sum sterk rættindi, t.v.s. at landið hevur ábyrgdina av, at ásetingin verður fylgd. Landið hevur skyldu til at geva hesum børnum vernd og stuðul út yvir tað, sum børn vanliga hava tørv á. Verndin og stuðulin skulu laga seg eftir, at børnini eru uttan umsorgan frá foreldrunum og eru serliga viðbrekin.

Sambært grein 20, stk. 3 kann tað at tryggja barninum aðra umsorgan vera, at seta barnið til fosturs ella um neyðugt at seta barnið á hóskandi stovn fyri børn. Barnarættindasáttmálin staðfestir sostatt, at fosturheim eigur at verða tikin fram um ein stovn. Barnið eigur bara at verða sett á stovn, um tað er neyðugt, og stovnurin skal hava førleika at geva barninum umsorgan. Tá fosturheim verður valt til barnið, skal hóskandi fyrilit takast fyri samanhangi í uppvøkstrinum hjá barninum og fyri tjóðfrøðiliga, átrúnaðarliga, mentanarliga og málsliga bakstøðinum hjá barninum. Talan er um hóskandi fyrilit og ikki treytaleys krøv. Einki klárt svar er uppá, hvussu nógv barnaverndartænastan skal gera, fyri at fáa hetta at ganga upp.

## Aðrar ásetingar, sum eru tætt knýttar at grein 20

Aðrar ásetingar í Barnarættindasáttmálanum, sum hava tætt tilknýti til grein 20, eru greinarnar 3, 6, 12, 25 og 39.

***Grein 6 - barnið hevur rætt til at mennast***

Grein 6 er ein av teimum fýra meginreglunum í Barnarættindasáttmálanum. Hon ásetur, at øll børn hava ein natúrligan rætt til lívið, og at landið í størstan møguligan mun skal tryggja, at barnið livir og mennist. Rætturin til umsorgan í grein 20 er ein fortreyt fyri rættinum hjá barninum at mennast væl, bæði kropsliga, sálarliga, andliga, moralskt og sosialt.

***Grein 3 - barnsins besta, trivnaður hjá barninum og krøv til stovnar***

Rætturin til umsorgan í grein 20 knýtir seg eisini til eina aðra meginreglu í Barnarættindasáttmálanum, nevniliga grein 3, stk. 1. Har er ásett, at barnsins tørvur skal setast fremst í øllum tiltøkum viðvíkjandi børnum. Rætturin til umsorgan er ein grundleggjandi treyt fyri at røkja atliti at barnsins tørvi. At barnið hevur rætt til serliga vernd og stuðul merkir, at metast skal um, hvat einstaka barninum tørvar.

Sambært grein 3, stk. 2 skal landið tryggja barninum ta vernd og umsorgan, sum er neyðug fyri barnsins trivnað við fyriliti fyri teimum rættindum og skyldum, sum galda fyri foreldur ella verja barnsins ella onnur, ið hava løgfrøðiliga ábyrgd av barninum, og skulu við tí í huga seta í verk øll hóskandi lóggávulig og fyrisitingarlig tiltøk. Hetta merkir, at tað fyrst og fremst eru foreldrini, sum hava ábygd av at geva barninum umsorgan. Ábyrgdin hjá landinum kemur í øðrum lagi, men landið hevur skyldu til at fyribyrgja, at barnið er fyri harðskapi, ágangi og umsorganarsvíki annars í heiminum. Barnið hevur rætt til ta vernd og umsorgan, sum er neyðug fyri trivnaðin hjá barninum, bæði áðrenn myndugleikarnir yvirtaka umsorganina fyri barninum og aftaná. Málið fyri umsorganini er trivnaðurin hjá barninum, antin umsorganin verður givin í fosturheimi ella á stovni.

Sambært grein 3, stk. 3 skal landið tryggja, at stovnar og tænastur, sum hava ábyrgd av umsorgan ella vernd av barninum, fylgja teimum aðalkrøvum, sum eru sett, serliga við atliti at trygd, heilsu, tal av starvsfólki og førleika hjá starvsfólkunum. Skikkað eftirlit skal vera við hesum. Fyritreytin er sostatt, at aðalkrøv eru sett stovnum og tænastum, og at aðalkrøvini verða tryggja við eftirliti. Viðmerkjast skal, at børn hava tørv á góðum skipanum, har tey kunnu siga frá, um eitthvørt er galið.

ST hevur gjørt leiðreglur fyri stovnar, har t.d. børn, sum myndugleikin hevur yvirtikið umsorganina fyri, búgva (ST-samtykt 64/142. Guidelines for the Alternative Care of Children, 2010). Í leiðreglunum stendur, at stovnarnir

eiga at vera smáir og skipaðir við fokus á rættindi og tørvin hjá barninum. Umhvørvið eigur at líkjast mest møguligt støðuni hjá eini familju ella einum lítlum bólki (pkt. 123). Landið skal tryggja, at stovnarnir hava nóg mikið av umsorganarpersónum, soleiðis at hvørt einstakt barn kann fáa framhaldsviðgerð og møguleika til at knýta seg til ein ávísan umsorganarpersón. Umsorganarpersónarnir eiga á fullgóðan hátt at fremja mið og endamál við umsorganararbeiðinum og tryggja barnsins tørv fyri vernd (pkt. 126).

***Grein 12 - barnið hevur rætt til at verða hoyrt***
Eisini meginreglan í grein 12 er tætt knýtt at grein 20. Í grein 12, stk. 1 er ásett, at eitt barn, sum er ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, hevur rætt til frítt at greiða frá sínum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið. Dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið í samsvari við aldurin á barninum, og hvussu búgvið tað er.

Hendan meginreglan hevur m.a. týdning í sambandi við avgerðina um, hvar barnið skal búgva. Barnið hevur rætt til at verða hoyrt, áðrenn avgerð verður tikin um, hvørt barnið skal búgva í fosturheimi ella á stovni. Avgerðin skal takast eftir eini heildarmeting av barnsins tørvi, sambært grein 3, stk. 1. Stórt atlit skal takast at barnsins sjónarmiði, í hvussu er um talan er um eitt stórt ella búgvi barn. Útgangsstøðið er sum nevnt, at barnið helst ikki skal á stovn at búgva, men hetta kann vera neyðugt, bæði út frá tørvinum hjá barninum, men møguliga eisini eftir ynski frá barninum. Barnið og fosturheimið eiga at hóska saman, og foreldrini at barninum eiga at verða við til at velja fosturheimið.

***Grein 25 – barnsins rættur til regluliga meting av setanini***
Sambært grein 25 viðurkennir landið rættin hjá einum barni, sum er sett heiman, at fáa røkt, vernd ella viðgerð fyri at bøta um kropsligu ella sálarligu heilsuna, og við millumbilum at fáa eina meting av tí viðgerð, sum tað fær, og øllum øðrum umstøðum viðvíkjandi tí, at tað er sett heiman.

Sambært leiðbeiningini frá ST (ST-samtykt 64/142) hevur barnið, um møguligt minst triðja hvønn mánað, rætt til regluliga og gjølla meting av, um umsorganin og viðgerðin, sum tað fær, er hóskandi. Metingin skal serliga taka atlit at barnsins persónligu menning, møguligum broytingum í barnsins tørvi, um familjuumhvørvið hjá barninum er ment, og hvussu relevant og neyðug núverandi setan av barninum er í mun til nevndu viðurskifti. Metingin skal gerast av skikkaðum og góðkendum persónum og skal fevna um barnið og allir viðkomandi persónar í lívinum hjá barninum (pkt. 67).

***Art. 39 – barnsins rættur til endurmenning***
Sambært grein 39 skal landið seta øll hóskandi tiltøk í verk fyri at skunda undir, at børn, sum m.a. hava verið fyri vanrøkt, úrnýtslu ella misnýtslu, píning ella á annan hátt hava verið fyri harðrendari, ómenniskjansligari ella niðrandi viðferð fáa kropsliga og sálarliga heilsubót og koma fyri seg aftur. Endurmenningin skal fara fram í einum umhvørvi, sum stimbrar barnsins heilsu, sjálvsvirðing og virðileika. Eitt barn, sum er sett heiman, hevur rætt til serliga vernd og stuðul frá landinum, sambært grein 20. Landið skal tí syrgja fyri at endurmenna barnið.

Umframt omanfyri nevndu rættindi hava børn, sum búgva í fosturfamilju ella á stovni, øll onnur rættindi, sum øll børn hava til heilsu, útbúgving, vernd móti harðskapi v.m. eftir Barnarættindasáttmálanum.

***Samanumtikið***
Barnarættindasáttmálin gevur einum barni, sum myndugleikin hevur yvirtikið umsorganina fyri, og sum býr í fosturheimi ella á stovni, týdningarmikil rættindi. Barnið hevur rætt til umsorgan og rætt til at menna seg væl við útgangsstøði í tørvinum hjá barninum. Barnið skal hoyrast í øllum viðurskiftum, sum hevur við tað at gera, og hevur rætt til at verða vart móti øllum slagi av harðskapi og ágangi. Setan av barninum í fosturheim skal taka atlit at mentan og framhaldi í uppalingini av barninum, men tá alt kemur til alt, skal barnsins tørvur setast fremst. Viðurskiftini skulu leggjast soleiðis til rættis, at barnið fær ta umsorgan, sum er neyðug, fyri at tað trívist og mennist, antin tað verður sett í fosturheim ella á stovn. Góðar skipanir mugu vera fyri eftirlit við hesum, m.a. skipanir har børn hava møguleika fyri at siga frá. Børn skulu hoyrast bæði í sambandi við val av fosturheimi og stovni og eisini aftaná.

## Eftirlitsvitjan á deildum hjá Trivnaðareind 10 hjá Almannaverkinum
Umboðsmaðurin hevur verið á eftirlitsvitjanum á deildum hjá Trivnaðareind 10 hjá Almannaverkinum. Á deildunum búgva børn, sum myndugleikin hevur yvirtikið umsorganina fyri. Í frágreiðingini frá vitjanunum vísti umboðsmaðurin á fleiri viðurskifti, sum kundu betra umstøðurnar hjá børnunum og tryggja teimum serliga vernd og stuðul.

Umboðsmaðurin vísti m.a. á, at fleiri av børnunum høvdu brúk fyri viðgerð frá sálarfrøðingi. Hann mælti til, at fastur sálarfrøðingur varð settur í Trivnaðareind 10, so børnini kundu hava dagligt samskifti við sálarfrøðingin og kenna seg trygg við hann. Við hesum øktist líkindini fyri, at viðgerðirnar av børnunum eydnaðust.

Undir eftirlitsvitjanunum kom fram, at ósemja javnan stakk seg upp millum stovnin og barnaverndartænastuna um, hvør skuldi gjalda fyri ymiskar tænastur til børnini, so sum sálarfrøðiliga hjálp og frítíðarvirksemi hjá børnunum. Umboðsmaðurin vísti á, at børnini høvdu rætt til neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, soleiðis at tey kundu mennast. Hann mælti til, at greiða sum skjótast fekst á, hvørjar útreiðslur vóru fevndar av heildartilboðnum hjá Trivnaðareind 10, og hvørjar útreiðslur kommunurnar skuldu gjalda harumframt.

Í sambandi við eftirlitsvitjanirnar kom fram, at nógvur harðskapur var á deildunum hjá Trivnaðareind 10, men at ikki allur harðskapur ella valdsnýtsla varð fráboðað. Umboðsmaðurin vísti á, at tað var týdningarmikið, bæði fyri rættartrygdina hjá børnum og starvsfólkum, at allur harðskapur og øll valdsnýtsla varð skjalfest og fráboðað, soleiðis at staðfestast kundi, hvussu støðan var hesum viðvíkjandi. Hetta kundi møguliga eisini fyribyrgja óhepnari atferð hjá børnunum, sum elvdi til harðskap og hóttanir, soleiðis at harðskapurin minkaði ella hvarv. Umboðsmaðurin mælti til, at stovnurin fekk ein harðskapspolitikk, soleiðis at starvsfólkini vórðu tilvitað um, hvussu tey fyribyrgdu harðskapi, og leiðslan varð tilvitað um, hvussu hon hjálpti starvsfólkum og børnum aftaná harðskapstilburðir.

Umboðsmaðurin vísti á rættin hjá børnum til útbúgving. Ein líkinda skúlagongd var grundarlagið fyri, at barnið fekk eina útbúgving og kundi standa á egnum beinum sum vaksin. Umboðsmaðurin mælti til, at ein ítøkilig meting varð gjørd av, um skúlatilboðið hjá hvørjum einstøkum barni var nøktandi.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at rættindini hjá børnum at verða hoyrd t.d. í sambandi við val av egnum kontaktpersónum og í sambandi við fráboðanir um harðskap og valdsnýtslu.

Hølisviðurskiftini hjá Trivnaðareind 10 viðførdu nógvar flytingar, og hetta tók orku frá starvsfólkunum og skapti ótryggleika hjá børnunum. Samansetingin av børnum á teimum ymisku deildunum var tilvildarlig og uttan mun til sjúkuavgerðir, ella hvussu børnini annars hóskaðu at búgva saman. Hetta var óheppið, tí tað førdi til samanbrestir og harðskap.
Umboðsmaðurin vísti á, at bæði børn og starvsfólk høvdu tørv á støðugleika fyri at kenna seg trygg og kunna virka til fulnar í gerandisdegnum. Ein av fortreytunum fyri, at viðgerðirnar av børnunum skuldu eydnast, og at tey mentust, var, at karmarnir vóru í lagi. Børnini áttu at búgva á tí deild, sum hóskaði best til teirra tørv, soleiðis at uppihaldið á stovninum gjørdist støðugt og væleydnað. Sum meginregla áttu børn við ymiskum sjúkuavgerðum ikki at búgva saman. Umboðsmaðurin metti, at stórur tørvur var á einum nútíðarhóskandi barnaheimi, har børnini kundu fáa tær umstøður og ta viðgerð, umsorgan og tann stuðul, tey høvdu tørv á og rætt til eftir m.a. Barnarættindasáttmálanum.

# Rætturin hjá barninum til best møguliga heilsustøðu – grein 24 í Barnarættindasáttmálanum

**Elinborg Apol,** ráðgevi (2018)

*„Luttakaralondini viðurkenna barnsins rætt til best møguliga heilsustøðu, at fáa sjúkuviðgerð og at fáa heilsubót. Luttakandi lond skulu miða ímóti at tryggja, at rætturin til at fáa slíka viðgerð og røkt ikki verður tikin frá nøkrum barni". (Grein 24, stk. 1 í Barnarættindasáttmálanum)*

Grein 24, stk. 1 í Barnarættindasáttmálanum hjá ST ásetur, at tey lond, sum hava sett Barnarættindasáttmálanum í gildi, skulu viðurkenna barnsins rætt til best møguliga heilsustøðu, rætt til at fáa sjúkuviðgerð og til at fáa heilsubót. Londini skulu miða ímóti at tryggja, at rætturin til at fáa slíka viðgerð og røkt ikki verður tikin frá nøkrum barni.

Rættindini til góða heilsu mugu skiljast út frá menningarstøði og medisinskum tilboðum, sum eru til taks í landinum, har barnið býr. Myndugleikarnir skulu leggja umstøðurnar til rættis soleiðis, at børn fáa best møguliga kropsliga og sálarliga viðgerð. Í einum landi sum Føroyum við einum vælútbygdum almennum heilsuverki kann tað hugsast, at ikki alt, sum er tøkniligt møguligt at gera, liggur innan fyri tað viðgerðartilboð, sum almenna heilsuverkið kann og skal bjóða. Skyldan hjá myndugleikanum er at gera tað, sum er møguligt og rímiligt út frá teimum resursum, sum eru til taks.

Góð heilsa er ein grundleggjandi ágóði og snýr seg ikki bara um sjúku, men eisini um kropsliga, sálarliga og sosiala vælveru. Barnarættindasáttmálin áleggur londunum at seta tørvin hjá børnum í fokus og hava fyrilit fyri, at børn hava tørv á serligari verju og umsorgan. Tað er tí týdningarmikið, at londini bæði taka ábyrgd fyri at tryggja heilsuna hjá børnum við viðgerðartilboðnum fyri sjúku og endurmenning, men eisini at seta í verk fyribyrgjandi og heilsufremjandi tiltøk.

Grein 24, stk. 2 áleggur londunum at virka fyri at seta hóskandi tiltøk í verk fyri at tryggja rættin hjá børnum til best møguliga heilsustøðu, eitt nú at minka um pinkubarna- og barnadeyða, at menna primeru heilsutænastuna, at tálma sjúku og føðslutroti, og at kunna og geva frálæru í vitan um barnaheilsu og -føðslu, fyrimunir við bróstageving, heilsufrøði og reinføri og at fyribyrgja óhappi.

Í framkomnum londum sum Føroyum eru heilsutænastur, so sum t.d. heilsusjúkrasystrar, barnatannrøktartænastur, koppsetingar og aðrar almennar tænastur, sum eru við til at tryggja, at børn grundleggjandi hava góða heilsu. Men her kunnu vera aðrir heilsutrupulleikar hjá børnum, so sum ovurviðkvæmi, yvirvekt, etingarólagi, inaktivitetur, happing, royking og rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, har londini eiga at fara undir at seta fyribyrgjandi og heilsufremjandi tiltøk í verk fyri at tryggja børnunum best møguliga heilsustøðu.

## Aðrar ásetingar, sum eru tætt knýttar at grein 24

Aðrar ásetingar eru í Barnarættindasáttmálanum, sum hava tætt tilknýti til grein 24, til dømis grein 23 um rættin hjá børnum, ið bera brek, til serliga umsorgan, og grein 19, sum ásetur, at londini skulu seta munagóð tiltøk í verk fyri at verja barnið móti øllum sløgum av kropsligum ella sálarligum ágangi, skaða ella misnýtslu, vanrøkt v.m. Eisini kunnu nevnast greinirnar 28 og 29 um rættin hjá børnum til útbúgving, tí útbúgving ger tann einstaka betri føran fyri at ansa eftir heilsu síni.

Ásetingar, sum snúgva seg um materiellu vælferðina hjá børnum, eru eisini tætt knýttar at grein 24, tí ein av størstu vandunum móti heilsuni hjá børnum er fátækradømi og vánalig livi- og búðstaðarviðurskifti. Tí eru grein 26 um rættin hjá øllum børnum til at njóta sosiala trygd, m.a. almannatrygd, og grein 27 um rættin hjá øllum børnum til tey lívskor, sum eru neyðug fyri barnsins kropsligu, sálarligu, andligu, siðalagsligu og sosialu menning serliga viðkomandi fyri, at barnsins rættur til heilsu skal gerast veruligur.

Grundreglan í grein 12 um rættin hjá børnum til frítt at greiða frá sínum egnu sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið, hevur eisini týdning fyri tulking av grein 24. Tann, ið hevur foreldramyndugleikan yvir barninum hevur rætt og skyldu til at taka avgerðir vegna barnið í heilsuspurningum. Serliga tá tað snýr seg um smá børn, er samstarvið millum heilsutænastu og foreldrini avgerandi fyri, at barnið kann njóta gott av teimum ymisku heilsutænastunum. Men børn eru

serfrøðingar í egnum lívi, og tá barnið verður eldri og er ført fyri at greiða frá egnum tørvi og sjónarmiðum, er tað ofta soleiðis, at tað er barnið sjálvt, sum best dugir at greiða frá, hvønn tørv tað hevur. Atlit skal tá takast at sjónarmiðinum hjá barninum, og dentur skal leggjast á sjónarmiðið í samsvari við aldurin á barninum, hvussu búgvið tað er, hvussu gjølliga umhugsað sjónarmiðið tykjast at vera, og hvat slag av trupulleika, talan er um.

## Kanning av viðurskiftum og umstøðum hjá børnum, sum verða innløgd á Psykiatriska depilin

Rætturin hjá barninum til best møguliga heilsustøðu er eisini knýttur at sálarligu heilsuni hjá barninum. Við hesum í huga hevur umboðsmaðurin gjørt eina kanning av viðurskiftunum og umstøðunum hjá børnum, sum verða innløgd á Psykiatriska depilin.

### *Innlegging saman við vaksnum*

Í frágreiðingini í sambandi við kanningina fanst umboðsmaðurin at, at børn vóru innløgd saman við vaksnum sjúklingum á Psykiatriska deplinum. Børn, sum verða innløgd saman við vaksnum sjúklingum, kunnu koma í ella verða vitni til ógvusligar hendingar. Umboðsmaðurin vísti til grein 37, pkt. c, í Barnarættindasáttmálanum, sum ásetur, at tað barn, sum frælsið er tikið frá, og vaksin skulu haldast hvør sær, uttan so at tað ikki verður mett at vera til gagns fyri tørv barnsins, og at barnið sum meginregla skal hava rætt til at varðveita sambandið við sínar næstringar við brævaskifti og vitjan. Børn eiga ikki at verða send uttanlands til viðgerð, burtur frá familju, vinum og skúlagongd, har eisini málið og harvið samskiftið kann verða ein avbjóðing fyri barnið. Tað kunnu tó vera støður, har nøktandi viðgerð ikki kann veitast í Føroyum.

Umboðsmaðurin vísti á, at umstøðurnar á Psykiatriska deplinum ikki vóru lagaðar eftir, at børn vóru innløgd har. Børnini høvdu felags wc og bað saman við vaksnum sjúklingum, og hædd var ikki tikin fyri, at foreldur vórðu innløgd saman við børnum sínum. Eingi serlig høli vóru til taks til ítriv fyri børn, vitjan og undirvísing, og børn høvdu ikki atgongd til hóskandi uttandura øki.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at sum meginregla eiga børn at hava foreldur hjá sær undir innlegging og vísti til grundregluna í grein 3, stk. 1 í Barnarættindasáttmálanum um, at barnsins tørvur skal setast fremst í øllum tiltøkum viðvíkjandi børnum.

### *Starvsfólkaførleikar*

Sambært grein 3, stk. 3 í Barnarættindasáttmálanum skulu londini tryggja, at stovnar og tænastur, ið hava ábyrgd av at hava umsorgan fyri ella skulu verja børnini, eru í samsvari við tey aðalkrøv, sum skikkaðir myndugleikar hava ásett, serstakliga við atliti at trygd, heilsu, starvsfólkatali og starvsfólkaførleika og harumframt serkønari umsjón. Umboðsmaðurin vísti í frágreiðing síni á, at tað var týdningarmikið at starvsfólkini í Barna- og ungdómspsykiatriska toyminum, og onnur starvsfólk, sum vóru um børnini, høvdu førleikar at fáast við børn, og at føstu vaktirnar, sum vóru um børnini alla tíðina, høvdu námsfrøðiligan kunnleika umframt psykiatrifakligan førleika. Umboðsmaðurin mælti til, at Psykiatriski depilin sum skjótast fekk eitt tvørfakligt toymi við serkunnleika um etingarólag, tí talið av innleggingum av børnum við etingarólagi var vaksandi.

### *Rætturin hjá børnum til undirvísing*

Umboðsmaðurin vísti á, at børn hava rætt til sjúkraundirvísing, tá sjúkrafráveran er longri enn 2 vikur og mælti til, at skipað undirvísing kom í lag skjótast gjørligt, aftaná at barnið var innlagt, soleiðis at barnið misti so lítið av undirvísing sum gjørligt.

### *Rætturin hjá børnum til kunning og at verða hoyrd*

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at barnsins rættur at koma við sínum sjónarmiðum, eigur at síggjast aftur í øllum mannagongdum á Psykiatriska deplinum, sum viðvíkja børnum. Rætturin at verða hoyrdur er treytaður av, at barnið fær greiða og nøktandi kunning um málið og um síni rættindi, so sum klagu- og ráðgevingarmøguleikar. Børn eiga at verða hoyrd í sambandi við trivnaðarreglur, val av egnum kontaktpersónum og um egna viðgerðarætlan. Børn eiga at verða kunnað um avgerðir, sum viðvíkja teimum og fáa grundgevingar, tá ynskir teirra ikki kunnu játtast. Eisini eiga børn at hava møguleika at koma við uppskotum til handfaring av torførum støðum, soleiðis at tey fáa eina betri fatan av egnari støðu og hava møguleika at ávirka egið lív. Hetta kann vera við til at skapa minni ørkymlan hjá børnunum og harvið fyribyrgja nýtslu av tvingsli.

### *Nýtsla av tvingsli*

Umboðsmaðurin vísti á, at børn undir 15 ár hava ógvuliga avmarkaðar møguleikar at bera fram síni sjónarmið og upplivingar, um tvingsil verður nýttur ímóti teimum. Tær flestu innleggingar og viðgerðir av børnum undir 15 ár eru grundaðar á samtykki frá foreldrunum. Nýtsla av tvingsli við samtykki frá foreldrunum, men við mótstøðu frá barninum, verður ikki mett sum tvingsil, men sum inntriv av sjálvsvild. Hervið missa hesi børn rætt til samrøður, sjúklingaráðgeva og at klaga aftaná eitt slíkt inntriv. Umboðsmaðurin mælti tí til, at Psykiatriski

depilin kunnar foreldur at børnum undir 15 ár, sum koma fyri tvingsli, um, at foreldrini kunnu lata verða við at samtykkja til tvingsilin, soleiðis at børnini fáa rætt til samrøður aftaná tvingsilin, sjúklingaráðgeva og møguleika at klaga um tvingsilin.

### *Tilboð um búpláss og stuðul*

Umboðsmaðurin helt tað vera sera atfinningarsamt, at tað kom fyri, at børn vóru óneyðuga leingi innløgd á Psykiatriska deplinum, tí búpláss manglaðu ella stuðul ikki var til taks til børnini, tá viðgerðin á Psykiatriska deplinum var liðug. Umboðsmaðurin bað avvarðandi myndugleikar síggja til, at búpláss og neyðugur stuðul vóru til taks til tey børn, sum høvdu tørv á tí, tá tey eru liðugt viðgjørd á Psykiatriska deplinum.

### *Samanumtikið*

Kanningin hjá umboðsmanninum av umstøðunum hjá børnum, sum verða innløgd á Psykiatriska depilin, vísti, at umstøðurnar kunnu betrast munandi. Tað er týdningarmikið fyri at tryggja rættindini hjá hesum børnum til best møguliga heilsustøðu og at fáa sjúkuviðgerð og heilsubót, at umstøðurnar og fakligi førleikin á Psykiatriska deplinum eru lagaður eftir børnum, og at rættindini hjá børnum eftir m.a. Barnarættindasáttmálanum verða vird.

# Rætturin hjá barninum til útbúgving – grein 28 í Barnarættindasáttmálanum

**Elinborg Apol,** ráðgevi (2020)

> *„Luttakaralondini viðurkenna barnsins rætt til útbúgving" (Grein 28, stk.1 í Barnarættindasáttmálanum)*

Sambært grein 28, stk. 1 í Barnarættindasáttmálanum hava øll børn rætt til útbúgving. Rætturin til útbúgving er eitt av grundleggjandi rættindunum í Barnarættindasáttmálanum. Londini skulu tryggja børnum rætt til útbúgving við grundarlagi í eins møguleikum fyri øll børn. Grein 28 stuðlar undir yvirskipaðu meginregluna í grein 2 um, at øll børn skulu viðfarast eins. Hetta merkir, at øll børn, undir hesum børn í minnilutum, børn í fjarskotnum støðum, gentur, børn í varðhaldi og børn við virkistarni, skulu hava atgongd til útbúgving. Grein 28 hongur eisini saman við øðrum ásetingum í Barnarættindasáttmálanum t.d. barnsins rætti til best møguliga heilsustøðu, tí útbúgving er ein treyt fyri, at barnið er upplýst og kann taka hond um egnu heilsustøðu.

Grein 28, stk. 1, (a) ásetur, at barnaskúlafrálæra skal vera kravd, atkomulig og ókeypis hjá øllum. Barnarættindasáttmálin allýsir ikki útbúgving og nágreinar heldur ikki, hvat hóskandi pensum er ella longd á skúladegi ella skúlaári. Barnanevndin hjá ST leggur í staðin dent á, at pensum skal vera viðkomandi sum fyrireiking til at luttaka í vaksnamannalívinum. Skotið verður upp, at grundútbúgvingin er 9 ár í alt. Barnanevndin hjá ST hevur fleiri ferðir viðmerkt, at hóast útbúgvingin er ókeypis, so hava kravdar útreiðslur, sum t.d. útreiðslur til skúlauniformar og bøkur við sær, at skúlagongdin í veruleikanum ikki er ókeypis. Hesar eykaútreiðslur forða summum børnum í at ganga í skúla ella eru orsøk til, at tey gevast tíðliga við skúlagongdini.

Hóast Barnarættindasáttmálin ikki ásetur ein nágreiniligan rætt til framhaldsútbúgving, skulu londini, sambært grein 28, stk. 1 (b), eggja til, at ymsar útbúgvingar verða mentar aftaná barnaskúlan, m.a. vanlig og yrkislig útbúgving, og gera útbúgvingarnar atkomuligar og møguligar hjá øllum børnum. Framhaldsútbúgving verður mett at vera týdningarmikil fyri at menna børn, men Barnarættindasáttmálin viðurkennir kortini, at øll lond ikki eru ment at veita hetta tilboð til øll børn. Grein 28, stk. 1 (b) vísir á tiltøk, sum londini kunnu seta í verk, so sum ókeypis undirvísing og tilboð um fíggjarligan stuðul eftir tørvi, fyri at stuðla børnum at fara undir framhaldsútbúgving.

Sambært grein 28, stk. 1 (c) skulu londini, við øllum hóskandi tilboðum, gera hægri útbúgving atkomuliga hjá øllum í samsvari við lærugávurnar hjá tí einstaka. Hægri útbúgving byrjar vanliga aftaná barndómin, t.v.s. við 18 ára aldur. Hóast Barnanevndin hjá ST ikki hevur gjørt viðmerkingar til hesa skyldu í Barnarættindasáttmálanum, so tykist hugsanin at vera, at londini skulu syrgja fyri, at møguleikin til hægri útbúgving er atkomuligur við somu treytum fyri øll børn, við grundarlagi í lógligum upptøkukrøvum og ikki bara við grundarlagi í førleikanum at gjalda fyri útbúgvingina ella við upptøkuroyndum, sum geva lesandi við hægri inntøku fyrimun.

Grein 28, stk. 1 (d) leggur áherðslu á barnsins rætt til at fáa lestrarleiðbeining og yrkisleiðbeining fyri at tryggja, at barnið mennir síni evni og hegni mest møguligt. Umframt at geva øllum børnum ókeypis og kravda grundútbúgving, so krevur Barnarættindasáttmálin í grein 28, stk. 1 (e), at londini seta positiv tiltøk í verk fyri at eggja til regluliga skúlagongd og fyri at minka um talið av børnum, sum ikki fullføra skúlagongdina. Hetta kunnu t.d. vera serlig tiltøk fyri børn í minnilutum, børn sum búgva á gøtuni og í fátækadømi. Í nógvum londum er neyðugt við serligum tiltøkum fyri gentur, sum ofta verða forðaðar at fullføra skúlagongdina vegna húsligt arbeiði, ella tí tær gerast við barn.

Grein 28, stk. 2 leggur áherðslu á dissiplin í skúlanum. Myndugleikarnir skulu gera hóskandi tiltøk fyri at tryggja, at dissiplinin í skúlanum er soleiðis, at hon fer væl um barnsins virðileika sum menniskja og er í samsvari við Barnarættindasáttmálan. Hóast kropslig revsing ikki verður nevnd, so hevur Barnanevndin hjá ST sagt, at kropslig revsing ikki kann góðtakast, og at hetta eisini fevnir um kropsliga revsing í skúlunum. Barnsins rættur til vernd móti øllum sløgum av kropsligum ella sálarligum harðskapi, skaða ella vanrøknari viðferð, sum er staðfest í grein 19 í Barnarættindasáttmálanum, er eisini galdandi fyri skúlar. Barnanevndin hjá ST hevur víst á, at skyldan hjá londunum at halda eyga við dissiplinini í skúlunum eisini er galdandi fyri privatskúlar.

Í grein 28, stk. 3 verður tikið samanum við kravinum um, at londini skulu virka fyri og stuðla altjóða samstarvi á

útbúgvingarøkinum serliga við fyriliti fyri tørvinum hjá menningarlondunum.

## Børn, sum eru í eini serstøðu

Summi børn eru í eini serstøðu viðvíkjandi útbúgving. Hetta kunnu t.d. vera børn, sum bera brek, børn, sum bíða eftir uppihaldsloyvi í landinum ella ættarsavning, ung undir 18 ár, sum eru í varðveitslu hjá landinum, og børn, sum av eini ella aðrari orsøk ikki megna at ganga í skúla.

Sambært grein 2 í Barnarættindasáttmálanum skulu londini virða og tryggja øllum børnum innan sítt løgdømi tey rættindi, sum eru ásett í Barnarættindasáttmálanum, uttan at gera mismun av nøkrum slag og uttan mun til ættarslag, húðarlit, kyn, mál, átrúnað, politiska ella aðra sannføring, tjóðar-, etniskan- ella sosialan uppruna, ognarviðurskifti, brek, burð ella aðra støðu hjá barni, foreldrum ella verja.

### *Børn, sum bera brek*

Rætturin til útbúgving hjá børnum, sum bera brek, er eisini staðfestur í grein 24 í ST-sáttmálanum frá 13. desember 2006 um rættindi hjá persónum, sum bera brek. Her stendur m.a., at persónar, sum bera brek, hava rætt til útbúgving, og at londini í hesum sambandi skulu tryggja eina útbúgvingarskipan á øllum stigum og lívslanga læring. Fyri at tryggja rættin til útbúgving mugu persónar, sum bera brek, ikki útihýsast frá vanligu útbúgvingarskipanini vegna brek sítt, og børn, sum bera brek, mugu ikki útihýsast frá ókeypis og kravdari barnaskúlaundirvísing ella frá framhaldsútbúgving vegna brek sítt. Børn, sum bera brek, skulu hava atgongd til inkluderandi og ókeypis barnaskúlaundirvísing og framhaldsskúlaundirvísing við høgari dygd javnbjóðis øðrum í samfelagnum, har tey búgva, og hóskandi tillaging skal gerast eftir tørvinum hjá tí einstaka.

### *Børn, sum bíða eftir uppihaldsloyvi ella ættarsavning*

Barnanevndin hjá ST hevur víst á, at rættindini í Barnarættindasáttmálanum ikki eru avmarkað til børn við heimarætti í viðkomandi landi. Øll børn, óheft av tjóðskapi og hvar tey halda til, skulu hava atgongd til rættindini í Barnarættindasáttmálanum uttan so, at annað greitt skilst í teimum einstøku ásetingunum. Skyldan hjá londunum eftir Barnarættindasáttmálanum má kortini metast í mun til, hvussu leingi barnið er statt í landinum. Hetta merkir, at skyldan hjá landinum mótvegis einum barni, sum er fastbúgvandi í landinum, og einum barni, sum bara er fyribils í landinum, kann vera ymisk. Hvussu langt skyldan gongur, og um munur kann gerast á børnum við ymiskum tilknýti til landið, má metast ítøkiligt út frá, hvørji rættindi talan er um, og hvat bakstøðið er fyri at gera mismun. Myndugleikarnir hava skyldu til at leggja seg uppí og verja børn, sum eru fyri harðskapi og øðrum ágangi, hóast børnini bara eru í landinum í styttri tíðarskeið, meðan skyldan hjá myndugleikunum at leggja til rættis fyri útbúgving ikki neyðturviliga byrjar beinanvegin barnið kemur til landið. Ein ítøkilig meting má gerast í hvørjum einstøkum føri. Um børn uttan heimarætt eru stødd leingi í einum landi, tí tey t.d. bíða eftir uppihaldsloyvi ella ættarsavning, tekur skyldan hjá landinum at leggja undirvísing til rættis fyri hesi børn við, soleiðis at tey verða før fyri at fáa eina útbúgving. Í § 40 í Fólkaskúlalógini er ásett, at øll børn, sum búgva í Føroyum, skulu fáa undirvísing, og tað sama er galdandi fyri børn, sum skulu vera her í landinum í minsta lagi í 6 mánaðir.

### *Børn, sum ikki megna vanliga skúlagongd*

Nøkur børn eru so illa fyri, at tey ikki megna eina vanliga skúlagongd og mugu tí undirvísast heima, á sjúkrahúsi ella á stovni. Eisini hesi børn hava rætt til undirvísing, sum kann javnmetast við ta undirvísing, sum vanliga verður kravd í fólkaskúlanum. Reglur um hetta eru við heimild í Fólkaskúlalógini ásettar í kunngerð um heimaundirvísing og sjúkraundirvísing. Barnið hevur rætt til heimaundirvísing ella sjúkraundirvísing, um barnið er burtur frá skúla í longri tíð vegna sjúku, smittuvanda ella vælferð. Hetta er eisini galdandi í sambandi við afturvendandi styttri fráveru vegna sjúku og fráveru vegna varandi sjúku, tá ið fráveran samanlagt er 2 vikur. Heimaundirvísing og sjúkraundirvísing skal vera í samsvari við námsætlanir og ársætlan hjá flokkinum hjá barninum og taka atlit at heilsustøðu, aldri og umstøðum hjá barninum. Um eitt barn ikki er ført fyri at taka lut í vanligu undirvísingini, verður undirvísingin eitt tíðarskeið í ein til fýra mánaðir skipað eftir eini einstaklings undirvísingarætlan, sum tekur støði í førleika, tørvi og umstøðum hjá barninum. Undirvísingin verður skipað við atliti at gera barnið ført fyri aftur at luttaka í vanligu undirvísingini og sosiala felagsskapinum í skúlanum.

## Vitjan á Barnaheiminum

Tá umboðsmaðurin var á vitjan á Barnaheiminum í februar og mars 2020, fekk hann upplýsingar um eitt barn, sum bara fekk avmarkaða heimaundirvísing, og eitt barn, sum gekk í serflokki í fólkaskúlanum, men hvørki dugdi at skriva ella rokna.

Umboðsmaðurin vendi sær tí til Undirvísingarstýrið fyri at spyrja nærri um hesi viðurskifti. Undirvísingarstýrið upplýsti, at bíðitíð kann koma fyri, tá serlig fyriskipan verður sett í verk í sambandi við skúlagongd hjá einum barni, m.a. tí fólk skulu setast til uppgávuna. Tað eru teir

einstøku skúlarnir, har børnini eru innskrivað, sum hava ábyrgd av innihaldi, dygd og eftirmeting av undirvísingini í sambandi við heima- og sjúkraundirvísing. Undirvísingarstýrið vísti á, at tað tíverri eru børn, ið eru so illa fyri, at tey illa ella als ikki megna tað, ið námsætlanin leggur upp til, men at vandin fyri slíkum dømum er minni nú enn áður, tí serøkið nú er munandi styrkt við fleiri sertilboðum og serútbúnum lærarum í skúlunum.

Umboðsmaðurin vísti á, at tá myndugleikarnir yvirtaka umsorganina fyri einum barni, átaka myndugleikarnir sær samstundis ábyrgdina av, at barnið fær nøktandi undirvísing. Umsorganarsvikin børn eru millum tey veikastu børnini í samfelagnum og eru ofta afturúr skúlaliga, tá tey koma á stovn ella til fosturs. Tí skuldu eyka stór tøk takast viðvíkjandi undirvísing og skúlagongd hjá teimum. Umboðsmaðurin vísti á, at nøktandi undirvísing, sum í minsta lagi førir til eitt fólkaskúlaprógv, er ein fyritreyt fyri, at barnið kann fáa eina útbúgving, soleiðis at tað kann uppihalda sær sjálvum sum vaksin, og at tað tí hevur álvarsligar avleiðingar fyri børn, um tey ikki fáa nøktandi undirvísing.

Umboðsmaðurin minti á, at sambært grein 28 í Barnarættindasáttmálanum skulu myndugleikarnir viðurkenna barnsins rætt til útbúgving og skulu m.a. gera barnaskúlafrálæru kravda og eggja til, at ymsar útbúgvingar verða mentar eftir barnaskúlan, m.a. vanlig og yrkislig útbúgving, og gera tær atkomuligar og møguligar hjá øllum børnum. Umboðsmaðurin mælti til, at Undirvísingarstýrið tryggjar, at serligar fyriskipanir eru smidligar, soleiðis at tað slapst undan bíðitíð. Umboðsmaðurin mælti eisini til, at útbyggingin á serøkinum við fleiri sertilboðum og serútbúnum lærarum framhaldandi verður styrkt, og at skúlarnir síggja til, at tey børn, sum fáa heima- og sjúkraundirvísing, fáa nøktandi úrtøku av undirvísingini.

# Umboðsmaðurin fær fleiri heimildir á barnaøkinum

**Sólja í Ólavsstovu,** umboðsmaður (2013)

Tann 18. desember 2013 samtykti eitt samt løgting eina lógarbroyting, sum skal víðka heimildirnar hjá umboðsmanninum til at fevna um eitt serligt eftirlit við privatum stovnum o.ø., sum hava til uppgávu at taka sær av børnum og ungum.

Lógarbroytingin hevur somuleiðis við sær, at Løgtingsins umboðsmaður skal tryggja og hava eftirlit við, at ST-Barnasáttmálin verður implementeraður. Eisini skal umboðsmaðurin tryggja og hava eftirlit við rættindum hjá børnum, sum eru ásett í føroyskari lóggávu fyri at lúka skyldurnar hjá Føroyum sambært sáttmálanum.

## Avleiðingarnar av lógarbroytingini

Lógarbroytingin viðførir ikki, at nøkur broyting verður gjørd í arbeiðsháttinum hjá Løgtingsins umboðsmanni, og umboðsmaðurin fer framhaldandi at arbeiða við trimum sløgum av málum:

- At viðgera ítøkiligar klagur frá børnum ella vaksnum vegna børn
- At taka mál upp av egnum ávum
- At fremja eftirlitsvitjanir á stovnum v.m.

Tað verður somuleiðis ein av uppgávunum hjá umboðsmanninum at gera Løgting, landsstýri og bý- og bygdarráð varug við, um lóggávan ikki er í samsvari við Barnasáttmálan.

Uppgávurnar á økinum koma at verða røktar innan karmarnar á verandi lóg, t.v.s. at umboðsmaðurin fer at viðgera mál á barna- og ungdómsøkinum á sama grundarlagi sum í dag, og uppgávan verður eins og í øðrum málum at greiða myndugleikunum frá, um hesir eftir umboðsmansins fatan hava gjørt eitt mistak.

## Kann taka mál upp og fara á eftirlitsvitjanir

Ítøkiliga fer eftirlitið at verða framt á tann hátt, at umboðsmaðurin viðger klagur um viðurskifti hjá børnum, tekur mál upp av egnum ávum, fer á eftirlitsvitjanir á m.a. stovnum., har børn eru, og við at gera løgtingi og landsstýri varug við, um lógir og fyrisitingarligar ásetingar ikki eru sambæriligar við barnarættindasáttmálan. Sambært galdandi lóg fevnir virksemi umboðsmansins í dag um almennu fyrisitingina og stovnar hennara. Umboðsmaðurin hevur tískil longu í dag heimild at viðgera klagur á barna- og ungdómsøkinum, eins og umboðsmaðurin kann fremja eftirlitsvitjanir á almennum stovnum, har børn eru.

Týdningarmesta broytingin í lógini er at geva umboðsmanninum heimild at fremja eftirlitsvitjanir á privatum stovnum og í fosturheimum. At neyðugt er við hesi heimild kemst av, at eisini einstakir stovnar / privat heim hava ábyrgd av børnum. Hetta er t.d. galdandi fyri frískúlar, bú- og umlættingarstovnar, sum eru privatir, og fosturfamiljur sambært barnaverndarlógini. Grundað á stóra talið av fosturfamiljum væntast umboðsmaðurin einans at brúka hesa heimild, um ein fosturfamilja hevur fleiri fosturbørn og tískil kann sigast at hava stovnslig eyðkenni.

## Heldur fram sum óheftur eftirlitsstovnur

Eitt grundleggjandi eyðkenni við umboðsmansstovninum er, at hann virkar óheftur av øðrum myndugleikum og áhugamálum, og umboðsmaðurin ger sjálvur av, hvørji mál hann tekur til viðgerðar. Uppgávurnar á økinum verða í stóran mun røktar innan karmarnar í galdandi lóg. Umboðsmaðurin fer framhaldandi at gera vart við síni sjónarmið umvegis niðurstøður og frágreiðingar eftir at hava viðgjørt ítøkiligar klagur ella hava verið á eini eftirlitsvitjan. Tað verður ikki uppgávan hjá Løgtingsins umboðsmanni at meta um og vísa á meira almenn viðurskifti í samfelagnum um liviumstøður hjá børnum og tey tilboð, sum samfelagið hevur at bjóða børnum og ungum. Tað verður heldur ikki uppgávan hjá umboðsmanninum at gera viðmerkingar til lógaruppskot.

## Skal virka yrkisliga og fakliga

Viðgerðin hjá umboðsmanninum fer somuleiðis at vera framd á sama grundarlagi sum higartil. ST hevur tó gjørt vart við, at avgerandi er, at ein slíkur eftirlitsstovnur er óheftur og virkar yrkisliga, soleiðis at arbeiðið byggir á fakliga ástøðiliga vitan. Umboðsmaðurin hevur ikki serligan fakkunnleika viðvíkjandi børnum og viðurskiftum teirra, og tískil verður eftir tørvi neyðugt eisini at hava fólk við barnasakkønari vitan við á eftirlitsvitjanir at meta um tilboðini, sum børnini fáa, og til at samskifta við børn, sum venda sær til umboðsmannin. Somuleiðis verður neyðugt at gera nakað burtur úr at kunna almenning og serliga børn og ung um møguleikarnar at klaga til umboðsmannin, og hvat umboðsmaðurin kann gera fyri at hjálpa klagarunum. Harumframt verður

neyðugt at førleikamenna starvsfólk, tí hetta er eitt heilt nýtt fakøki, sum stovnurin skal viðgera.

## Tekur eisini mál upp av sínum eintingum

Sambært § 6, stk. 5 í galdandi lóg kann umboðsmaðurin sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi. Hendan møguleikan hevur umboðsmaðurin brúkt, um eitt mál hevur verið mett at vera prinsipielt, ella tí at grundleggjandi mistøk eru framd. Orsøkin til, at eitt mál verður tikið upp av egnum ávum, kann vera almenn umrøða, men tað er eisini komið fyri, at umboðsmaðurin hevur gjørt av at taka eitt mál til viðgerðar, hóast vanliga klagufreistin, sum er eitt ár, var farin, tá klagan varð latin umboðsmanninum.

Sum dømi um mál, sum umboðsmaðurin hevur tikið upp av egnum ávum, kunnu nevnast álit viðvíkjandi avgerð hjá Mentamálaráðnum at krevja skjøl aftur, sum innlit varð givið í sambært innlitslógini (200600098), álit viðvíkjandi klagu um setan av brunaumsjónarmanni í Tvøroyrar sløkkiliði (200700009), frágreiðing um avgerðir at løggilda grannskoðarar (200900041) og álit um kunningarskrivið um fjølmiðlapolitikkin hjá Almannaverkinum (201300040).

Umboðsmaðurin hevur sum lið í sínum virksemi í tveimum førum kannað viðgerðina hjá Almannaverkinum av útvaldum málsøkjum. Í 2005 kannaði umboðsmaðurin viðgerðina av 70 málum, har søkt varð um fyritíðarpensjón, sjúkradagpening og hjálpartól (200500059). Í 2008 varð henda kanning fylgd upp við eini nýggjari kanning um viðgerðina av 10 málum um fyritíðarpensjón og 15 endurbúgvingarmálum (200700061). Við tílíkum kanningum er í størri mun møguligt at finna fram til skipanarligar feilir í viðgerðini hjá myndugleikanum, enn tá umboðsmaðurin kannar eitt einstakt mál, sum klagað er um. Slíkar kanningar geva eisini umboðsmanninum eitt betri grundarlag at mæla til og ráðgeva um møgulig tiltøk, sum kunnu betra mannagongdirnar og málsviðgerðina hjá myndugleikanum, skuldi tað verið neyðugt. Í løtuni kannar umboðsmaðurin, hvussu aðalráð handfara mál um alment innlit. Við uppskotinum verður hesin kanningarháttur lógarfestur.

## Vitja fleiri stovnar

Eftirlitsvitjanir eru eisini ein partur av virksemi umboðsmansins. Kjarnuøkið fyri tílíkum vitjanum hava higartil verið stovnar, sum hýsa bólkum í samfelagnum, sum hava ringt við at koma til orðanna. Umboðsmaðurin hevur skrivað frágreiðingar frá eftirlitsvitjanum á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum (200200039), í sambýlunum Bóndaheygi 14 í Tórshavn (200700007), á Mýruni 4 og 6 í Hoyvík (201200026) og sambýlunum á Traðarvegi og undir Fobbakletti í Sandavági (201200013). Við lógarbroytingini verður hesin kanningarháttur nú lógarfestur.

## Barnaøkið økir um virksemið

Ein av fortreytunum fyri óheftni umboðsmansins er, at játtanin á fíggjarlógini er so mikið rúmsátt, at hendan ikki avmarkar virksemið hjá umboðsmanninum á ein slíkan hátt, at mál ikki verða tikin til viðgerðar.

Umboðsmaðurin skal hava eftirlitið á barna- og ungdómsøkinum, tað merkir, at umboðsmaðurin í mun til í dag fær eina lógarásetta, bundna uppgávu. Umboðsmaðurin hevur tískil skyldu at raðfesta júst hetta økið, umframt at øll onnur mál og uppgávur sum higartil skulu røkjast. Hetta hevur við sær, at umboðsmansstovnurin hevur tørv á at seta ein løgfrøðiligan ráðgeva aftrat teimum tveimum, sum í dag starvast hjá Løgtingsins umboðsmanni.

Umboðsmaðurin hevur ikki serligan fakkunnleika viðvíkjandi børnum og viðurskiftum teirra, og tískil verður eftir tørvi neyðugt eisini at hava fólk við barnasakkønari vitan við á eftirlitsvitjanir at meta um tilboðini, sum børnini fáa, og til at samskifta við børn, sum venda sær til umboðsmannin.

## Nýggja heimasíðu og kunningartilfar

Fyri at børn og ung kunnu gerast varug við, at møguleiki verður at klaga til umboðsmannin, verður neyðugt at gera nýggja heimasíðu, sum, umframt at lýsa virksemið hjá umboðsmanninum, eisini verður barnavinarlig, eins og tað verður neyðugt at gera kunningartilfar, sum er serliga ætlað børnum og ungum.

# Virksemi hjá umboðsmanninum á barnaøkinum

**Elinborg Apol,** fulltrúi (2016)

*„Løgtingsins umboðsmaður fekk 1. oktober 2014 uppgávuna at hava eitt serligt eftirlit við, at Barnarættindasáttmálin hjá ST verður hildin. Umboðsmaðurin virkar sum óheft eftirlit á barna- og ungdómsøkinum. Hann viðger klagur um viðurskifti hjá børnum, tekur sjálvur mál upp og fer á eftirlitsvitjanir á almennum og privatum stovnum, har børn og ung eru.“*

Tann 1. oktober 2014 varð virksemið hjá Løgtingsins umboðsmanni víðkað til eisini at fevna um eitt serligt eftirlit á barna- og ungdómsøkinum. Hetta ber við sær, at umboðsmaðurin skal raðfesta barna- og ungdómsøkið.

Á barna- og ungdómsøkinum viðger umboðsmaðurin klagur um viðurskifti hjá børnum, tekur mál upp av egnum ávum viðvíkjandi børnum og fer á eftirlitsvitjanir á almennum og privatum stovnum v.m., har børn eru. Umboðsmaðurin skal eisini hava eitt serligt eftirlit við, at Barnarættindasáttmálin hjá ST verður hildin, og gera Løgting og Landsstýri varug við, um lógir og fyrisitingarligar ásetingar ikki eru sambæriligar við Barnarættindasáttmálan.

## Klagur

Flestu mál á barnaøkinum, sum umboðsmaðurin hevur viðgjørt síðani 1. oktober 2014, viðvíkja klagum frá foreldrum og øðrum avvarðandi um málsviðgerð og avgerðir hjá barnaverndartænastum.

Onkrar klagur hava verið um vantandi undirvísing í skúlunum. Eitt av hesum málum snúði seg um vantandi teknmálsundirvísing til børn, sum hava fingið coclear implant. Her heitti umboðsmaðurin á Mentamálaráðið um at tryggja, at rætturin hjá tunghoyrdum børnum at læra teknmál verður í samsvari við m.a. grein 7 og 24 í Sáttmála sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, soleiðis at hesi børn kunnu mennast nøktandi persónligt, sosialt og kognitivt, og soleiðis at tey kunnu luttaka á jøvnum føti við hoyrandi í samfelagnum og fáa ávirkan á egið lív. (LUM 16/00029)

Eitt annað mál snúði seg um rættartrygdina hjá einum barni, sum eini hjún høvdu búgvandi hjá sær. Avleiðingin av hesum máli varð, at umboðsmaðurin heitti á landsstýriskvinnuna í Almannamálum um at umhugsa at seta ásetingar um privata døgnrøkt í Barnaverndarlógina, vísandi til grein 20 í Barnarættindasáttmálanum. Ásetingarnar um privata døgnrøkt skulu tryggja, at onkur er, sum lógliga kann taka umsorganarligar avgerðir vegna børn, sum ikki búgva hjá foreldramyndugleikahavara, men heldur ikki eru umsorganaryvirtikin av myndugleikunum. Lógaruppskot viðvíkjandi ásetingum um privata døgnrøkt fór í mars 2017 í Løgtingið. (LUM 15/00067)

Nøkur børn hava vent sær til umboðsmannin, síðani umboðsmaðurin fekk serliga eftirlitið við barna- og ungdómsøkinum. Tey flestu hava verið ónøgd við málsviðgerð ella avgerðir hjá barnaverndartænastum. Í slíkum førum bjóðar umboðsmaðurin vanliga barninum til eitt prát og vendir sær síðani til barnaverndartænastuna við trupulleikanum hjá barninum og roynir at hjálpa barninum á henda hátt.

## Mál av egnum ávum

Umboðsmaðurin hevur eisini tikið mál upp av egnum ávum. Í einum máli hevur umboðsmaðurin vent sær til Barnaverndarstovuna fyri at hoyra um mannagongdir í sambandi við avhoyring av børnum, sum hava verið fyri harðskapi ella kynsligum ágangi. Umboðsmaðurin var serliga áhugaður í, hvussu long tíð var frá liðin í teimum einstøku málunum, frá tí at fráboðan um harðskap ella kynsligan ágang kom, til barnið varð avhoyrt í Barnahúsinum. Orsøkin til hetta var, at vanliga kunnu børn, sum hava verið fyri harðskapi ella kynsligum ágangi, ikki fáa sálarfrøðiliga hjálp, fyrrenn tey eru avhoyrd, tí tað kann ávirka avhoyringarnar. Tað er tí ein trupulleiki, um tað gongur ov long tíð, frá tí at fráboðan kemur, til avhoyring verður. Í hesum førum hevði Barnaverndarstovan ikki nóg neyvar upplýsingar at geva umboðsmanninum, og umboðsmaðurin hevði ikki heimild at biðja um upplýsingarnar frá løgregluni.

Í einum øðrum máli hevur umboðsmaðurin vent sær til Psykiatriska depilin og spurt nærri um umstøðurnar hjá børnum og ungum, sum verða innløgd á Psykiatriska depilin. Hetta mál er í gongd, og tí er eingin niðurstøða komin í málinum enn.

## Eftirlitsvitjanir

Síðani umboðsmaðurin fekk eitt serligt eftirlit við barna- og ungdómsøkinum, hevur hann verið á eftirlitsvitjan á fimm stovnum fyri børn og ung við menningartarni ella fjølbreki. Orsøkin til, at umboðsmaðurin, sum tað fyrsta, valdi júst hetta økið, var, at børnini og tey ungu á hesum stovnum teljast millum tey veikastu í samfelagnum og hava lítlan og ongan møguleika at siga frá sjálvi, um rættindi teirra ikki verða vird.

Umboðsmaðurin kom við fleiri tilmælum um, hvussu viðurskiftini kunnu betrast fyri hesi børn og ungu. (LUM 14/00094, 15/00010, 15/00030, 15/00033, 15/00102)

## Eftirlitskanningar

Umboðsmaðurin setti á heysti 2016 kanning í verk av, um barnaverndartænasturnar halda endurskoðanarfreistirnar, sum Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur sett í barnaverndarmálum. Orsøkin til hesa kanningina er, at tað er týdningarmikið fyri rættartrygdina, bæði hjá foreldrum og børnum, í málum um umsorganaryvirtøku, at endurskoðanarfreistirnar verða hildnar. Kanningin er í gongd, og tí er eingin niðurstøða av kanningini enn.

## Kunning um virksemi á barnaøkinum

Umboðsmaðurin ger serligt burturúr at kunna almenningin og serliga børn og ung um møguleikarnar at klaga til umboðsmannin, og hvat umboðsmaðurin kann gera fyri at hjálpa. Á heimasíðuni hjá umboðsmanninum er leinki til **www.bum.fo** (barnanna umboðsmaður), har m.a. greitt verður frá um umboðsmannin, hvørjar klagur umboðsmaðurin kann viðgera, og hvussu farast skal fram, tá klagað verður til umboðsmannin.

Í november 2014 luttók umboðsmaðurin við upplýsandi tilfari um virksemi hjá umboðsmanninum á barnaøkinum á tiltaki fyri børn í Perluni í Havn. Hetta var tiltak, sum Barnabati skipaði fyri í sambandi við, at Barnarættindasáttmálin fylti 25 ár.

Í september 2015 luttók umboðsmaðurin á fólkafundi í Ítróttarhøllini á Hálsi við m.ø. faldarum og leikum, har kunnað varð um virksemi hjá umboðsmanninum á barnaøkinum.

Eisini hevur umboðsmaðurin havt lýsingar í skúlablaðnum Strok og á Facebook. Harumframt hevur umboðsmaðurin sent faldarar um virksemi sítt á barnaøkinum til støð, har børn kunnu væntast at síggja teir.

## Kunning til almennar myndugleikar

Í august 2016 sendi umboðsmaðurin kunningarskriv til almennar myndugleikar í Føroyum, sum varða av børnum, um rættindini hjá børnum at verða hoyrd sambært Barnarættindasáttmálanum. Í kunningarskrivinum greiddi umboðsmaðurin frá um rættindi hjá barninum, sambært grein 12 í Barnarættindasáttmálanum, til frítt at greiða frá síni hugsan í øllum viðurskiftum, sum hava eina ella aðra ávirkan á barnið. Hetta er galdandi bæði í málum, sum barnið sjálvt hevur tikið stig til, og í málum, sum onnur hava tikið stig til. Einki aldursmark er fyri, nær eitt barn hevur rætt at siga sína hugsan. Tað eru myndugleikarnir, sum mugu meta um førleikan hjá barninum at gera sær síni egnu meiningar og við grundgevingum meta, hvussu stórur dentur skal leggjast á meiningina og ynskini hjá barninum. Í kunningarskrivinum greiddi umboðsmaðurin eisini frá, at barnið kann lata seg umboða av øðrum í sambandi við hoyring, og hvørji hesi umboð kunnu vera. (LUM 16/00083)

## Undirvísingartilfar

Umboðsmaðurin hevur í 2016 gjørt kunningartilfar til børn í 11-12 ára aldri um rættindi hjá børnum sambært Barnarættindasáttmálanum. Í tilfarinum verður m.a. greitt frá søguni handan Barnarættindasáttmálan og nøkrum av rættindunum, sum børn hava eftir Barnarættindasáttmálanum. At rættindunum eru tengdar smásøgur, sum lýsa ymiskar støður hjá børnum. Eisini verður greitt frá um virksemi hjá umboðsmanninum á barnaøkinum, og hvar børn kunnu venda sær, um tey hava tørv á hjálp. Nám hevur hjálpt við uppseting og grafiska arbeiðinum, og tilfarið liggur nú á heimasíðuni **www.snar.fo** undir teiginum „tema“. Hugsanin er, at tilfarið m.a. kann nýtast til undirvísing og í sambandi við evnisvikur um barnarættindi.

## Samstarv við onnur á barnaøkinum

Tað er týdningarmikið fyri umboðsmannin at hava gott samband og samstarv við felagsskapir og onnur, sum fáast við børn, fyri at fáa innlit í, hvat hendir millum børn og ung, og hvørjir trupulleikar eru á økinum.

Umboðsmaðurin luttekur t.d. á árliga kveikingardegnum hjá SSP (Samstarv millum skúla, sosialar myndugleikar og politi), og á NFBO ráðstevnum (Nordisk forening mot barnemishandling og omsorgssvikt). Umboðsmaðurin hevur gott samband við Barnabata og hevur havt framløgu á NFBO ráðstevnu, sum Barnabati skipaði fyri í Norðurlandahúsinum í oktober 2015. Umboðsmaðurin hevur eisini verið á vitjan hjá norska Barneombudet, sum kunnaði umboðsmannin um arbeiði hjá stovninum.

Í mai 2016 var umboðsmaðurin á fyrsta sinni boðin við á árliga norðurlendska barnaumboðsfundin, har barnaumboð úr øllum Norðurlondum luttaka. Á hesum fundum

verða orð skift um royndir og avbjóðingar hjá teimum ymisku barnaumboðunum. Samstarvið er av stórum týdningi fyri umboðsmanninum, sum á henda hátt fær kunning um trupulleikar á barnaøkinum í grannalondum okkara og íblástur til sítt egna arbeiði á økinum. Næsti norðurlendski barnaumboðsfundurin verður í Føroyum í mai 2017, har umboðsmaðurin er vertur.

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR, UNDIR BRYGGJUBAKKA 11, POSTMOGA 2008, FO-110 TÓRSHAVN